# FRÁGREIÐING 2025

PISA

# Innihaldsyvirlit


**Samandráttur og tilmæli** . . . 5
Náttúruvísindi . . . 5
Lesing . . . 5
Støddfrøði . . . 6
Umhvørvið . . . 6
Skúlaleiðarasvar . . . 6

**Kapittul 1: Yvirskipað um PISA og høvuðsúrslitini 2025** . . . 7
Høvuðsúrslitini í PISA 2025 . . . 8
Kunnandi viðmerkingar . . . 10

**Kapittul 2: Úrslitini í náttúruvísindum 2025** . . . 11
Náttúruvísindi – og hví tey hava týdning . . . 11
Náttúruvísindaligi hugtakskarmurin . . . 11
Úrslit í náttúruvísindum . . . 12
Førleikastig í PISA-kanningunum . . . 14
Førleikastigini og skúlaskipanin . . . 14
Partsførleikar í náttúruvísindum . . . 18
Førleiki 1: Greiða frá fyribrigdum á náttúruvísindaligum grundarlagi . . . 18
Førleiki 2: Meta um og leggja til rættis náttúruvísindaligar kanningar og tulka náttúruvísindaligar dátur og próvtilfar kritiskt . . . 18
Førleiki 3: Kanna, meta um og nýta náttúruvísindaligar upplýsingar til støðutakan og handling . . . 19
Partsførleikarnir og høvuðsúrslitini . . . 19
Kynsmunur í úrslitunum . . . 19
Gentur standa seg betur í at meta um og nýta náttúruvísindaliga kunning . . . 20
Føroysku úrslitini í norðurlendskum samanhangi . . . 21
Skúlabólkar og vísitøl . . . 22
Trivnaður . . . 24
Atburðarmynstur í flokkinum . . . 24
Lærarin í náttúruvísindafakum . . . 25
Fjølbroytt undirvísing . . . 25
Náttúruvísindaástøði *(en. nature of science)* . . . 26
Vitlíki til skúlaarbeiði . . . 27
Hugburður og lyndi . . . 27
Læruhættir . . . 27
Samanumtøka . . . 28

**Kapittul 3. Lesing** . . . 29
PISA-lesføri í lesing . . . 29
Høvuðsúrslit í PISA 2025 . . . 29
Føroyar samanbornar við hini londini . . . 30
Tey átta stigini av lesiførleika í PISA . . . 33
Lesiførleikastig í PISA . . . 36
Førleikastigin, fráfaringarroyndin og landsroyndirnar . . . 38
Lesføri hjá føroyskum gentum og dreingjum . . . 38
PISA og lesivanakanningar . . . 39
Samanumtøka . . . 39
Tilmæli . . . 40

**Kapittul 4: Úrslitini í støddfrøði 2025** . . . 41
Samandráttur . . . 41

Inngangur . . . 41
Hvat kannar PISA viðvíkjandi støddfrøði? . . . 41
Allýsing av støddfrøðiligum lesføri fyri PISA 2025 (OECD, 2023) . . . 41
Mannagongdir . . . 42
Støddfrøðiligt innihald . . . 42
Samanhangir . . . 43
21.-aldar-førleikar . . . 43
PISA-uppgávur . . . 43
Úrslit . . . 43
Miðal PISA-stig . . . 43
Hagfrøðilig óvissa . . . 47
Kynsmunur . . . 47
Gongdin í støddfrøðiligum lesføri . . . 51
Tilmæli . . . 51
Uppgávudømi . . . 51
Skógarøki . . . 52

**Kapittul 5: Næmingarnir og umhvørvið** . . . 57
Førleiki í umhvørvisvísindum: Næmingaúrslit í umhvørvisvísindum . . . 57
Hugburður til umhvørvið: Umhvørvismedvit . . . 60
Hugburður til umhvørvið: Trúgv á egnan førleika at skapa broytingar til frama fyri umhvørvið . . . 61
Hugburður til umhvørvið: Trúgv á felags førleika at bøta um umhvørvið . . . 62
Hugburður til umhvørvið og úrslit í umhvørvisvísindum . . . 63
Virkin ábyrgd í umhvørvismálum: Luttøka í átøkum, sum verja umhvørvið (stuttsiktað) . . . 63
Orsakir til ikki at taka lut í umhvørvisverjandi tiltøkum . . . 64
Virkin ábyrgd fyri umhvørvinum: Væntanir um (ella áhugi fyri) starvsleið innan umhvørvisøkið (langsiktað) . . . 64
Samanhangur millum førleika, hugburð og virkna ábyrgd hjá næmingunum . . . 64
Næmingar, sum leggja dent á umhvørvið, men ikki taka virknan lut . . . 65
Møguleikar í skúlanum at styrkja virknan leiklut hjá næmingunum: Skúlamøguleikar at læra um umhvørvi og átøk . . . 65

**Kapittul 6: Skúlarnir og svarini frá skúlaleiðarum** . . . 69
Variatiónir millum skúlar og innan skúlar . . . 70
Samansetingin av starvsfólkum skúlans . . . 71
Skúlastarvsfólk, sum ikki undirvísa . . . 71
Lærarar – skúlastarvsfólk, sum undirvísa . . . 72
Náttúruvísindalærarar . . . 73
Raðfestingar av undirvísingarendamálum . . . 75
Eftirmeting av skúlanum . . . 76

**Kapittul 7: Mannagongdir, dátugóðska og góðskutrygging í PISA Føroyum 2025** . . . 79
Royndaruppgávur og spurnabløð . . . 79
Dátuinnsavningin í verki . . . 79
Málbólkur . . . 79
Royndartíðarskeið og luttøka . . . 80
Vekting . . . 80
Koting av næmingasvarum . . . 81
Dátugóðska . . . 81

**Tilvísingar** . . . 83
Tilvísingarlistin . . . 83

# Samandráttur og tilmæli

Frágreiðingin fyri PISA 2025 fevnir um sjey kapitlar, sum hvør sær viðgera ymisk viðkomandi evni innan PISA.

## Náttúruvísindi

Høvuðsevnið í PISA 2025 var náttúruvísindi, og her hendi tað gleðiliga, at meðan stórur partur av heiminum hevði afturgongd á hesum øki, so varðveittu føroyskir næmingar støðið frá seinast, enntá við einari lítlari framgongd. Vit varðveittu tó eisini stóra talið av næmingum, sum ikki megna virkisført lesføri í náttúruvísindum, samstundis sum tað vóru smávegis flytingar í hinum førleikastigunum. Hóast nevndu framgongd, so liggja vit framvegis munandi lægri enn flestu Norðurlondini; einans Ísland er á sama lága stigi sum vit.

Í sambandi við at náttúruvísindi vóru høvuðsøki, var eisini nýggjur hugtakskarmur gjørdur, sum byggir á tann frá 2015, men sum nú hevur nøkur øki afturat, m.a. at næmingarnir skulu megna at vísa, hvussu teir nýta upplýsingar til at taka støðu og handla útfrá. Eisini er náttúruvísindaligi samleikin hjá næmingunum lýstur, har bæði viðurskifti heima og hugburður og lyndi hjá næminginum til náttúruvísindi verða tikin við, samstundis sum hugt verður at umhvørvismedvitinum hjá næmingunum. Sostatt eru PISA-úrslit sera samansett, og eingin einvís frágreiðing fevnir um allar tættir í PISA. Tí verður størstur dentur í hesi frágreiðing lagdur á at samanbera okkara úrslit við tey í Norðurlondum. Hetta tí at samfeløgini og skúlaskipanirnar eru tey, sum líkjast mest okkara.

Flestu árini, síðani Føroyar komu við í PISA-kanningarnar, hevur ikki verið serliga stórur munur á, hvussu kynini hava staðið seg í náttúruvísindum, og tá tað hevur verið munur, hevur tað ofta verið, tí dreingirnir stóðu seg betur. Í ár er hetta broytt við tað, at genturnar nú eru 10 stig framman fyri dreingirnar. Hetta stendst serliga av tí nýggja undirøkinum í náttúruvísindum, har næmingarnir skulu meta um vísindaliga kunning sum grundarlagi undir støðutakan og handling. Hetta undirøkið megna genturnar munandi betri enn dreingirnir; tær eru frammanfyri við 24 stigum.

Eitt, sum eyðkennir føroysku úrslitini, er, at tað eru so fá, sum megna meira enn tað mest grundleggjandi. Hetta sæst eisini aftur í, at um hugt verður at tí bólkinum, sum fær fæst stig, so er ikki so stórur munur til t.d. OECD-miðal, men tá vit hyggja at føroyska bólkinum við teimum bestu úrslitunum, so eru tey nógv lægri enn OECD-miðal.

Hugburðurin hjá føroysku næmingunum til náttúruvísindalig evni er einki øðrvísi enn í hinum Norðurlondunum, men tá ið hugt verður at, hvat næmingarnir siga hendir inni í skúlastovuni, tykist sum um at náttúruvísindaligt og lærufrøðiligt virksemi í føroysku skúlastovunum er rættiliga nógv minni enn í Norðurlondum sum heild. Harumframt siga næmingar á teimum skúlum, sum hava lægst miðaltøl, í størri mun frá, at ávíst undirvísingarligt virksemi ikki fer fram.

**Mælt verður tí til** at styrkja bæði fakliga og lærufrøðiliga virksemið í hádeild fólkaskúlans umframt at gagnnýta bæði PISA-kanningar, fráfaringarroyndir og landsroyndir til at greina, hvørjir skúlar og teirra næmingar hava tørv á stuðli og/ella teirra lærarar hava tørv á eftirútbúgving fyri at menna undirvísingina.

Tilmælini frá undanfarnu PISA-kanningunum eru í stóran mun framvegis galdandi. Mælt verður til, at náttúruvísindi fáa eina greiðari og sterkari støðu í fólkaskúlanum, og at náttúruvísindalig undirvísing byrjar longu í 1. flokki og verður ment stigvíst gjøgnum alt skúlaskeiðið. Samstundis eiga størri krøv at verða sett til fakliga førleikan hjá lærarum, sum undirvísa í náttúruvísindaligu lærugreinunum, eins og møguleikar fyri fakligari eftir- og víðariútbúgving eiga at verða styrktir. Harumframt verður mælt til, at náttúruvísindi verða fast skrivligt próvtøkufak á sama hátt sum føroyskt og støddfrøði.

## Lesing

Í lesing fylgdu føroysku úrslitini rákinum úti í heimi, har eitt stórt fall hevur verið í lesiførleikanum. Sama gongd var eisini í Norðurlondum. Í Føroyum rukku næmingarnir 428 stigum og fóru harvið 19 stig aftur frá 2022. Hetta er væl størri afturstig enn OECD-miðal.

Í lesing eru nú 42% undir tí, sum nevnt verður virkisført lesføri, og minni enn 30% eru miðalgóðir lesarar ella betur. Afturstigið er serliga, at vit nú hava fingið 10%-stig fleiri í bólkin "Ikki-virkisført lesføri". Ábendingar eru um, at tað serliga eru dreingirnir, sum hava havt stór afturstig í lesing.

Úrslitini í lesing eru samanborin við fráfaringarroyndir, landsroyndir og lesivanakanningar, og allar hesar royndir og kanningar siga somu søgu.

**Mælt verður tí til** at styrkja lesing og lesimenning sum eitt felags fakligt og granskingarligt átaksøki, bæði í fólkaskúlanum og á námsfrøðinga- og lærarautbúgvingunum. Hetta fevnir um eina samskipaða ætlan fyri lesimenning tvørtur um lærugreinir, meira og dagført føroyskt lesitilfar, serliga til eldri næmingar og dreingir, og størri tilvit um, hvussu miðil og uppseting ávirka lesifatan. Samstundis eigur gransking í lesiundirvísing, frálæruháttum og undirvísingaramboðum at verða raðfest, við m.a. atliti at, hvussu lesing kann gerast áhugaverd og við-

komandi hjá ungum. Føroyska arbeiðið eigur eisini støðugt at taka støði í royndum og gransking úr grannalondunum, har nógvar av somu avbjóðingunum gera seg galdandi.

## Støddfrøði

Í PISA 2025 er miðalúrslitið hjá føroysku næmingunum í støddfrøði 452 PISA-stig, sum er 6 stig hægri enn í 2022. Føroyar skilja seg harvið frá hinum Norðurlondunum, tí meðan úrslitið í Føroyum er batnað eitt sindur, er afturgongd bæði í hinum Norðurlondunum og í OECD-miðaltalinum. Hækkingin er tó ikki hagfrøðiliga signifikant, og hóast framgongdina er miðalúrslitið framvegis 39 stig lægri enn í 2018, sum var besta úrslitið higartil.

Tá hugt verður at førleikastiganum, røkka 65% av føroysku næmingunum stigi 2 ella hægri. Hetta er ein lítil framgongd samanborið við 2022. Kortini er meira enn triði hvør næmingur undir stigi 2, sum sambært OECD verður roknað sum grundleggjandi minstamark fyri støddfrøðiligum lesføri, ið er neyðugt fyri at kunna taka virknan lut í nútíðarsamfelagnum. Samstundis er bólkurin av føroyskum næmingum, sum røkkur teimum hægstu førleikastigunum, lutfalsliga lítil.

Úrslitini í PISA 2025 kunnu sostatt tulkast sum tekin um eina varliga framgongd eftir munandi afturgongdina í 2022. Støðan er tó framvegis merkt av avbjóðingum. Serliga er tørvur á at minka um bólkin av næmingum undir stigi 2 og samstundis at skapa betri fortreytir fyri, at fleiri næmingar røkka teimum hægru førleikastigunum.

**Mælt verður tí til** at byggja víðari á tey átøk, sum longu eru sett í verk, og tryggja, at tey gerast ein rótfestur partur av vanligu støddfrøðiundirvísingini. Hetta fevnir millum annað um at halda fram við og menna *Støddfrøði í verki* og stuðla lærarum í arbeiðinum við at seta nýggju námsætlanirnar í verk. Støddfrøðilig modellering og talgild støddfrøðilig amboð eiga at fáa ein natúrligan og regluligan leiklut í undirvísingini, og uppgávur, eftirmetingar og próvtøkur eiga í størri mun at endurspegla teir støddfrøðiligu førleikarnar, sum næmingarnir skulu menna.

Átøkini eiga bæði at hava sjóneykuna á næmingum, sum ikki røkka stigi 2, og á at skapa betri fortreytir fyri, at fleiri næmingar røkka teimum hægru førleikastigunum. Samstundis eigur menningin at verða fylgd við skipaðari gransking og eftirmeting, so vit fáa vitan um, hvørji átøk hava ætlaðu ávirkanina á støddfrøðiligu førleikarnar hjá næmingunum.

## Umhvørvið

OECD metir tað vera týdningarmikið, at framtíðarborgarar megna at skipa samfeløg, sum taka atlit til burðardygd og umhvørvið, og hevur lýst nakrar førleikar, sum tey kanna fyri at lýsa virkisførleikan hjá næmingum til umhvørvisviðurskifti.

Talan er í stóran mun um atknýtt evni til náttúruvísindi, og úrslitini hjá føroyskum næmingum samsvara væl við tey, sum tey hava í náttúruvísindum. Føroyar fingu 447 stig í lesføri innan umhvørvisvísindi ella 43 stig minni enn miðal fyri Norðurlond.

Tá talan er um umhvørvismedvit og um sjálvi at gera átøk til frama fyri umhvørvið, eru føroyskir næmingar meira ivasamir, enn tá ið talan er um at gera átøk í felag og í skúlahøpi.

## Skúlaleiðarasvar

Í frágreiðingini er eisini eitt brot við svarunum frá skúlaleiðarunum, sum svara spurningum um sín skúla. Svarini vísa, at skúlar í smærru økjunum, ikki bara í Føroyum, hava størri avbjóðingar við at fáa starvsfólk. Helst tí so stórur partur av føroysku skúlunum eru smáir, er føroyska lutfallið av næmingum til hvønn lærara lægri enn í flestu av hinum Norðurlondunum.

Svarini hjá føroysku skúlaleiðarunum verða samanborin við svar úr Norðurlondum, OECD og øðrum londum.

# Kapittul 1:Yvirskipað um PISA og høvuðsúrslitini 2025

OECD hevur nú skipað fyri PISA-kanningum níggju ferðir. PISA hevur til endamáls at varpa ljós á, hvat borgarar hava tørv á at vita og duga, og metir tí um, í hvønn mun 15-ára gamlir næmingar, sum eru um at vera lidnir við ta kravdu skúlagongdina, hava ognað sær ta vitan og teir førleikar, ið eru neyðugir fyri at kunna taka virknan lut í nútímans samfelagi.

Fyrstu ferð, OECD skipaði fyri PISA-kanning, var í 2000, tá lesing var á skránni. Tá luttóku 32 lond, harímillum øll Norðurlond uttan Føroyar. Síðani tá hava alt fleiri lond luttikið í hesi kanningini, og í 2025 luttóku meira enn 760.000 næmingar í 91 londum og búskapum. Sostatt er PISA tann mest umfatandi og gjølliga altjóða kanningin, sum metir um avrik hjá næmingum og savnar upplýsingar um næmingin sjálvan og teir karmar, sum skúlin virkar undir. Hesar upplýsingarnar kunnu hjálpa til at greiða frá muninum í avrikum.

Avgerðir um, hvat skal metast, og hvørjir bakgrundsupplýsingar skulu savnast, verða tiknar av fremstu serfrøðingum úr luttakandi londunum. Arbeiðið verður samskipað av stjórnum í felag og byggir á felags útbúgvingarpolitisk áhugamál. Tað verður lagt nógv arbeiðsorka og tilfeingi í at tryggja, at metingartilfarið er væl grundað í mentan og málsliga hóskandi í øllum londum. Somuleiðis verða neyv góðskukrøv sett til umsetingar og dátusavning. Av tí sama hava PISA-úrslitini høgt trúvirði.

PISA leggur dent á at kunna brúkast útbúgvingarpolitiskt, har upplýsingar um læruúrtøku hjá næmingunum verða samantvinnaðar við upplýsingar um teirra bakgrund, teirra hugburð og til læring og teir tættir, sum ávirka læringina bæði í skúlanum og uttan fyri skúlan. Hetta ger tað møguligt at lýsa munir í avrikum og eyðmerkja sermerki hjá teimum næmingum, skúlum og útbúgvingarskipanum, sum klára seg væl.

PISA hevur eina nýskapandi fatan av lesføri (en. *literacy*), sum snýr seg um førleikan hjá næmingum at nýta vitan og førleikar, hugsa skipað og at samskifta á ein virknan hátt, alt meðan tey eyðmerkja, tulka og loysa trupulleikar í ymsum samanhangum.

PISA metir ikki bert, um næmingar duga at endurgeva vitan. Kanningin kannar eisini, hvussu væl tey megna at flyta tað, tey hava lært, til nýggjar og ókendar støður og at nýta hesa vitan bæði í skúlanum og uttan fyri skúlan. Hesin hugsanarháttur endurspeglar, at í nútímans búskapi verður virðið hjá tí einstaka ikki bert mett út frá tí, viðkomandi veit, men eisini út frá tí, viðkomandi dugir at gera við sína vitan.

Metingin fevnir um høvuðsøkini lesing, støddfrøði og náttúruvísindi. Harumframt var í 2025 nýggja fakøkið *Læra í talgilda heiminum* partur av metingini. Bert høvuðsøkini eru umrødd í hesi frágreiðing.

Í 2006 vóru náttúruvísindi høvuðsøki, og tá komu Føroyar eisini við í kanningina. Føroyska úrslitið var munandi lakari enn fyri hini Norðurlondini, sum øll lógu kring OECD-miðal ella hægri. Føroyar vóru fleiri ársverk aftanfyri í øllum trimum fakøkjum; millum 40-80 PISA-stig undir OECD-miðal. So var í nøkur ár ein støðug framgongd í støddfrøði og náttúruvísindum fram til 2018, og í lesing fram til 2015, men síðani hevur verið afturgongd í føroysku úrslitunum (mynd 1.1). Í støddfrøði og náttúruvísindum hava føroysku næmingarnir varðveitt støðið frá 2022, men í lesing er afturgongdin hildin fram.




*Mynd 1.1: Gongdin í høvuðsøkjunum frá 2006 til 2025.*

## Høvuðsúrslitini í PISA 2025

*Talva 1.1: Úrslitini í PISA 2025 býtt út á høvuðøkini støddfrøði, lesing, náttúruvísindi við tess undirbólkum og umhvørvisvísindi, sum er eitt náttúruvísindaligt øki.*

| | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg[1)] | Svøríki | Danmark |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Støddfrøði | 452 | 450 | 469 | 452 | 464 | 471 |
| Lesing | 428 | 422 | 474 | 453 | 466 | 460 |
| Náttúruvísindi | 451 | 441 | 504 | 470 | 485 | 478 |
| Greiða frá fyribrigdum á náttúruvísindaligum grundarlagi | 448 | 437 | 507 | 473 | 485 | 479 |
| Kanna, meta um og nýta náttúruvísindaligar upplýsingar til støðutakan og handling | 444 | 425 | 507 | 464 | 488 | 470 |
| Meta um og leggja til rættis náttúruvísindaligar kanningar og tulka náttúruvísindaligar dátur og próvtilfar kritiskt | 452 | 446 | 500 | 470 | 482 | 476 |
| Umhvørvisvísindi | 447 | 433 | 502 | 469 | 485 | 472 |

Mynd 1.2a vísir søguligu gongdina í miðal-avrikunum hjá næmingum í OECD-23-londunum í fakøkjunum náttúruvísindi, lesing og støddfrøði. Tað sæst, at miðalúrtøkan er lækkað munandi. Hvítu prikkarnir vísa støðið í 2025. Tá onnur ár hava hvítar prikkar merkir tað, at tað er ikki hagfrøðiligur munur frá úrslitunum frá 2025. Tað sæst, at tað bert eru náttúruvísindi fyri 2022, sum ikki eru hagfrøðiliga øðrvísi enn í 2025, ella við øðrum orðum: Innan øll fakøkini hevur verið ein munandi lækking, og hendan heldur fram í 2025.




*Mynd 1.2a: Søguliga gongdin í miðal PISA-stigum í OECD-londunum frá 2000-2025.*

Tá hugt verður at føroysku úrslitunum í mun til hesi somu søguligu tøl (mynd 1.2b), so sæst, at bæði í náttúruvísindum og í støddfrøði fóru vit í 2025 ímóti rákinum og minkaðu um munin til OECD-miðal. Í førleikanum at lesa hevur í OECD-londunum verið eitt fall síðani 2012, og hesum falli hava vit fylgt rættiliga neyvt. Tað, at føroyskir næmingar betur hava megnað náttúruvísindi og støddfrøði, kann vera, tí at OECD hesa ferð hevur lagt seg eftir at sleppa undan spurningum í náttúruvísindaliga fakøkinum, sum meta um lesføri í lesing.




*Mynd 1.2b: Føroysku úrslitini sett saman við miðal PISA-stig í OECD-londunum frá 2000-2025.*

Broytingar frá 2022 til 2025 í miðaltølum fyri náttúruvísindi, lesing og støddfrøði síggjast í talvuni niðanfyri (talva 1.2). Bert lond og búskapir, sum kunnu samanbera úrslitini frá 2022 og 2025 í øllum trimum fakøkjunum, eru víst. Londini/búskaparøkini eru skipað eftir broytingini í náttúruvísindum millum 2022 og 2025. Føroyar eru merktar við grønum og hini Norðurlondini við bláum. Av Norðurlondunum eru tað bert Føroyar, sum hava havt framgongd í náttúruvísindum og støddfrøði. Føroyska afturgongdin í lesing var minni, enn afturgongdin var í Danmark, Noreg og Svøríki, men størri enn í Íslandi og Finnlandi.

*Talva 1.2: Broytingar í PISA-stigum frá 2022 til 2025 innan øll trý høvuðsøkini. OECD-miðal fevnir um 35 lond.*

| | |
|---|---|
| | Framgongd |
| | Eingin hagfrøðilig broyting |
| | Afturgongd |

| | Náttúruvísindi | Lesing | Støddfrøði |
|---|---|---|---|
| Georgia | 38 | 10 | 26 |
| Kambodja | 35 | 18 | 29 |
| Jordan | 32 | 20 | 26 |
| Montenegro | 32 | 13 | 5 |
| Sameindu Emirríkini | 26 | 15 | 21 |
| Saudiarabia | 23 | 5 | 1 |
| Tailand | 23 | 13 | 13 |
| Turkaland | 18 | 16 | 8 |
| Filipsoyggjar | 17 | 20 | 16 |
| Kosta Rika | 13 | 1 | 3 |
| Slovakia | 13 | 1 | 5 |
| Bretland | 12 | 0 | -1 |
| Mongolia | 12 | -4 | -6 |
| El Salvador | 12 | 2 | 3 |
| Uruguai | 9 | -7 | -4 |
| Indonesia | 6 | 7 | -2 |
| Eysturríki | 6 | -13 | -10 |
| Brasil | 6 | -2 | -2 |
| Italia | 6 | -7 | -3 |
| Nýsæland* | 5 | -4 | 1 |
| Moldova | 5 | -7 | -4 |
| Meksiko | 4 | -7 | -7 |
| Føroyar | 4 | -19 | 6 |
| Litava | 3 | -8 | -5 |
| Malaisia | 3 | 5 | -11 |
| Kolumbia | 3 | -9 | -2 |
| Kina: Taipei | 2 | -7 | -1 |
| USA* | 2 | -14 | -2 |
| Avstralia | 2 | -7 | -10 |
| Katar | 2 | -1 | 2 |
| Estland | 1 | -12 | -2 |
| Dominikalýðveldið | 0 | -6 | 0 |
| Kosovo | 0 | -2 | -5 |
| Bulgaria | 0 | -18 | -12 |
| Belgia | -1 | -13 | -10 |
| Kili | -1 | -12 | -9 |
| Ukraina | -1 | -8 | -9 |
| Sveis | -1 | -13 | -9 |
| Norðurmakedónia | -1 | -1 | -9 |
| Singapor | -2 | -8 | -12 |
| Korea | -2 | -15 | -5 |
| Peru | -2 | -18 | -9 |
| Kina: Makao | -2 | -9 | -3 |
| Portugal | -3 | -15 | -12 |
| Rumenia | -3 | -16 | -9 |
| OECD-MIÐAL | -3 | -14 | -9 |
| Niðurlond* | -3 | -18 | -9 |
| Kakakstan | -4 | -1 | -12 |
| Frakland | -4 | -18 | -16 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Póland | -4 | -7 | -5 |
| Írland | -4 | -16 | -12 |
| Kanada* | -5 | -17 | -12 |
| Ísland | -6 | -14 | -9 |
| Ungarn | -6 | -21 | -13 |
| Kroatia | -6 | -22 | -8 |
| Brunei | -6 | -4 | -7 |
| Grikkaland | -7 | -16 | -6 |
| Finnland | -7 | -16 | -15 |
| Týskland | -7 | -15 | -11 |
| Spania | -7 | -23 | -16 |
| Marokko | -7 | -18 | -10 |
| Kekkia | -7 | -20 | -10 |
| Noreg* | -8 | -24 | -17 |
| Svøríki | -8 | -21 | -18 |
| Japan | -9 | -13 | -10 |
| Palestina | -10 | 1 | -11 |
| Malta | -13 | -31 | -27 |
| Paraguai | -13 | -21 | -4 |
| Argentina | -13 | -12 | -11 |
| Slovenia | -16 | -24 | -25 |
| Danmark | -16 | -29 | -19 |
| Serbia | -18 | -26 | -23 |
| Guatemala | -22 | -37 | -10 |
| Ísrael | -23 | -38 | -25 |
| Kina: Hong Kong | -25 | -20 | -19 |
| Lettland | -25 | -45 | -23 |

Munurin millum miðalúrslitið hjá OECD-londunum

og Føroyar – roknað í PISA stigum – er minst í støddfrøði, 17 stig, og størst í náttúruvísindum, 35 stig (talva 1.3). Hesin munurin kann eisini lýsast við, at sambært OECD verður roknað við, at næmingarnir menna seg 20 PISA-stig fyri hvørt skúlaárið. OECD ger tó vart við, at hesi 20 stigini um árið ikki eru liniér, og at tað eisini er munur á londum. Í Evropa menna næmingarnir seg í miðal meira enn 20 PISA-stig fyri hvørt skúlaárið, meðan tað í øðrum londum kann vera munandi minni.

*Talva 1.3: Munurin millum føroysku miðalúrslitini í PISA-stigum og OECD-miðalstigini fyri 2025.*

| Fakøki | OECD-23 | Føroyar | Munur |
|---|---|---|---|
| Náttúruvísindi | 486 | 451 | -35 |
| Lesing | 456 | 428 | -28 |
| Støddfrøði | 469 | 452 | -17 |

Og at enda vísir tað seg at vera ein tættur samanhangur (korrelatión) millum tey ymsu fakøkini. Dugir tú væl at lesa, so dugir tú eisini at lesa spurningin, sum settur verður í náttúruvísindum og í støddfrøði.

Talva 1.4 vísir sambandið millum úrslitini í ymsu fakøkjunum samanborið við, hvussu góður samanhangurin er í hinum Norðurlondunum. Vit síggja, at Føroyar liggja lægst, tá tað snýr seg um sambandið millum øll fakøkini.

*Talva 1.4: Korrelatiónir millum ymsu høvuðsøkini í Norðurlondum.*

| Korrelatión | **Føroyar** | **Ísland** | **Finnland** | **Noreg** | **Svøríki** | **Danmark** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Náttúruvísindi – Støddfrøði | 0,82 | 0,86 | 0,89 | 0,87 | 0,87 | 0,86 |
| Náttúruvísindi – Lesing | 0,80 | 0,84 | 0,88 | 0,81 | 0,86 | 0,82 |
| Støddfrøði – Lesing | 0,68 | 0,82 | 0,81 | 0,84 | 0,87 | 0,74 |

## Kunnandi viðmerkingar

- Í nógvum av talvunum eru nøkur lond merkt við stjørnu, og tá snýr tað seg um, at landið onkursvegna ikki hevur yvirhildið øll góðskukrøvini, sum OECD setur. Í 2025 er Noreg eitt av hesum londunum, og í 2022 var tað Danmark. Ofta snýr tað seg um antin luttøkuprosent, ella at frátiknir næmingar mugu ikki verða fleiri enn 5%. Noreg yvirhelt ikki hetta kravið í 2025 við 10,4% av frátiknum næmingum, og OECD vísir á, at hetta er ein øking frá 2022, tá talið var 7,3%. Tey gera vart við, at hetta høga talið av frátiknum næmingum kann hava við sær, at norska úrslitið er hægri, enn tað eigur. Av Norðurlondum var tað bert Noreg, sum fekk eina viðmerking. Føroyar fóru tó eisini upp um markið fyri frátiknar næmingar við einum prosentstigi.
- Tey luttakandi londini verða ofta nevnd lond og/ella búskapir ella búskaparøkir. Í PISA 2025 luttóku 91 lond og búskapir. Hesi londini kunnu greinast til 38 OECD-limalond og 53 samstarvslond og búskapir. Í hesari frágreiðing hava vit í støðum loyvt okkum at skriva tekstin eitt sindur lættari og einans brúka heitið *lond* í staðin fyri at skriva *lond og búskapir*.

# Kapittul 2: Úrslitini í náttúruvísindum 2025

## Náttúruvísindi – og hví tey hava týdning

Náttúruvísindalig vitan hevur seinastu øldirnar grundleggjandi broytt okkara fatan av náttúruni og okkara egnu støðu í henni. Hon hevur gjørt okkum før fyri at skilja náttúruna bæði í tí stóra og tí smáa, alt frá alheiminum og menniskjakroppinum til arv, sjúkur og tær skipanir, sum lívið á jørðini er treytað av. Samstundis hevur náttúruvísindalig vitan verið grundarlag undir tøkniligari menning, sum hevur broytt heilsu og livikor hjá menniskjum.

Endamálið við náttúruvísindaundirvísing er tó ikki fyrst og fremst at útbúgva framtíðar-náttúruvísindafólk. Náttúruvísindalig fatan verður mett sum ein grundleggjandi partur av útbúgvingini hjá øllum ungum, tí borgarar hava tørv á at skilja og taka støðu til viðurskifti, har náttúruvísindalig vitan hevur týdning. Hetta fevnir bæði um persónligar avgerðir sum eitt nú heilsu og kost og um størri samfelagsligar spurningar sum umhvørvi, náttúrutilfeingi, orku og burðardygga menning.

Hesin førleikin hevur fingið vaksandi týdning í 21. øld. Menniskjalig ávirkan á jarðarskipanirnar er nú so stór, at tíðarskeiðið verður lýst sum antroposena tíðarbilið. Veðurlagsbroytingar, tap av lívmargfeldi og avbjóðingar við mati, drekkivatni, orku og heilsu krevja náttúruvísindaliga vitan og nýskapandi loysnir. Samstundis krevja hesar avbjóðingarnar samfelagsborgarar, sum kunnu skilja og meta um vitanargrundarlagið undir teimum avgerðum, sum verða tiknar.

Vaksandi nøgdin av kunning, ikki minst villleiðandi og skeivari kunning á netinum og sosialum miðlum, setur harumframt nýggj krøv til náttúruvísindaligt lesføri. Tað er ikki nóg mikið at kenna náttúruvísindalig hugtøk og ástøði. Borgarar mugu eisini kunna meta um prógvtilfar, trúvirðið hjá keldum og serfrøðingum og skilja, hvussu náttúruvísindalig vitan verður ment og eftirkannað. Tí hevur tað týdning at skilja arbeiðshættirnar í náttúruvísindum, leiklutin hjá javnlíkameting og týdningin av vísindaligari semju.

PISA 2025 leggur tí dent á, at ung ikki bara skulu hava náttúruvísindaliga vitan, men eisini duga at nýta hana. Endamálið er at menna væl kunnaðar og kritiskar brúkarar av náttúruvísindaligari vitan, sum kunnu taka støðu og virka á einum upplýstum grundarlagi. Hetta verður í hugtakskarminum savnað í trimum náttúruvísindaligum førleikum: at greiða náttúruvísindaliga frá fyribrigdum; at gera og meta um sniðgevingar av náttúruvísindaligum kanningum og tulka dátur og prógvtilfar kritiskt; og at finna, meta um og nýta náttúruvísindaliga kunning sum grundarlag undir avgerðartøku og handling.

Í føroyskum høpi hevur náttúruvísindaligt lesføri serligan týdning. Føroyska samfelagið og búskapurin eru í stóran mun grundað á náttúrutilfeingi, og týðandi avgerðir um eitt nú fiskivinnu, alivinnu, havumhvørvi, orku og burðardygga gagnnýtslu av náttúruni krevja náttúruvísindaliga vitan. Hetta er ikki bara vitan, sum framtíðar-náttúruvísindafólk hava tørv á. Tey, sum fara at starvast innan eitt nú fyrisiting, búskap, løgfrøði, miðlar, undirvísing og politikk skulu eisini kunna skilja og meta um náttúruvísindaligt prógvtilfar, hóast tey ikki hava serstaka náttúruvísindaliga útbúgving.

## Náttúruvísindaligi hugtakskarmurin

Hugtakskarmarnir, sum PISA-kanningarnar byggja á, verða støðugt mentir, og nýggir tættir verða tiknir við, so hvørt sum ávísa fakøkið er høvuðsevni. Tó verður altíð bygt á sama grundarlag sum undanfarnar kanningar, soleiðis at samanberingar kunnu gerast yvir tíð.

Nú náttúruvísindi vóru høvuðsevni, varð náttúruvísindaligi hugtakskarmurin endurskoðaður og nøkur evni løgd afturat. Førleikarnir vórðu víðkaðir við eisini at kunna taka støðu og handla út frá upplýsingum (*agency*), og hugburðurin hjá næmingum til náttúruvísindi varð settur í ein størri samanhang, har náttúruvísindaligur kapitalur, umsorgan og ábyrgdarkensla fyri umhvørvinum og virkisføri eru við í metingargrundarlagnum.

Mynd 2.1 tekur saman um høvuðstættirnar í náttúruvísindaliga hugtakskarminum fyri PISA 2025 og vísir, hvussu teir hanga saman. Í miðdeplinum eru teir tríggir náttúruvísindaligu førleikarnir, sum PISA metir um: at greiða frá fyribrigdum á náttúruvísindaligum grundarlagi; at meta um og leggja til rættis náttúruvísindaligar kanningar og tulka dáta og prógvtilfar kritiskt; og at kanna, meta um og nýta náttúruvísindaliga kunning til støðutakan og handling.

Førleikarnir verða ikki mettir hvør sær. Uppgávurnar verða settar inn í persónlig, staðbundin, landsfevnandi ella alheimslig høpi, har næmingurin skal nýta náttúruvísindaliga vitan til at skilja ella taka støðu til ein spurning. Talan kann til dømis vera um heilsu, umhvørvi, náttúrutilfeingi, tøkni ella aðrar støður, sum næmingar kunnu møta í gerandisdegnum og samfelagnum.

Hvussu væl næmingurin megnar hesar førleikarnar er treytað av fleiri viðurskiftum. Ein grundleggjandi partur er vitan, sum í PISA verður býtt í trý sløg: innihaldsvitan, háttalagsvitan og ástøðisvitan. Innihaldsvitan er vitan um náttúruvísindalig hugtøk,

fyribrigdi og ástøði. Háttalagsvitan er vitan um arbeiðshættir og mannagongdir í náttúruvísindaligum kanningum, meðan ástøðisvitan snýr seg um, hvussu náttúruvísindalig vitan verður grundað, eftirkannað og mett álítandi.

Men PISA 2025 leggur eisini størri dent enn áður á, at vitan og førleikar ikki einsamøll avgera, hvussu næmingurin nýtir náttúruvísindi. Náttúruvísindaligur samleiki fevnir um, hvussu næmingurin sær seg sjálvan í mun til náttúruvísindi og í hvønn mun náttúruvísindi verða upplivað sum viðkomandi og virðismikil. Her verða millum annað náttúruvísindaligur kapitalur, vitanarástøðiligar fatanir, hugburður og lyndi, umhvørvistilvit, umsorgan og virkisførleiki tikin við.

Mynd 2.1 vísir sostatt, at náttúruvísindaligt lesføri ikki bert er ein spurningur um, hvat næmingurin veit. Tað snýr seg eisini um, hvat næmingurin dugir at gera við vitanina, í hvørjum samanhangi hon verður nýtt, og í hvønn mun næmingurin hevur áhuga, sjálvsálit og virkisførleika til at nýta náttúruvísindaliga vitan í egnum lívi og í samfelagnum.




*Mynd 2.1: Náttúruvísindaligi hugtakskarmurin lýstur við atknýttum evnum.*

## Úrslit í náttúruvísindum

Í 2025 rukku føroyskir næmingar 451 stig í náttúruvísindum. Úrslitið í 2025 var eitt vet frægari enn í 2022, men var als ikki at samanbera við úrslitið í 2018, sum var besta úrslitið higartil.

Samanborið við Norðurlond eru Føroyar ikki longur niðast, tí í 2025 fóru vit fram um Ísland. Hetta tí vit høvdu eina lítla framgongd, meðan Ísland, eins og hini Norðurlondini, høvdu afturgongd.

Tað er rættiliga vanligt at síggja eina afturgongd í PISA-stigum, tá fakøkið er høvuðsevni innan PISA-kanningina, men hjá okkum var ein lítil framgongd við 4 stigum, og harvið ganga vit ímóti rákinum og minka um munin til grannalondini og OECD-miðal. Av londunum, sum vit plaga at samanbera okkum við, var tað bert Bretland, sum eisini hevði eina framgongd í náttúruvísindum (mynd 2.2).




*Mynd 2.2: Føroyar eru ikki longur niðast av Norðurlondum, og hóast Finnland enn er fremst av Norðurlondum, so er tað nú farið niður um Bretland. Føroyar og Bretland høvdu framgongd í náttúruvísindum í 2025, meðan eisini OECD-miðal lækkaði.*

Ofta verða PISA-úrslit viðgjørd sum ein heild, men handan PISA-miðaltølini eru aðrar søgur. Til ber at hyggja nærri at, hvussu úrslitini eru býtt millum næmingarnar og harvið kanna, um ávís viðurskifti eyðkenna ymiskar partar av úrslitabýtinum. Í talvu 2.1 verða úrslitini lýst við 10., 25., 50., 75. og 90. persentili. Persentilarnir vísa, hvussu úrslitini býta seg: 10. persentilur er tað stigavirðið, sum 10% av næmingunum liggja á ella niðanfyri, meðan 90% liggja omanfyri. 90. persentilur er hinvegin tað stigavirðið, sum 90% liggja á ella niðanfyri, og sostatt røkka 10% av næmingunum hesum stigavirði ella hægri. 50. persentilur er medianurin, har helvtin av næmingunum liggur hvørjumegin.

Úrslitini í talvu 2.1 vísa, at Føroyar eru tað landið, har munurin millum 10. og 90. persentil er minstur. Samstundis sæst, at munurin millum føroysku úrslitini og OECD-miðalúrslitini veksur, tess hægri komið verður í úrslitabýtinum. Við 10. persentil, har 10% av luttakarunum liggja á ella niðanfyri, er munurin millum Føroyar og OECD 12 PISA-stig. Við 90. persentil er munurin 45 PISA-stig. Hetta merkir, at føroysku úrslitini víkja lutfalsliga lítið frá OECD í lægra enda av úrslitabýtinum, meðan munurin er munandi størri millum teir næmingarnar, sum fáa hægstu úrslitini (mynd 2.3). At tað er lítil spjaðing í føroysku úrslitunum kann ljóða positivt, men tá vit samstundis hava eina vaksandi frástøðu frá OECD-úrslitunum, tess hægri vit koma í úrslitabýtinum, bendir hetta á, at Føroyum serliga vantar tey heilt høgu úrslitini. Júst hetta vísa greiningarnar av førleikastigunum eisini.

*Talva 2.1: Úrslitini í náttúruvísindum fyri Norðurlond, Bretland, Írland og OECD-miðal. Í fyrsta teigi eru miðaltølini fyri hvørt landið sær, og síðani eru úrslitini býtt upp í persentilar. Í síðsta teigi er munurin roknaður millum 90. persentil og 10. persentil. Føroyar hava lægsta munin, men eisini tann minsta hópin, sum er kannaður.*

| | | Persentilar | | | | | Munur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Miðal | 10'indi | 25'undi | Miðtal | 75'indi | 90'indi | 90'indi – 10'inda |
| Føroyar | 451 | 339 | 390 | 448 | 509 | 565 | 226 |
| Írland | 500 | 376 | 434 | 502 | 566 | 619 | 243 |
| Danmark | 478 | 351 | 410 | 480 | 546 | 600 | 249 |
| Ísland | 441 | 314 | 371 | 439 | 509 | 571 | 256 |
| OECD-miðal | 482 | 351 | 411 | 484 | 552 | 610 | 258 |
| Noreg* | 470 | 335 | 396 | 471 | 543 | 604 | 269 |
| Bretland | 511 | 374 | 438 | 512 | 585 | 646 | 273 |
| Finnland | 504 | 363 | 431 | 508 | 580 | 638 | 275 |
| Svøríki | 485 | 342 | 407 | 487 | 563 | 626 | 284 |




*Mynd 2.3: PISA-stig býtt upp í persentilar. Stabbarnir vísa miðal PISA-stig fyri hvønn persentil. Føroyar eru bláir stabbar, OECD reydligir. Gráa linjan er munur í PISA-stigum í mun til persentilar.*

## Førleikastig í PISA-kanningunum

Úrslitini í PISA eru útroknað stig á einum talstiga, sum er grundaður á eitt OECD-miðaltal. Fyri at útgreina nærri, hvat PISA-tølini meira ítøkiligt merkja, er talstigin býttur upp í 7 førleikastig, sum merkja, hvat slag av uppgávum næmingar á tí førleikastiganum eru førir fyri at fullføra. Tey sjey førleikastigini, sum verða nýtt innan náttúruvísindi í PISA 2025, eru tey somu, sum hava verið nýtt síðani 2015 (talva 2.2).

PISA-úrslitið er sostatt ikki bert eitt miðaltal, men tey verða eisini brúkt til at meta um, hvussu stórur partur av næmingunum helst ikki hevur nøktandi náttúruvísindaligt lesføri fyri at kunna luttaka í samfelagsligum viðurskiftum sum kritiskir og vitandi borgarar. Hesin bólkur verður mettur at vera tey, sum ikki hava rokkið førleikastigi 2. At vera á førleikastigi 2 krevur at hava fingið 410 PISA-stig ella fleiri. Tey, sum ikki røkka førleikastigi 2, verða viðhvørt søgd ikki at hava virkisført lesføri.

## Førleikastigini og skúlaskipanin

PISA-stigini í náttúruvísindum, lesing og støddfrøði eru sostatt meira enn eitt tól at samanbera næmingar og lond við. PISA-stigini eru bólkað í førleikastig fyri at kunna gera eina meting og lýsing av, hvat næmingar á ávísu stigunum megna. Í náttúruvísindum

kunnu næmingar á hægstu førleikastigunum byggja á náttúruvísindalig hugtøk við høgum kognitivum krøvum til at gera myndlar av samansettum fyribrigdum, meta um ymiskar sniðgevingar av náttúruvísindaligum kanningum og nýta framkomnar mannagongdir til faktakanning fyri kritiskt at meta um trúvirðið í náttúruvísindaligari kunning (talva 2.2).

*Talva 2.2: Førleikastigini í náttúruvísindum stutt lýst við førleikastigunum bólkaðum í tríggjar bólkar: Tey, sum skara framúr (stig 5 og 6), miðjan (stig 2, 3 og 4), og so tey, sum ikki hava nøktandi førleika (stig 1a og 1b). Føroyska miðalúrslitið er 451 stig, sum svarar til stig 2 (sum hýsir stigunum 410-483).*

<table>
<tr><th>Førleikastig</th><th>Niðara mark</th><th>Prosent av næmingunum á hesum samantalda stigi</th><th>Samandráttur</th><th>Lýsing</th></tr>
<tr><td>6</td><td>708</td><td rowspan="2">Føroyar 1,6%<br><br>OECD-miðal 7,2%</td><td rowspan="2">Næmingarnir vísa høgt førleikastig í øllum trimum førleikunum, sum kemur til sjóndar í, at teir duga at gera frágreiðingar, meta kritiskt um arbeiðshættir og próvtilfar, viðgera samansetta kunning og grundgeva fyri avgerðum í óvissum ella ókendum samanhangum.</td><td rowspan="2">Næmingar í hesum bólkinum kunnu nýta náttúruvísindaliga vitan, sum fevnir um ástøði, myndlar, samansettar dátur og fleiri kunningarkeldur. Teir kunnu gera og meta um frágreiðingar, gera forsagnir, eyðmerkja styrkir og avmarkingar hjá myndlum, meta um alternativar sniðgevingar av náttúruvísindaligum kanningum, tulka meira framkomnar dátuframsetingar, finna veikleikar í tulkingum, meta um trúvirðið hjá keldum og grundgeva fyri avgerðum við at byggja á náttúruvísindaliga innihaldsvitan, háttalagsvitan og ástøðisvitan, umframt at meta um sosial, siðalig og búskaparlig viðurskifti. Á stigi 6 kunnu teir gera hetta í ókendum samanhangum og harumframt meta um møguligar avleiðingar fyri samfelagið.</td></tr>
<tr><td>5</td><td>633</td></tr>
<tr><td>4</td><td>559</td><td rowspan="3">Føroyar 65,1%<br><br>OECD-miðal 67,1%</td><td rowspan="3">Næmingarnir kunnu nýta náttúruvísindi á ein praktiskan hátt, til dømis til at greiða frá gerandisligum fyribrigdum, lesa og tulka próvtilfar, meta um einføld uppáhald og keldur og taka grundleggjandi avgerðir við støði í viðkomandi og álítandi kunning og próvtilfari.</td><td rowspan="3">Næmingar í hesum bólkinum flyta seg frá grundleggjandi at kenna aftur til at nýta náttúruvísindaliga vitan og próvtilfar aktivt. Á stigi 2 kunnu teir skilja ímillum náttúruvísindaligar og ikki-náttúruvísindaligar frágreiðingar, geva einfaldar frágreiðingar av kendum fyribrigdum, tulka einfaldar dátur, eyðmerkja próvtilfar, sum stuðlar einum uppáhaldi, og nýta eitt einstakt metingarstøði til at meta um, um ein kelda er trúverdug. Á stigum 3 og 4 kunnu teir gera hetta í meira krevjandi uppgávum, har størri krøv verða sett til grundgevingar. Teir kunnu meta um frágreiðingar ella myndlar, tulka dátur í ritmyndum ella talvum, eyðmerkja veikleikar í tulkingum, grundgeva fyri einfaldari sniðgeving av náttúruvísindaligum kanningum, samanbera keldur og meta um, hvørt próvtilfarið stuðlar einum uppáhaldi.</td></tr>
<tr><td>3</td><td>484</td></tr>
<tr><td>2</td><td>410</td></tr>
<tr><td>1a</td><td>335</td><td rowspan="2">Føroyar 33,3%<br><br>OECD-miðal 25,7%</td><td rowspan="2">Næmingarnir kunnu ofta kenna aftur rætta náttúruvísindaliga hugtakið, tá tað er einfalt og kent, men teir megna ikki á álítandi hátt at nýta náttúruvísindi til at greiða frá fyribrigdum, meta um próvtilfar ella grundgeva fyri avgerðum.</td><td rowspan="2">Næmingar í hesum bólkinum kunnu handfara einfaldar, kendar náttúruvísindaligar støður úr gerandisdegnum, serliga tá uppgávan er ítøkilig og valmøguleikarnir eru avmarkaðir. Teir kunnu vera førir fyri at kenna aftur eina grundleggjandi náttúruvísindaliga frágreiðing, velja eina einfalda royndarsniðgeving, velja okkurt viðkomandi próvtilfar ella eyðmerkja eitt einstakt prógv, sum er neyðugt sum grundarlag undir einum átaki. Hugsanin hjá teimum er tó sum heild avmarkað til uppgávur við lágum kognitivum krøvum. Teir megna ikki støðugt og sjálvstøðugt at greiða frá fyribrigdum, tulka próvtilfar, meta um trúvirðið hjá keldum ella nýta náttúruvísindaliga vitan í einum breiðari samanhangi.</td></tr>
<tr><td>1b</td><td>261</td></tr>
</table>

Hóast framgongd í miðalstigum, so er bólkurin av teimum, sum eru undir stig 2, framvegis stórur. Í 2018 varð fegnast um, at hóast miðaltalið ikki var so høgt, so hava vit megnað at fáa „botnin við". Úrslitið í 2018, tá bert 20% vóru á stigi 1 (talva 2.3), tykist tó bert at hava verið ein løtumynd, tí í 2022 var støðan tann sama sum í 2015, við einum triðingi av næmingunum undir tí førleikastigi, sum verður mett at vera neyðugt fyri at vera ein virkin og tilvitaður samfelagsborgari. Í 2025 var eisini ein triðingur undir førleikastigi 2.

*Talva 2.3: Samanbering av úrslitum innan náttúruvísindi frá 2025 til 2015 skift á førleikastig 1, 2, 3 og 4 ella hægri.*

| Førleikastig í náttúruvísindum (% av føroysku næmingunum) | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stig 1a og lægri | | | | Stig 2 | | | | Stig 3 | | | | Stig 4 og hægri | | | |
| 2025 | 2022 | 2018 | 2015 | 2025 | 2022 | 2018 | 2015 | 2025 | 2022 | 2018 | 2015 | 2025 | 2022 | 2018 | 2015 |
| 33 | 33 | 20 | 33 | 33 | 37 | 41 | 36 | 23 | 23 | 29 | 23 | 11 | 8 | 10 | 8 |

Verður hugt at útgreinaðu tølunum í mun til førleikastig og samanborið við miðal fyri OECD-londini, so sæst, at í Føroyum eru eisini lutfalsliga nógv, sum einans røkka førleikastigi 2, samstundis sum bert 1% eru á teimum báðum hægstu stigunum í mun til 7% í OECD-miðal (talva 2.4).

Í talvu 2.4 sæst eisini, at í náttúruvísindum í 2025 hava 4% fleiri føroyskir næmingar nátt stigi 4 í mun til í 2022, samstundis sum tað eru 4% færri føroyskir næmingar á stigi 2. Eisini er ein flyting hend innan tey lægstu førleikastigini, har tað nú eru 3% fleiri á lægsta stigi. Framvegis er tað so, at so at siga eingin røkkur upp á førleikastig 6; onkur einstakur røkkur førleikastigi 5, og útvið helvtin færri enn fyri miðal-OECD røkkur førleikastigi 4.

*Talva 2.4: Førleikastig innan náttúruvísindi, Føroyar og OECD-miðal, 2012 til 2025.*

| | | **Førleikastig (% av næmingum)** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Minni enn 1a | 1a | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 |
| 2012 | OECD | 5 | 13 | 25 | 29 | 20 | 7 | 1 |
| | Føroyar | 11 | 24 | 30 | 26 | 8 | 1 | 0 |
| 2015 | OECD | 6 | 16 | 25 | 27 | 19 | 7 | 1 |
| | Føroyar | 8 | 25 | 36 | 23 | 7 | 1 | 0 |
| 2018 | OECD | 5 | 16 | 26 | 27 | 18 | 6 | 1 |
| | Føroyar | 3 | 18 | 41 | 29 | 9 | 1 | 0 |
| 2022 | OECD | 7 | 17 | 25 | 26 | 17 | 6 | 1 |
| | Føroyar | 6 | 27 | 37 | 23 | 6 | 1 | 0 |
| 2025 | OECD | 8 | 18 | 25 | 25 | 17 | 6 | 1 |
| | Føroyar | 9 | 24 | 33 | 23 | 10 | 1 | 0 |

Sum tað hevur verið øll árini, so eru Føroyar, í mun til miðal OECD-londini, eitt førleikastig lægri, tá talan er um hægru stigini, við tað, at 1% í OECD-londunum røkka stigi 6, meðan 1% í Føroyum røkka stigi 5.

*Mynd 2.4: Býtið av teimum 7 førleikastigunum hjá PISA innan náttúruvísindi, 2025. Vinstrumegin eru tey, sum eru á førleikastigi 1 og lægri, meðan til høgru eru tey, sum eru á førleikastigi 2 og hægri. Føroyar eru frámerktar við grønum kassa, meðan OECD-miðal er frámerkt við bláum kassa. Londini standa í raðfylgju eftir samantaldum prosenttali av næmingum, sum hava rokkið førleikastigi 2 ella hægri.* ⇨



Minni enn stig 1b
Stig 1b
Stig 1a
Stig 2
Stig 3
Stig 4
Stig 5
Stig 6
Næmingar á stigi 1a ella minni
Næmingar á førleikastigi 2 ella meira
Kina: B-S-J-Z
Kina: Makao
Singapor
Estland
Japan
Kina: Taipei
Korea
Kanada*
Bretland
Írland
Avstralia
Nýsæland*
Finnland
Turkaland
Litava
Póland
Sveis
Kina: Hong Kong
Eysturríki
Kekkia
Italia
USA*
Belgia
Ungarn
Slovenia
Spainia
Portugal
Danmark
Kroatia
Svøríki
OECD-MIÐAL
Frakland
Slovakia
Týskland
Niðurlond*
Lettland
Vjetnam
Noreg*
Luksemborg
Føroyar
Ukraina
Usbekistan
Sameindu Emirríkini
Uruguai
Malta
Kili
Ísland
Albania*
Brunei
Montenegro
Móritius
Ísrael
Grikkaland
Tailand
Katar
Serbia
Mongolia
Kosta Rika
Georgia
Rumenia
Moldova
Malaisia
Bulgaria
Kasakstan
Saudiarabia
Meksiko
Kolumbia
Jordan
Aserbadjan
Brasil
Peru
Argentina
Ekvador
Indonesia
Norðurmakedónia
El Salvador
Libanon
Kambodja
Filipsoyggjar
Armenia
Dominikalýðveldið
Sambia
Paraguai
Palestina
Kirgistan
Marokko
Kosovo
Guatemala
Kurdistan
Kenja
Ruanda
Dushanbe
%
100 90 80 70 60 50 40 30 20 10 0 10 20 30 40 50 60 70 80 90 100%




*Mynd 2.5: Norðurlond sett upp eftir sama leisti sum í mynd 2.3. Ísland liggur nú munandi lægri enn Føroyar. Eitt serligt eyðkenni fyri Føroyar er tann stóri parturin av næmingum á stigi 2 og somuleiðis á 1a.*

## Partsførleikar í náttúruvísindum

PISA-úrslitini geva okkum miðaltøl og førleikastig, men tá talan er um høvuðsfakøki, sum í 2025 var náttúruvísindi, verður eisini farið eitt stig longur, og partsførleikar verða greinaðir nærri. Hesir eru førleikarnir, sum síggjast í mynd 2.1. Her verður hvør av teimum trimum náttúruvísindaligu førleikunum stutt lýstur saman við grundgevingum fyri, hví teir verða mettir at vera grundleggjandi fyri alla náttúruvísindaundirvísing.

*Førleiki 1: Greiða frá fyribrigdum á náttúruvísindaligum grundarlagi*

Hesin førleikin snýr seg um at kunna nýta náttúruvísindaliga vitan til at greiða frá fyribrigdum í náttúruni, tøknini og umhvørvinum. Tað krevur ikki bara, at næmingurin kennir fakta, hugtøk og ástøði, men eisini at hann dugir at nýta hesa vitan í viðkomandi samanhangum.

Ein týðandi partur av førleikanum er at kunna flyta seg millum tað, sum kann eygleiðast, og tær frágreiðingar, myndlar og framsetingar, sum náttúruvísindini nýta til at lýsa fyribrigdið. Næmingurin skal til dømis kunna nýta hugtøk sum „atom“, „kyknur“, „orka“, „arvur“ og „tillaging“ til at greiða frá tí, sum hendir, hóast nógvar av hesum eindum og tilgongdum ikki kunnu eygleiðast beinleiðis.

Førleikin fevnir eisini um at gera forsagnir, meta um myndlar og teirra avmarkingar og nýta náttúruvísindaliga vitan til at skjóta upp loysnir. Frágreiðingar skulu vera í samsvari við próvtilfar og byggja á hóskandi ástøði og hugtøk. Tí krevur hesin førleikin bæði innihaldsvitan, háttalagsvitan og ástøðisvitan.

Í stuttum snýr førleiki 1 seg um, hvørt næmingurin dugir at fara frá náttúruvísindaligari vitan til eina væl grundaða frágreiðing um, hví eitt fyribrigdi hendir, hvussu tað hongur saman við øðrum fyribrigdum, og hvørjar avleiðingar tað kann hava.

*Førleiki 2: Meta um og leggja til rættis náttúruvísindaligar kanningar og tulka náttúruvísindaligar dátur og próvtilfar kritiskt*

Hesin førleikin snýr seg um at skilja, hvussu náttúruvísindalig vitan verður ment, og hvussu ein kann meta um, hvørt kanningar, dátur og niðurstøður eru álítandi. Næmingurin skal duga at skilja endamálið við ymiskum sløgum av náttúruvísindaligum kanningum, meta um kanningarsnið og arbeiðshættir, og skilja, hvussu broytilig viðurskifti, mátingar, sýnistøkur og óvissa ávirka úrslitini.

Ein týðandi partur av førleikanum er at kunna tulka náttúruvísindalig dáta og próvtilfar. Næmingurin skal kunna finna mynstur og samanhangir í dátum, lesa talvur og ritmyndir, kenna frávik og meta um, um niðurstøður eru væl grundaðar. Hetta krevur eisini fatan av, at allar mátingar hava eina ávísa óvissu, og at álitið á úrslit verður styrkt við eitt nú endurtiknum mátingum, størri sýnistøkum og hóskandi hagfrøðiligum arbeiðsháttum.

Førleikin fevnir eisini um at skilja munin millum hagfrøðiligan samanhang og orsakasamanhang, meta um alternativar frágreiðingar og síggja veikleikar í bæði kanningarsniði og tulking av dátum. Næmingurin skal sostatt ikki bara kunna lesa eitt úrslit, men eisini spyrja, hvussu tað er komið fram, hvussu álítandi tað er, og um próvtilfarið veruliga stuðlar niðurstøðuni.

Hesin førleikin byggir serliga á háttalagsvitan og

ástøðisvitan, men eisini á innihaldsvitan. Í stuttum snýr førleiki 2 seg um at fara frá dátum og kanningarhátti til eina kritiska meting av, hvat vit kunnu vita, og hvussu trygt vit kunnu vita tað.

*Førleiki 3: Kanna, meta um og nýta náttúruvísindaligar upplýsingar til støðutakan og handling*

Hesin førleikin snýr seg um at kunna finna náttúruvísindaliga kunning, meta kritiskt um hana og nýta hana sum grundarlag undir støðutakan og handling. Í einum samfelagi við stórari nøgd av kunning – og eisini misvísandi og skeivari kunning – er tað ikki nóg mikið at skilja náttúruvísindaliga innihaldið. Næmingurin skal eisini kunna meta um, hvørjar keldur eru viðkomandi og álítandi, og hvussu væl uppáhald eru grundað í próvtilfari.

Ein týðandi partur av førleikanum er at skilja, hvussu álítandi náttúruvísindalig vitan verður til og eftirkannað. Næmingurin skal millum annað kunna meta um fakliga serkunnleikan og trúvirðið hjá keldum, kenna týdningin av javnlíkameting og náttúruvísindaligari semju og vera varugur við áhugabindingar og aðrar orsakir til, at kunning kann verða skeiklað. Hetta krevur eisini fatan av, at náttúruvísindi eru eitt felags og kritiskt arbeiði, har nýggj vitan verður eftirkannað og kann broytast, tá ið nýtt próvtilfar kemur fram.

Førleikin fevnir harumframt um at kunna samanbera kunning og próvtilfar úr fleiri keldum, eyðmerkja veikleikar í próvførslu og skilja, at náttúruvísindalig vitan ofta er tengd at óvissu. Tá ið avgerðir skulu takast, skal næmingurin kunna meta um, hvat náttúruvísindaliga próvtilfarið vísir, samstundis sum hann skilir, at sosial, siðalig og búskaparlig atlit eisini kunnu hava týdning. Tað merkir, at náttúruvísindini kunnu vera avgerandi grundarlag undir einari avgerð uttan altíð einsamøll at avgera, hvør avgerðin eigur at vera.

Hesin førleikin byggir serliga á ástøðisvitan, men eisini á háttalagsvitan og innihaldsvitan. Í stuttum snýr førleiki 3 seg um at fara frá náttúruvísindaligari kunning og próvtilfari til eina kritiskt grundaða meting av, hvørjum vit kunnu hava álit á, og hvussu vitanin kann nýtast til støðutakan og handling.

## Partsførleikarnir og høvuðsúrslitini

Sostatt er ein greiður munur millum teir tríggjar førleikarnar: Førleiki 1 spyr í stóran mun *„Hvussu kann greiðast frá hesum fyribrigdinum?“*; førleiki 2 spyr *„Hvussu vita vit hetta, og heldur kanningin og próvtilfarið?“*, meðan førleiki 3 spyr *„Hvørjari kunning kunnu vit hava álit á, og hvussu kunnu vit nýta hana til støðutakan?“*.

Tá samanborið verður við kanningina í 2015 (talva 2.5), tá partsførleikarnir eisini vórðu kannaðir, sæst, at úrslitini líkjast nógv. Tó eru framstig hend innan tað at greiða frá fyribrigdum, meðan førleikin at kanna viðurskifti og tulka úrslitini er tann sami sum í 2015, og tann nýggi førleikin at brúka vitanina til støðutakan og handling er tann, ið føroyskir næmingar hava fæst stig í. Tó liggja øll úrslitini sera tætt.

*Talva 2.5: Høvuðsfakøkið og partsførleikarnir innan náttúruvísindi samanborin við úrslitini í 2015.*

| | PISA 2025 | PISA 2015 |
|---|---|---|
| Náttúruvísindi sum heild | 451 | 446 |
| Greiða frá fyribrigdum á náttúruvísindaligum grundarlagi | 448 | 437 |
| Meta um og leggja til rættis náttúruvísindaligar kanningar | 452 | 450 |
| Tulka náttúruvísindaligar dátur og próvtilfar kritiskt | | 452 |
| Kanna, meta um og nýta náttúruvísindaligar upplýsingar til støðutakan og handling | 444 | Var ikki við í 2015 |

## Kynsmunur í úrslitunum

Í 2025 var størri munur millum úrslitini hjá gentum og dreingjum, enn tað hevur verið leingi. Bert í 2009 var størri munur. Serliga eru tað føroysku genturnar, sum hava tikið seg fram – við 11 stigum frá 2022 –, meðan dreingirnir hava havt eina afturgongd upp á 3 stig (talva 2.6). Hetta hevur ført til, at vit nú hava ein kynsmun, har genturnar í miðal hava rokkið 10 stigum meira enn dreingirnir.

Munurin í PISA-stigum líkist tí, sum hann plagar at vera í støddfrøði, eisini í ár, tó við øvutum fortekni. Broytingin, sum er hend í náttúruvísindum í 2025, er, at genturnar nú eru farnar væl fram um dreingirnar. Møguliga hevur tað samband við, at tað er tætt samband millum úrslitini í náttúruvísindum og bæði støddfrøði og lesing (korrelatión ávikavist 0,82 og 0,80), og serliga í lesing síggja vit, at genturnar eru farnar sera langt fram um dreingirnar.

*Talva 2.6: Høvuðsfakøkið og partsførleikarnir býtt eftir ári og kyni.*

| | Miðal PISA-stig: Náttúruvísindi | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| 2006 | 417 | 418 | 415 | 3 |
| 2009 | 431 | 423 | 438 | -15 |
| 2012 | 442 | 439 | 446 | -7 |
| 2015 | 446 | 445 | 448 | -3 |
| 2018 | 465 | 464 | 465 | -1 |
| 2022 | 447 | 445 | 449 | -4 |
| 2025 | 451 | 456 | 446 | 10 |

## Gentur standa seg betur í at meta um og nýta náttúruvísindaliga kunning

Av teimum trimum undirøkjunum í náttúruvísindum sæst, at tað serliga er í nýggja førleikanum „at gagnnýta vitan við at megna at meta um vísindaliga kunning sum grundarlag til støðutakan og handling“, at genturnar skara framúr (talva 2.7).

Hesin nýggi náttúruvísindaligi førleikin í PISA snýr seg ikki fyrst og fremst um at minnast náttúruvísindaliga faktavitan, men um at finna, tulka og meta kritiskt um kunning og nýta hana sum grundarlag undir støðutakan. Næmingurin skal millum annað duga at meta um trúvirðið hjá keldum og serfrøðingum, skilja munin millum próvtilfar og uppáhald, kenna týdningin av náttúruvísindaligari semju og javnlíkameting og síggja veikleikar í prófførslu. Harumframt krevur førleikin, at næmingurin kann arbeiða við óvissu, samanbera ymisk sjónarmið og viga náttúruvísindaligt próvtilfar upp ímóti sosialum, siðaligum og búskaparligum atlitum.

At gentur standa seg munandi betur enn dreingir á hesum økinum kann tí vera áhugavert at síggja í ljósinum av, at uppgávurnar í stóran mun krevja lesing, tulking, keldukritikk, prófførslu og grundgeving, heldur enn bert náttúruvísindaliga innihaldsvitan. Førleikin liggur sostatt á markinum millum náttúruvísindaligt lesføri og breiðari førleikar at viðgera og meta um kunning. Ein møgulig frágreiðing kann tí vera, at hesin førleikin í størri mun krevur, at næmingarnir gagnnýta førleikar, sum eisini verða nýttir í lesing og tekstfatan.

*Talva 2.7: Høvuðsfakøkið og partsførleikarnir innan náttúruvísindi, býtt upp eftir kyni, lýst í miðal PISA-stigum. Síðsti teigurin er roknaður munur millum gentur og dreingir.*

| 2025 | Miðal PISA-stig: Náttúruvísindi | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| Náttúruvísindi | 451 | 456 | 446 | 10 |
| Brúka náttúruvísindaliga vitan at greiða frá fyribrigdum | 448 | 449 | 446 | 3 |
| Meta um náttúruvísindalig kanningarsnið og tulka dátur og próvtilfar kritiskt | 452 | 457 | 447 | 10 |
| Meta um vísindaliga kunning sum grundarlag undir støðutakan | 444 | 457 | 433 | 24 |

Í mynd 2.6 eru partsførleikarnir hvørt kynið sær vístir. Tað sæst, at genturnar eru serliga umboðaðar í hægru bólkunum og dreingirnir í lægru. Serliga innan bólkin at gagnnýta vísindaliga kunning til støðutakan og handling skara genturnar framúr í hægru bólkunum, samstundis sum dreingirnir í minni mun eru við her.




*Mynd 2.6: Prosenttøl grundað á tal av ávikavist gentum og dreingjum. Prosenttølini eru roknað fyri hvørt kynið sær. Bólkarnir eru gjørdir út frá úrslitunum fyri hvønn økisbólk. Náttúruvísindi er høvuðsbólkurin, meðan Fyribrigdi er undirbólkurin „Náttúruvísindaliga at greiða frá fyribrigdum"; Design er samansetti bólkurin „Meta um og leggja til rættis náttúruvísindaligar kanningar" og „Tulka vísindaligar dátur og próvførslur", og Støðutakan er nýggi bólkurin „Kanna, meta um og nýta vísindaliga kunning til støðutakan og handling". Hesir bólkarnir eru býttir javnt sundur, soleiðis at tað eru líka nógvir næmingar í hvørjum bólki.*

## Føroysku úrslitini í norðurlendskum samanhangi

Føroyar eru nú væl oman fyri Íslandi í náttúruvísindum, og munurin til hini Norðurlondini minkar alsamt. Í mun til kyn er ymiskt frá landi til land, hvussu stórur munurin innan høvuðsøkið er; í Íslandi og Danmark er munurin so at siga eingin, meðan hann er størstur í Finnlandi. Svøríki og Noreg liggja á sama stigi sum Føroyar.

*Talva 2.8: Úrslitini í høvuðsøkinum innan náttúruvísindi í Norðurlondum, býtt eftir gentum og dreingjum.*

| 2025 | Miðal PISA-stig: Náttúruvísindi | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| Føroyar | 451 | 456 | 446 | 10 |
| Ísland | 441 | 443 | 441 | 2 |
| Finnland | 504 | 516 | 493 | 23 |
| Noreg | 470 | 475 | 465 | 10 |
| Svøríki | 485 | 491 | 479 | 12 |
| Danmark | 478 | 477 | 478 | -1 |

Verður hugt eftir mununum í partsførleikunum innan kyn (talvurnar 2.9a, b og d), so sæst, at føroyski munurin lutvíst er komin av førleikanum at meta um kanningarsnið og tulka kritiskt (talva 2.9b), men serliga av nýggja førleikanum at nýta kunning til støðutakan og handling, har føroyski munurin millum kynini er heili 24 stig (talva 2.9d). Í øllum Norðurlondum tykjast genturnar at megna førleikan til støðutakan og handling betur enn dreingirnir, eisini í Danmark og Íslandi, sum í hinum partsførleikunum so at siga ongan mun hava millum kynini (talvurnar 2.9a og b). Hetta styrkir hugsanina um, at úrslitini í partsførleikanum at nýta kunning til støðutakan og handling eru tengd at tí greiða fyrimuni, sum gentur sambært PISA-kanningini hava í lesing, har teirra tekst- og kunningarviðgerð innan hendan førleikan er ein partur av frágreiðingini. Samstundis er hetta tann veikasti náttúruvísindaligi førleikin hjá føroyskum næmingum, og samsvarar tað tí helst eisini við, at lesing er tað veikasta fakøkið í PISA 2025.

*Talva 2.9 a, b, d: Tríbýtt talva við teimum trimum partsførleikunum, sum PISA kannar.*

| 2025 | Miðal PISA-stig: Brúka náttúruvísindaliga vitan at greiða frá fyribrigdum | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| Føroyar | 448 | 449 | 446 | 3 |
| Ísland | 437 | 438 | 437 | 1 |
| Finnland | 507 | 518 | 496 | 22 |
| Noreg | 473 | 477 | 469 | 8 |
| Svøríki | 485 | 491 | 479 | 12 |
| Danmark | 479 | 476 | 482 | -6 |

*Talva 2.9a*

| 2025 | Miðal PISA-stig: Meta um náttúruvísindalig kanningarsnið og tulka náttúruvísindaligar dátur og próvtilfar kritiskt | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| Føroyar | 452 | 457 | 447 | 10 |
| Ísland | 446 | 446 | 446 | 0 |
| Finnland | 500 | 509 | 491 | 18 |
| Noreg | 470 | 473 | 466 | 7 |
| Svøríki | 482 | 487 | 477 | 10 |
| Danmark | 476 | 476 | 476 | 0 |

*Talva 2.9b*

| 2025 | Miðal PISA-stig: Meta um náttúruvísindaliga kunning at taka støðu útfrá | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| Føroyar | 444 | 457 | 433 | 24 |
| Ísland | 425 | 430 | 422 | 8 |
| Finnland | 507 | 524 | 490 | 34 |
| Noreg | 464 | 475 | 453 | 22 |
| Svøríki | 488 | 498 | 479 | 19 |
| Danmark | 470 | 475 | 465 | 10 |

*Talva 2.9d*

## Skúlabólkar og vísitøl

PISA-úrslitini vísa miðalúrslitið fyri landið sum heild, men aftan fyri miðaltalið er stórur munur bæði millum næmingar og millum skúlar. Til ber at kanna, hvørja fatan næmingar við góðum úrslitum hava um, hvat hendir í undirvísingini, men júst tí variatiónin í næmingaúrtøkuni er so stór (sí mynd 6.1), er torført við støði í tí at fáa ábendingar um, hvat skal til fyri at betra um úrtøkuna hjá næmingunum í skúlahøpi.

Næmingarnir hava eisini svarað einum bakgrundsspurnablaði, sum fevnir um nógv ymisk viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri skúlagongd og læring. Her verður millum annað hugt at trivnaði og arbeiðsumhvørvinum í flokkinum, stuðli frá læraranum og undirvísingarhættum í náttúruvísindum. Eisini verður hugt at, hvussu nógv næmingarnir arbeiða við náttúruvísindaligum kanningum, dátum og próvtilfari, teirra fatan av náttúruvísindaligum arbeiðsháttum, læriháttum, hugburði og lyndi og nýtslu av vitlíki. Sostatt kunnu føroysku úrslitini samanberast við miðalúrslitini í hinum Norðurlondum innan fleiri øki.

Í eini roynd at fáa eina betri fatan av, hvørji viðurskifti kunnu eyðkenna skúlar við ymiskum PISA-úrslitum, eru føroysku skúlarnir býttir í fýra bólkar eftir miðalúrslitinum hjá næmingunum í náttúruvísindum, og hesir skúlabólkar eru brúktir at kanna, um munir eisini síggjast aftur í svarunum, sum næmingarnir hava givið í bakgrundsspurnablaðnum.

Endamálið er ikki at finna eina einstaka frágreiðing upp á, hví summir skúlar hava hægri PISA-úrslit enn aðrir. Heldur er endamálið at kanna, um ávís mynstur ganga aftur, og um tað eru viðurskifti, sum tykjast eyðkenna skúlar við ávikavist lægri og hægri úrslitum. Um eingin greiður munur er millum skúlabólkarnar kann eisini vera viðkomandi.

Tað er samstundis umráðandi at hava í huga, at talan er um samanhangir og ikki prógv um orsøk og avleiðing. Um næmingar í skúlunum við hægri PISA-úrslitum til dømis oftari siga seg arbeiða á ein ávísan hátt í náttúruvísindum, vísir tað ein samanhang millum hesi viðurskifti, men tað sigur ikki í sjálvum sær, at undirvísingarhátturin er orsøkin til hægru úrslitini. Aðrir munir millum næmingar og skúlar kunnu eisini hava týdning.

Hóast tølini vísa, at stórur munur er á, hvussu væl ymisku næmingarnir hava staðið seg, so er tað eisini so, at munur er á skúlunum. PISA-tølini eru miðaltøl fyri alt landið, og nakrir næmingar hava fingið munandi færri stig enn miðal fyri alt landið. Vit skulu tó ikki gloyma, at tað eisini eru nógvir næmingar, sum hava fingið munandi hægri úrtøku enn miðal; onkur er mettur til 670 stig, sum jú er munandi hægri enn tey 451 stigini, sum føroyskir næmingar hava fingið í miðal í náttúruvísindum. Tá hugt verður eftir øllum Norðurlondum, er spennið munandi størri enn í Føroyum, og tann besti norðurlendski næmingurin er mettur til 801 stig.

Við tí endamáli at greina eitt sindur nærri, hvat kann eyðkenna teir skúlar, har næmingarnir í miðal fáa hægri úrtøku, eru føroysku skúlarnir bólkaðir í 4 bólkar, við 5 skúlum í hvørjum bólki, har skúlarnir eru raðfestir eftir úrtøku. Bólkur 1 er settur saman við teimum fimm skúlunum við lægst miðalúrsliti, og í bólki 4 eru teir fimm skúlarnir við hægst miðalúrsliti. Næmingatalið í hvørjum bólki er ikki heilt eins (talva 2.10). Um vektaðu næmingatølini vórðu býtt í fýra javnstórar bólkar, skuldu 175 næmingar verið í hvørjum bólki. Onkur bólkur hevur 35 næmingar færri og onkur 45 fleiri. Bólkurin við hægst úrslitum hevur eisini flestar næmingar.

*Talva 2.10: Vektað næmingatøl og vektað PISA-stig býtt upp í skúlabólkar.*

| Skúlabólkur | Lægst | Mið-lágt | Mið-høgt | Hægst |
|---|---|---|---|---|
| Vektað næmingatal | 138 | 201 | 142 | 220 |
| Samanteljingar, næmingar | 339 | | 362 | |
| Vektað PISA-stig | 415 | 446 | 456 | 476 |

Tá miðaltølini verða mett, verður eisini hugt at, hvussu tey eru tengd at øðrum viðurskiftum so sum trivnaði, atferðarmynstri í flokkinum, hvussu lærarin stuðlar næminginum, sannføring um náttúruvísindaástøði, og sum nakað nýtt í ár, eisini um hvussu næmingarnir gagnnýta vitlíki í skúlanum.

OECD hevur roknað nøkur vísitøl ella indekstøl, sum eru roknað við WLE-háttinum (Weighted Likelihood Estimate), har svarini til fleiri spurningar verða sett saman til eitt felags mát fyri tað fyribrigdið, sum spurningarnir snúgva seg um.

Tað sæst, at flestu av hesum vísitølum eru tengd at úrtøkuni í PISA-stigum, tá kannað verður næming fyri næming (talva 2.11). Tey vísitøl, sum telja mest í føroyska hópinum, eru umhvørvismedvit og fatanin hjá næmingunum um eyðkennini hjá náttúruvísindum. Hesi eru eisini ovast í Norðurlondum, men serliga umhvørvistilvitið tykist at hava stóran týdning fyri úrtøkuna hjá føroyskum næmingum í náttúruvísindum. Eisini áhugi og forvitni hava stóran týdning. Tó sæst, at forvitnið hjá føroyskum næmingum hevur minni týdning fyri úrtøkuna enn í hinum Norðurlondunum. Tilknýtið millum áhaldni hjá næmingunum og teirra gleði við at loysa trupulleikar eru øll minni tengd at úrtøkuni í náttúruvísindum í Føroyum enn í hinum Norðurlondunum, serliga innan trupulleikaloysn.

Í tí neiliga partinum síggja vit ikki óvæntað, at happing hevur ávirkan á PISA-úrtøkuna, men vit síggja eisini, at hetta tykist hava størri knýti til úrtøkuna í Føroyum enn í Norðurlondum sum heild. Vitlíkisnýtsla í skúlanum tykist eisini hava neiliga ávirkan á úrtøkuna.

Stabbarnir í mynd 2.7 vísa tey fýra vísitølini við bestu korrelatiónini til PISA-úrslitini (umhvørvismedvit, náttúruvísindaástøði, áhugi & gleði og forvitni), umframt tveir bólkar, sum eru atknýttir skúlabólki: Arbeiðsfriður og kognitiv avbjóðing. Myndin vísir, at bæði umhvørvismedvit og fatan av náttúruvísindaástøði eru minst í skúlunum við lægst miðal PISA-úrtøku, og áhugi, gleði og forvitni eru positiv í teimum báðum skúlabólkunum við hægstu miðalúrtøkuni. Arbeiðsfriður og kognitivar avbjóðingar eru lægst í lægsta bólkinum, men eru rættiliga broytiligar í hinum trimum bólkunum.

Serliga umhvørvismedvit hevur stór negativ virðir, og sum sæst í mynd 5.4, liggja Føroyar sera lágt á hesum vísa, ikki bara tá samanborið verður við Norðurlond, men eisini tá samanborið verður við størsta partin av luttakandi londunum.

*Talva 2.11: Korrelatiónir við miðal PISA-stig og OECD-vísitøl, býtt á norðurlendsk tøl og føroysk tøl. Talvan er skipað eftir føroysku tølunum við hægstu korrelatión. Allar korrelatiónir eru hagfrøðiliga signifikantar; Norðurlond øll við sannlíkindum undir 0,001, men í føroysku tølunum eru tó í tveimum førum sannlíkindi millum 0,005 og 0,01.*

| Korrelatiónir við miðal PISA-stig og vísitølini niðanfyri | Norðurlond | Føroyar |
|---|---|---|
| Umhvørvismedvitið hjá næmingunum | 0,394 | 0,482 |
| Næmingafatan av náttúruvísindaástøði (*nature of science*) | 0,444 | 0,429 |
| Áhugi og gleði hjá næmingum fyri náttúruvísindum | 0,312 | 0,376 |
| Forvitni hjá næmingunum | 0,319 | 0,191 |
| Áhaldni hjá næmingunum | 0,249 | 0,187 |
| Gleði av at loysa trupulleikar | 0,268 | 0,165 |
| Faklig og kognitiv avbjóðing í náttúruvísindaundirvísingini | 0,133 | 0,161 |
| Stuðul frá lærara í náttúruvísindaundirvísingini | 0,132 | 0,092 |
| At seta sær mál (p = 0,062) | 0,127 | 0,087 |
| Arbeiðsfriður í náttúruvísindaundirvísingini (p = 0,096) | 0,075 | 0,064 |
| Næmingar siga frá um happing | -0,059 | -0,106 |
| Nýtslan hjá næmingunum av vitlíki í skúlanum | -0,111 | -0,122 |




*Mynd 2.7: Vísitøl og skúlabólkar (bólkaðir eftir miðal PISA-úrtøku). Stabbarnir vísa tey fýra vísitølini við bestu korrelatiónini til PISA-úrslitini (umhvørvistilvit, náttúruvísindaástøði, áhugi & gleði og forvitni), umframt tveir bólkar, sum eru atknýttir skúlabólki: Arbeiðsfriður og kognitiv avbjóðing.*

Í brotunum niðanfyri verða nakrir av spurningunum, sum hoyra til hesi vísitøl, greinaðir í mun til skúlabólk. Nakrir av spurningingunum verða nevndir. Ofta verða føroysk miðaltøl samanborin við norðurlendsk miðaltøl; tó verða ikki allar dátur vístar her.

## Trivnaður

OECD hevur sett eitt vísital, sum tey kalla „kenslan av at hoyra til". Í føroysku tølunum er hetta vísitalið ikki beinleiðis tengt at nemingaúrslitunum. Tó eru nakrir av spurningunum, sum hoyra til hendan bólkin, kortini tengdir at skúlabólki. Eisini er gjørt eitt vísital um happing, sum hevur ávíst og neiligt atknýti til næmingaúrtøkuna.

Yvirskipað siga úrslitini, at í skúlunum, har næmingarnir klára seg væl, eru fleiri, sum kenna seg væl millum hinar næmingarnar, eins og tað eru færri, sum kenna seg happaðar. Eisini eru ábendingar um, at í skúlunum við lægstu miðaltølunum eru lutfalsliga fleiri næmingar, sum kenna seg happaðar regluliga.

## Atburðarmynstur í flokkinum

Tá næmingarnir svaraðu spurningunum um undirvísingina, vórðu teir fyrst bidnir um at velja eina náttúruvísindaliga lærugrein, sum teir savnaðu seg um. Sostatt eru hesi tøl ikki umboðandi fyri alla undirvísingina, men nøkulunda umboðandi náttúruvísindaligu undirvísingartímarnar. Bert ein av spurningunum, sum hoyra til hendan bólkin, er tengdur at skúlabólkunum, og tað bendir á, at svarini til hesar spurningarnar eru umboðandi allar skúlar, uttan mun til hvussu teir standa seg í PISA-kanningini.

Sambært næmingunum er støðan tann, at „í flestu tímunum" ella „í øllum tímunum" lurta næmingarnir ikki eftir, hvat lærarin sigur (40%), tað er ófriður og óskil (36%), lærarin má bíða leingi (30%), næmingarnir arbeiða ikki væl (18%), næmingarnir byrja seint at arbeiða (29%), og talgild amboð órógva næmingarnar (21%). Tá hesi tøl verða samanborin við tølini úr hinum Norðurlondunum (talva 2.12) má sigast, at í stóran mun eru hetta rættiliga høg tøl; í flestu førum munandi hægri enn í hinum Norðurlondunum, og tey benda á, at nógv spilltíð er í tímunum. Tó tykist, sum vit í Føroyum hava hampuliga gott tamarhald á talgildu amboðunum.

Ein spurningur, sum er atknýttur skúlabólki, er útsøgnin um, at næmingarnir byrja at arbeiða langt eftir, at tímin er byrjaður. Tann stóri munurin her er tó ikki millum tann hægsta og lægsta bólkin, men millum lægsta og næstlægsta bólkin, har vit síggja, at í tí lægsta bólkinum siga 16% av næmingunum, at hetta hendir hvønn tíma, meðan í tí næstlægsta siga bert 4% tað sama. Somu bólkar siga í ávikavist 25% og 37% av svarunum, at hetta hendir ongantíð ella næstan ongantíð.

*Talva 2.12: Útsagnir um arbeiðsfriðin í flokshølinum við samanløgdum prosenttølum fyri svarini „hvønn tíma" og „teir flestu tímarnar" býtt upp á Norðurlond.*

| Norðurlond: Samanteljingar av „hvønn tíma" og „teir flestu tímarnar" | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Næmingarnir lurta ikki eftir, hvat lærarin sigur | 40% | 23% | 24% | 21% | 29% | 31% |
| Tað er ófriður og óskil | 36% | 28% | 31% | 27% | 29% | 31% |
| Lærarin má bíða leingi eftir, at næmingarnir gerast friðarligir | 29% | 22% | 23% | 22% | 25% | 20% |
| Næmingarnir fáa ikki arbeitt væl | 18% | 17% | 18% | 19% | 20% | 20% |
| Næmingarnir byrja ikki at arbeiða fyrr enn langt eftir, at tímin er byrjaður | 29% | 17% | 18% | 19% | 20% | 20% |
| Næmingarnir verða órógvaðir, tí teir brúka talgild amboð (t.d. snildfonir, heimasíður og appir) | 21% | 24% | 26% | 31% | 33% | 36% |

## Lærarin í náttúruvísindafakum

Nógvir av spurningunum, sum næmingarnir svara, eru um læraran og hvussu hann stuðlar næminginum í hansara læring. Tveir spurningar eru rættiliga ítøkiligir, serliga úr sjónarhorninum hjá næmingunum, nevniliga at tey fáa at vita frá lærarunum, á hvørjum øki tey fáa gjørt tað betur, og hvussu tey kunnu betra um avrikini. Tað er eitt sindur skiftandi, hvussu svarini eru innan ymsu skúlabólkarnar, men tá føroysku miðaltølini fyri landið verða samanborin við miðal fyri hini Norðurlondini, sæst, at føroysku næmingarnir halda í størri mun enn norðurlendskir, at tey ikki fáa hesa kunning í sama mun sum næmingarnir í hinum Norðurlondunum (talva 2.13).

Við tað at svarmøguleikarnir ikki eru lýstir heilt neyvt, men næmingarnir tí skulu gera eina meting av, hvat „nakrir tímar" og „nógvir undirvísingartímar" merkja, hava vit í greiningunum niðanfyri brúkt valmøguleikan „Ongantíð ella næstan ongantíð" at samanbera millum skúlabólkar og miðal fyri Føroyar og Norðurlond.

*Talva 2.13: Prosenttøl fyri hvussu ofta næmingarnir siga seg fáa at vita frá lærarunum, hvussu teir kunnu bøta um sínar førleikar. Svarini vísa svarmøguleikan „Ongantíð ella næstan ongantíð".*

| | Miðal, Føroyar | Miðal, Norðurlond |
|---|---|---|
| Lærarin sigur mær, á hvørjum øki eg fái gjørt tað betur | 33% | 28% |
| Lærarin greiðir mær frá, hvussu eg kann betra um avrikini | 31% | 27% |

## Fjølbroytt undirvísing

Tað er lærarin, sum fyriskipar undirvísingina, og tí verður spurt um, hvørja undirvísing næmingarnir uppliva í náttúruvísindum. Næmingarnir verða spurdir um, hvussu ofta lærarin í hesum skúlaárinum hevur biðið næmingarnar um at gera ávísar gerðir í undirvísingartímunum í náttúruvísindaligu lærugreinini, sum næmingurin hevur valt at svara útfrá.

Í talvunum 2.14 og 2.15 sæst, at í skúlunum, sum rukku lægst miðal í PISA-stigum, svara næmingarnir sum heild munandi oftari, at nevndu undirvísingarhættir ongantíð verða brúktir. Eisini sæst, at sum heild kenna føroyskir næmingar minni til slíkar uppgávur enn teirra javnlíkar í hinum Norðurlondunum.

*Talva 2.14: Svarmøguleikarnir vóru „Ongantíð ella næstan ongantíð", „Í minni enn helvtini av tímunum", „Í umleið helvtini av tímunum", „Í meira enn helvtini av tímunum" og „Í hvørjum ella næstan hvørjum tíma". Her eru bert víst prosentini fyri tey, sum hava svarað „Ongantíð ella næstan ongantíð".*

| | Skúlabólkur | | | | Miðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Lægst | Lágt | Høgt | Hægst | Føroyar | Norðurlond |
| Lærarin bað okkum skifta orð okkara millum um, hvat vit lærdu | 62% | 44% | 39% | 46% | 47% | 20% |
| Lærarin bað okkum skifta orð um náttúruvísindalig evni við onnur í flokkinum | 51% | 35% | 37% | 33% | 38% | 34% |
| Lærarin bað okkum greiða flokkinum frá eini náttúruvísindaligari meginreglu | 52% | 34% | 35% | 38% | 39% | 33% |
| Lærarin bað okkum arbeiða við eini floksverkætlan í smáum bólkum | 28% | 16% | 10% | 17% | 17% | 15% |
| Lærarin bað okkum hugsa um, hvussu nýggj og gomul náttúruvísindalig evni hanga saman | 46% | 43% | 41% | 42% | 43% | 32% |
| Lærarin bað okkum blíva við at royna, sjálvt tá vit møta trupulleikum í eini náttúruvísindaligari uppgávu | 19% | 14% | 9% | 15% | 14% | 13% |
| Lærarin lærdi okkum at minnast náttúruvísindalig fakta uttanat | 30% | 20% | 22% | 21% | 23% | 16% |
| Lærarin bað okkum greiða frá eini náttúruvísindaligari meginreglu | 32% | 20% | 19% | 26% | 24% | 17% |
| Lærarin bað okkum greiða frá, hvussu vit høvdu sett eina roynd saman til at loysa ein náttúruvísindaligan trupulleika | 38% | 26% | 22% | 25% | 27% | 20% |

Í talvu 2.15 verður hugt at næmingasvarunum í mun til ítøkiligar royndir og greiningar. Vístu tølini eru tey, sum hava valt „ongantíð ella næstan ongantíð". Hetta var í flestu førum tann størsti parturin av svarunum. Her sæst, at næmingarnir á skúlunum við lægstu miðalúrslitunum ofta tykjast halda, at hesar venjingar, royndir og greiningar í størri mun ikki verða framdar samanborið við næmingarnir á skúlunum við hægstu miðaltølunum. Tá føroysku úrslitini verða samanborin við tey norðurlendsku sæst, at føroysku tølini eru rættiliga nógv hægri enn tey í grannalondunum, og merkir hetta, at næmingarnir í okkara grannalondum í størri mun arbeiða virkið við náttúruvísindaligum venjingum og greiningum.

*Talva 2.15: Svarmøguleikarnir vóru „Ongantíð ella næstan ongantíð", „Í minni enn helvtini av tímunum", „Í umleið helvtini av tímunum", „Í meira enn helvtini av tímunum" og „Í hvørjum ella næstan hvørjum tíma". Her eru bert víst prosentini fyri tey, sum hava svarað „Ongantíð ella næstan ongantíð".*

| Prosenttølini eru tey næmingasvarini, sum valdu „ongantíð ella næstan ongantíð" | Skúlabólkur | | | | Miðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Lægst | Lágt | Høgt | Hægst | Føroyar | Norðurlond |
| Næmingar gera modell ella simuleringar fyri at greiða frá náttúru-fyribrigdum, t.d. jarðskjálvta | 70% | 59% | 56% | 59% | 61% | 49% |
| Næmingar gera eina roynd fyri at kanna ein náttúruvísindaligan spurning | 37% | 17% | 13% | 21% | 21% | 23% |
| Næmingar greina og tulka dátur | 40% | 39% | 49% | 28% | 36% | 20% |
| Næmingar gera frágreiðingar um fyribrigdi (t.d. veður-lagsbroytingar), grundað á náttúruvísindalig prógv ella modell | 44% | 39% | 42% | 37% | 40% | 25% |
| Næmingar menna náttúruvísindaligar grundgevingar við at nýta prógv til at stuðla einum pástandi | 50% | 33% | 38% | 34% | 38% | 27% |
| Næmingar meta kritiskt um, hvussu álítandi og rættar upplýsingar á internetinum eru | 49% | 34% | 40% | 32% | 38% | 24% |

## Náttúruvísindaástøði *(en. nature of science)*

Hetta er eitt í føroyskum høpi rættiliga nýtt hugtak, tó tað er við at koma inn í skúlarnar, m.a. ígjøgnum nýggju lærubókaskipanina *Gaia*. Sum heild hava skúlarnir við lægst úrtøku eisini lægst lutfall av næmingum, sum eru samdir í útsøgnunum innan náttúruvísindaástøði (talva 2.16). Á summum

økjum líkjast føroysku svarini teimum úr hinum Norðurlondunum, men serliga síðsti spurningurin í talvu 2.16 vísir, at føroyskir næmingar í stóran mun taka undir við, at spurnartekin verður sett við vísindaligu háttaløgini.

*Talva 2.16: Spurningar innan náttúruvísindaástøði. Prosenttølini eru samanteljingar av teimum, sum eru „Sera samd" ella „Samd".*

| | Skúlabólkur | | | | Miðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Lægst | Mið-lágt | Mið-høgt | Hægst | Føroyar | Norðurlond |
| Góð svar taka støði í prógvum frá nógvum ymiskum royndum | 80% | 82% | 86% | 90% | 85% | 83% |
| Ein týdningarmikil partur av náttúruvísindum er at gera royndir fyri at fáa fatan av, hvussu tingini virka | 84% | 91% | 93% | 91% | 90% | 83% |
| Upplýsingar úr einari keldu skulu samanberast við eina røð av øðrum keldum, áðrenn tær verða góðtiknar | 67% | 80% | 76% | 74% | 75% | 82% |
| Tað eru nakrir spurningar, sum vísindafólk ikki fáa svarað uppá | 82% | 89% | 92% | 86% | 87% | 83% |
| Nýggjar uppdagingar kunnu broyta, hvat vísindafólk halda vera satt | 80% | 91% | 90% | 90% | 88% | 85% |
| Vit eiga at byggja meira á sunna fornuft og minni á vísindaligar kanningar | 64% | 65% | 62% | 47% | 59% | 40% |

Tað sæst eisini, at næmingarnir á skúlunum við hægst miðaltølum eru teir, sum í størstan mun hildu seg megna at greiða frá umhvørvisspurningum – sí kap. 5, talvu 5.2.

## Vitlíki til skúlaarbeiði

PISA 2025 fór fram á vári 2025 og síðani tá er hent nógv á økinum, serliga í førleikanum hjá kjattbottunum at skriva føroyskt. Tí eru væntandi nógv fleiri næmingar longu nú, sum gagnnýta vitlíki, enn tað vóru á vári 2025.

Føroysku tølini vísa ikki nakað einvíst mynstur í mun til skúlabólk, tó at tað er eitt ávíst neiligt samband millum vitlíkisvísan og miðal PISA-stigini. Tá samanborið verður við Norðurlond var vitlíki [í 2025] brúkt minni í Føroyum, men her er vert at hava í huga, at tað er rættiliga stutt síðani, at føroyskt sum mál kundi brúkast í kjattbottunum, og tí eru føroyingar helst komnir seinni í gongd við at brúka vitlíki.

## Hugburður og lyndi

Ein bólkur av spurningum er um, hvussu næmingarnir meta um sítt egna lyndi. Hesir spurningarnir snúgva seg nógv um áhaldni og treysti, og hetta eru fyribrigdi, sum nógvar kanningar vísa á eru týdningarmiklir partar av úrtøkuni í skúlanum. Spurningarnir, sum næmingarnir skulu taka støðu til, eru slíkir sum „Eg eri forvitin um mangt ymiskt" (76% samd), „Mær dámar at vita, hvusu tingini virka" (75% samd), „Mær dámar fløktar spurningar betur enn einfaldar spurningar" (39% samd) og „Eg geri tað liðugt, eg eri byrjað/ur uppá" (58% samd). Tá føroysku úrslitini verða samanborin við tey norðurlendsku sæst, at sum heild er lítil munur á svarunum, og tað er als einki, sum bendir á, at hugburðurin og lyndið hjá føroysku næmingunum er aftan fyri tann hjá teimum í øðrum londum.

## Læruhættir

PISA spyr eisini næmingarnar um teirra læruhættir. Tey kunna næmingarnar um, at tey vilja fegin hava meira at vita um, hvussu næmingarnir læra um nýtt tilfar í skúlanum, og vísa á ein lista við ymsum læruháttum. Tey verða síðani biðin um at viðmerkja, hvussu ofta tey brúka ymsu læruhættirnar.

Í svarunum í talvu 2.17a og 2.17b síggja vit, at 3 av 4 næmingum ikki arbeiða eftir einari ætlan, tá teir gera skúlaarbeiði, eins og teir flestu ikki arbeiða skipað við at eftirmeta sína vitan. Tá samanborið verður við hini Norðurlondini sæst, at næmingarnir har arbeiða munandi meira skipað.

Tá tað snýr seg um at biðja um hjálp, líkjast tølini rættiliga nógv tølunum úr hinum Norðurlondunum. Einasti veruligi munurin er, at føroyskir næmingar tykjast spyrja skjótari (fyrr) enn aðrir, við tað at 11%-stig færri føroyskir næmingar siga, at teir bíða við at biðja um hjálp, til teir hava roynt sjálvir.

*Talva 2.17a: Prosentpartur av teimum, sum hava svarað „Ofta“ ella „Sera ofta“ til spurningar um teirra arbeiðslag, tá tey skulu læra.*

| | **Miðal, Føroyar** | **Miðal, Norðurlond** |
|---|---|---|
| Eg leggi eina ætlan, tá ið eg geri skúlaarbeiði | 27% | 39% |
| Fyri at leggja merki til hol í míni vitan, geri eg ein samandrátt av tí týdningarmesta uttan at brúka noturnar hjá mær | 18% | 34% |
| Eg spyrji meg sjálva/n spurningar um innihaldið fyri at kanna, um eg havi skilt alt | 35% | 48% |
| Um eg varnist, at mín læriháttur ikki riggar, so broyti eg hann | 33% | 47% |

*Talva 2.17b: Prosentpartur av teimum, sum hava svarað „Samd/ur“ ella „Sera samd/ur“ til spurningar um teirra arbeiðslag, tá tey skulu læra.*

| **Prosentpartur av teimum, sum hava svarað „Samd/ur“ ella „Sera samd/ur“** | **Miðal, Føroyar** | **Miðal, Norðurlond** |
|---|---|---|
| Tá ið eg ikki skilji nakað til fulnar, spyrji eg mínar floksfelagar | 77% | 83% |
| Eg biði lærararnar um hjálp, tá eg havi tørv á tí | 80% | 82% |
| Tá ið eg havi ringt við at læra okkurt, biði eg um hjálp | 78% | 79% |
| Eg biði bara um hjálp, tá ið eg longu havi roynt væl og virðiliga at finna loysnina sjálv/ur | 66% | 77% |

## Samanumtøka

Greiningin av bakgrundsspurningunum gevur ikki eina einfalda frágreiðing upp á munin millum skúlarnar. Á fleiri økjum er eingin greiður samanhangur millum svarini hjá næmingunum og miðalúrslitið hjá skúlabólkinum. Hetta er millum annað galdandi fyri stórar partar av spurningunum um trivnað og arbeiðsumhvørvið í flokkinum. Heldur ikki spurningarnir um hugburð og lyndi vísa mun millum skúlabólkarnar, og samanborið við hini Norðurlondini er lítið, sum bendir á, at føroyskir næmingar sum heild eru minni forvitnir, áhaldandi ella sinnaðir at arbeiða við avbjóðandi uppgávum.

Greiðari munir síggjast hinvegin í pørtum av sjálvari náttúruvísindaundirvísingini. Í skúlunum við lægstu PISA-úrslitunum siga næmingarnir oftari, at ávísir undirvísingar- og arbeiðshættir ongantíð verða nýttir. Hetta sæst serliga í uppgávum, har næmingarnir skulu arbeiða virkið við náttúruvísindum: gera royndir, greina og tulka dátur, byggja frágreiðingar á náttúruvísindaligt próvtilfar, grundgeva við prógvum og meta kritiskt um upplýsingar. Somuleiðis eru ábendingar um, at næmingarnir í skúlunum við hægri úrslitum í størri mun hava eina fatan av teimum arbeiðshættum og meginreglum, sum náttúruvísindalig vitan byggir á.

Hetta er serliga áhugavert í ljósinum av náttúruvísindaliga hugtakskarminum hjá PISA 2025. PISA metir ikki bara, um næmingarnir hava náttúruvísindaliga innihaldsvitan, men eisini um teir duga at nýta vitanina, arbeiða við kanningum og próvtilfari, tulka dátur og meta kritiskt um náttúruvísindaliga kunning. Tí eru fleiri av teimum arbeiðshættunum, sum tykjast vera minni vanligir í skúlunum við lægri úrslitum, samstundis arbeiðshættir, sum eru tætt knýttir at teimum førleikum, ið PISA-royndin mátar.

Samanberingin við hini Norðurlondini gevur eisini orsøk til at steðga á. Føroyskir næmingar siga á fleiri økjum frá minni fjølbroyttari og minni virknari náttúruvísindaundirvísing. Til dømis siga teir oftari, at teir ikki arbeiða við dátugreining, próvgrundaðum frágreiðingum og grundgevingum ella kritiskari meting av upplýsingum á internetinum. Eisini siga føroyskir næmingar í minni mun enn næmingar í hinum Norðurlondunum, at teir arbeiða skipað við egnum læriháttum, eitt nú við at leggja ætlanir, kanna egna fatan og broyta lærihátt, tá hann ikki riggar.

Úrslitið eigur ikki at verða tulkað sum prógv um, at ávísir undirvísingarhættir elva til hægri PISA-úrslit. Greiningin vísir samanhangir, og aðrir munir millum næmingar og skúlar kunnu liggja aftanfyri. Kortini vísa úrslitini á eitt øki, sum er vert at kanna nærri: í hvønn mun føroyskir næmingar fáa høvi at arbeiða virkið og sjálvstøðugt við teimum náttúruvísindaligu arbeiðs- og hugsanarháttum, sum eru kjarnin í náttúruvísindaligum lesføri.

# Kapittul 3. Lesing

Í PISA-kanningini 2025 er lesing ikki høvuðsøkið, og tí er einans gjørligt at lýsa høvuðsúrslitini í lesing her.

Fyri at fáa eina felags fatan av úrslitunum leggja vit fyri við at greiða frá ástøðiliga karminum, sum PISA-kanningin nýtir at kanna lesføri hjá næmingunum. Síðan leggja vit høvuðsúrslitini fram. Vit síggja, at úrslitið hjá føroyskum næmingum í ár er munandi lakari enn undanfarin ár, t.v.s., at føroysku næmingarnir hesa ferð fáa færri PISA-stig í lesing í miðal. Úrslitini vísa, at gongdin í høvuðsheitum er tann sama í londum, sum vit vanliga samanbera okkum við. Eisini vísir PISA-kanningin okkum, hvussu stórur partur av næmingunum eru á hvørjum stigi á førleikastiganum. Førleikastigin kann geva okkum eina ábending um, hvussu støðan og spjaðingin er, og vit brúka hesi úrslit til at koma við tilmælum um lesiøkið í føroyska fólkaskúlanum.

## PISA-lesføri í lesing

PISA-lesføri í lesing fevnir um eitt breitt úrval av førleikum. Kannað verður, hvussu førur næmingurin er fyri at lesa raðið, t.v.s. at lesa tekstir lættliga og munagott, og hvussu hann megnar at skilja tað lisna, finna upplýsingar og meta um og hugleiða um tað lisna bæði í einari keldu og fleiri (PISA, 2018). Tá ið ein megnar at lesa raðið, frígevur tað orku til hinar partarnar av lesingini, sum m.a. snúgva seg um at fata tað lisna (Cain og Oakhill, 2004; Perfetti, Marron og Foltz, 1996). Fyri at hava gott lesføri skal næmingurin tí megna at lesa raðið, at leita upp upplýsingar, at seta tað lisna í samband við sína undanvitan og at duga at meta um keldur, høvundar og innihald í teksti.

Yvirskipað kann sigast, at lesføri í lesing hevur ávirkan á, hvussu væl næmingurin megnar at fyrihalda seg til skrivliga kunning bæði á prentteksti og í talgildum teksti (PISA, 2018). Frá 2018 hevur PISA tó einans kannað lesføri av talgildum teksti. Harvið lýsa tølini í PISA 2025-kanningini lesføri í talgildari lesing hjá næmingum í 9. flokki. Førleikin at kunna fyrihalda seg til skrivliga kunning bæði á prentaðum og talgildum teksti er framvegis ein grundleggjandi fortreyt fyri framgongdina hjá einstaklingum og samfelagnum sum heild (OECD, 2026). Lesiførleiki er nevniliga neyðugur fyri at menna víðfevnd menniskjanslig evni so sum at hugsa og grundgeva, vísa empati og at hugsa kritiskt. Tí er lesføri framvegis eitt høvuðsendamál við skúlanum.

## Høvuðsúrslit í PISA 2025

Talva 3.1 vísir gongdina í miðal PISA-stigum í lesing hjá næmingum í Bretlandi, Danmark, Finnlandi, Føroyum, Íslandi, Noregi, Svøríki umframt miðal fyri OECD árini 2006-2025. Føroysku tølini eru longst til høgru, og har síggja vit, at í 2025 fingu føroyskir næmingar í miðal 428 PISA-stig í lesing. Hetta er lakasta úrslit síðan 2006, tá ið føroysku næmingarnir fingu 409 PISA-stig í miðal. Eisini vísa føroysku úrslitini, at størsta afturgongdin er frá 2022 til 2025.

*Talva 3.1: Gongdin í miðal PISA-stigum, lesing*

| Ár | OECD | Bretland | Svøríki | Noreg | Ísland | Finnland | Danmark | Føroyar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 495 | 495 | 507 | 484 | 484 | 547 | 494 | 409 |
| 2009 | 499 | 494 | 497 | 503 | 500 | 536 | 495 | 436 |
| 2012 | 501 | 499 | 483 | 504 | 483 | 524 | 496 | 443 |
| 2015 | 497 | 498 | 500 | 513 | 482 | 526 | 500 | 470 |
| 2018 | 493 | 504 | 506 | 499 | 474 | 520 | 501 | 458 |
| 2022 | 482 | 494 | 487 | 477 | 436 | 491 | 489 | 447 |
| 2025 | 466 | 494 | 466 | 453 | 422 | 474 | 460 | 428 |

Við at samanbera úrslitini hjá føroysku næmingunum við úrslitini hjá einum miðalnæmingi í OECD, fáa vit eina breiðari mynd av gongdini hjá føroysku næmingunum seinastu árini.

Í PISA-kanningini 2025 fingu føroysku næmingarnir 428 PISA-stig í lesing, og ein miðal næmingur í OECD fekk 466 PISA-stig í lesing, og sostatt liggja føroysku næmingarnir 38 PISA-stig aftan fyri miðal. Í 2022 fingu føroyskir næmingar í miðal 447 PISA-stig í lesing. Ein miðal næmingur í OECD fekk tá 482 PISA-stig í lesing, so tá vóru føroysku næmingarnir 35 PISA-stig aftan fyri miðal. Í 2018 fingu føroysku næmingarnir 458 PISA-stig, og ein miðal næmingur í OECD fekk 493 PISA-stig, so tá vóru føroysku næmingarnir 35 PISA-stig afturúr. Í 2015 fingu føroysku næmingarnir besta úrslit nakrantíð við 470 PISA-stigum, og tá fekk ein miðal næmingur í OECD 497 PISA-stig. Tá vóru føroysku næmingarnir einans 27 PISA-stig afturúr.

Hesi høvuðsúrslit vísa okkum sostatt, at afturgongd

er í lesing bæði í Føroyum og í miðal OECD, og at munurin millum føroysku næmingarnar og miðal OECD um nakað gerst størri, og føroysku næmingarnir dragna afturúr samanborið við miðal OECD.

Frá 2018-2025 dalaði miðal lesiførleikin við 25 stigum fyri 35 av OECD-londunum. PISA sigur hesi tølini benda á, at 15 ára gamlir næmingar í 2025 avrikaðu í lesing tað, sum ein kundi vænta 14 ára gamlar næmingar at avrika í 2018 (OECD, 2026). Lesiførleikin hjá teimum 15 ára gomlu var sostatt í miðal fyri 35 OECD-lond versnaður við í minsta lagi einum floksstøði upp á einans sjey ár. Í Føroyum er afturgongdin heldur størri enn miðal OECD. Her versnaði lesiførleikin við 30 PISA-stigum frá 2018-2025, sum kann benda á, at ein føroyskur miðalnæmingur í 9. flokki í 2025 avrikaði í lesing tað, sum kundi verið væntað av einum miðalnæmingi í 7. flokki í 2018.

Um hugt verður longur aftur í føroysku tølini til 2015, sum var árið, tá ið føroysku næmingarnir kláraðu seg best í PISA-lesføri í lesing og fingu 470 PISA-stig, so er lesføri hjá føroyskum næmingum minkað við 42 PISA-stigum. Stór afturgongd hevur sostatt verið tey 10 árini frá 2015-2025, og styrkir hetta uppáhaldið um, at lesførið í lesing er minkað við í minsta lagi tveimum árum seinastu 10 árini.

Afturgongdin kemur væl til sjóndar í mynd 3.1, har úrslit í lesing hjá Norðurlondum, Bretlandi og OECD árini 2006-2025 eru avmyndað.




*Mynd 3.1. Úrslit í lesing hjá Norðurlondum og Bretlandi frá 2006-2025*

Í mynd 3.1 sæst afturgongdin rættiliga greitt í øllum londunum, vit vanliga samanbera okkum við. Rákið hjá fleiri av hinum londunum er, at ein støðug afturgongd hevur verið síðan 2009. Rákið hjá okkum er øðrvísi: frá 2006 til 2015 taka vit okkum støðugt fram, og í 2015 fingu vit 470 PISA-stig í lesing, sum er tað mesta nakrantíð. Í kanningunum eftir 2015 hava vit havt eina støðuga afturgongd.

## Føroyar samanbornar við hini londini

Bera vit úrslitini saman við úrslit úr øðrum evropeiskum londum í mynd 3.2, síggja vit, at føroyska úrtøkan einans røkkur til eitt 27. pláss. Í 2022 vóru vit fyri fyrstu ferð framman fyri eitt annað Norðurland – Ísland – og hesa ferð liggja vit aftur frammanfyri, hóast munurin er tódnaður. Onnur lond, sum Føroyar eru millum, eru eitt nú Lettland, Niðurlond, Grikkaland og Ukraina.

Mynd 3.3. vísir broytingina í stigum. Jordan, Filipsoyggjar og Kambodja hava størstu framgongdina í lesing frá 2022-2025, men telja tó framvegis millum londini, sum fáa ringast úrslit í lesing – eisini hóast tað hevur gingið nógv framá hjá teimum. Tey flestu londini hava tó afturgongd, og millum teirra liggja Føroyar heldur ovarlaga.

*Mynd 3.2: Í hesi talvuni við evropeiskum londum eru eisini tikin við nøkur lond, sum ikki sjálvsagt eru við í Evropa, men liggja á markinum ella hava onnur tøtt sambond sum gera, at tey ofta eru tikin við í evropeiskum hagtølum og OECD-samanbering. Hesi londini eru: Turkaland, Georgia, Armenia, Kýpros og Kosovo.*



*Mynd 3.3: Munur á miðal PISA-stigum millum 2025 og 2022. Føroyar eru merktar við reyðum stabba, OECD miðal við gráum. Reyða økið vísir tey lond, har munurin ikki er hagfrøðiliga signifikantur. Øll Norðurlond høvdu eina signifikanta afturgongd í lesing í 2025.*



## Tey átta stigini av lesiførleika í PISA

Eins og í undanfarnum PISA-kanningum var lesistigin býttur upp í eina røð av førleikastigum. Sjey av hesum stigum (stig 1b, 1a, 2, 3, 4, 5 og 6 í stigvaksandi førleikastigum) vórðu brúkt at lýsa lesistig í PISA 2009, 2012 og 2015. Í 2018 var lesing høvuðsøkið í PISA-kanningini, og tá vórðu øll lýsiorðini (deskriptorar) dagførd fyri at endurspegla nýggjar áskoðanir á lesing, sum vórðu mettar fyri fyrstu ferð í 2018. T.d. vísa stigini 3, 4, 5 og 6, sum eru allýst í talvu 3.2, til evnini hjá næmingunum at meta um dygdina og trúvirðið av upplýsingum og handfaring av andsagnum tvørtur um tekstir. Hetta var eitt sjónarhorn um lesi-lesføri, sum dentur ikki var lagdur á í undanfarnum kanningum.

Atlit í allýsingini hjá PISA 2025 um lesføri í lesing eru óbroytt:

Lesføri í lesing er:

- at skilja, nýta, meta um, hugleiða og fyrihalda seg til tekstir fyri at røkka sínum málum.
- at menna sína vitan og møguleikar.
- at taka lut í samfelagnum.

Talva 3.2 vísir førleikastigan hjá PISA í lesing. Í triðja stabba sæst, hvussu nógv prosent av føroysku næmingunum klára ávísa stigið, og til ber at samanbera tølini við OECD-miðal.

*Talva 3.2: Førleikastig í lesing lýst eftir eyðkennunum fyri uppgávuna.*

| Førleika-stig | Niðara mark | Prosent av næmingunum, ið eru førir fyri at svara uppgávum á ymsu stigunum ella hægri | Tað, næmingarnir vanliga megna |
|---|---|---|---|
| 6 | 698 | Føroyar<br>0,0%<br><br>OECD-miðal<br>0,8% | Lesarar á 6. stigi kunnu skilja langan og úrtøkiligan tekst, har upplýsingar av áhuga liggja djúpt í tekstinum og eru bara óbeinleiðis knýttar at uppgávuni.<br>Teir kunnu samanbera, seta upp ímóti og innflætta upplýsingar, sum umboða fleiri og møgulig mótstríðandi sjónarhorn, brúka fleiri metingarstøði og fáa fram niðurstøður tvørtur um fjar brot av upplýsingum fyri at gera av, hvussu upplýsingarnar kunnu verða brúktar.<br>Lesarar á 6. stigi kunnu hugleiða í dýpdina um kelduna til tekstin í mun til innihaldið við hjálp av treytum, sum eru uttan fyri tekstin.<br>Teir kunnu samanbera og síggja mótsetningar millum upplýsingar tvørtur um tekstir, kenna aftur og loysa millumtekstaligt ósamsvar og tvístøður gjøgnum úrskurð av kelduupplýsingum, teirra týðiligu ella sjónligu áhugar og onnur tekin um gildið á upplýsingunum.<br>Uppgávur á 6. stigi eru eyðkendar av, at lesarin ger útgreinaðar ætlanir, sum seta saman margfeldar fortreytir og fáa fram úrskurðir at knýta saman uppgávuna og tekstirnar. Tilfar á hesum stigi fevnir um ein ella fleiri samansettar og úrtøkiligar tekstir, og at draga inn margfeld og møguliga mótstríðandi sjónarhorn. Upplýsingar um endamál kunnu hava ein form av smálutum, sum eru djúpt innbygdir í ella tvørtur um tekstir og sannlíkindaliga fjald í mótstríðandi upplýsingum. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5 | 626 | Føroyar 0,8%<br><br>OECD-miðal 5,5% | Lesarar á 5. stigi kunnu skilja drúgvar tekstir og úrleiða burtur úr teimum, hvørjar upplýsingar í tekstinum eru viðkomandi, sjálvt um viðkomandi upplýsingar lætt kunnu verða yvirsæddar. Teir kunnu gera orsakargrundaðar ella aðrar niðurstøður við støði í djúptøknari fatan av víðkaðum tekstbrotum.<br>Teir kunnu eisini svara óbeinleiðis spurningum við at úrleiða sambandið millum spurningin og einar ella fleiri upplýsingar innan fyri ella tvørtur um fleiri tekstir og keldur.<br>Grundandi uppgávur krevja framleiðslu ella kritiska niðurstøðu av hugsanarstøði (hypotesum) við støði í ítøkiligum upplýsingum. Lesarar kunnu skilja ímillum innihald og endamál og ímillum fakta og meining, sum tey verða brúkt í samansettum ella úrtøkiligum frásagnum.<br>Tey kunnu meta um partloysi og slagsíðu grundaðar á beinleiðis og óbeinleiðis ábendingar, bæði viðvíkjandi innihaldi og/ella kelduni til upplýsingina. Tey kunnu eisini gera niðurstøður um, hvussu álítandi uppáhald og niðurstøður, sum koma fram í tekstbroti, eru.<br>Fyri allar síður av lesing fevna uppgávur á 5. stigi vanliga um at handfara hugtøk, sum eru úrtøkilig ella ólogisk og at fara gjøgnum fleiri stig, áðrenn komið er á mál. Harumframt kunnu uppgávur á hesum stigi krevja, at lesarin kann handfara langar tekstir og skifta aftur og fram tvørtur um tekstir fyri at samanbera og mótseta upplýsingar. |
| 4 | 553 | Føroyar 7,74%<br><br>OECD-miðal 20,0% | Á 4. stigi kunnu lesarar skilja víðkað brot í einstøkum ella margfaldum tekststigbýti. Teir tulka meiningina av frábrigdum í máli í einum parti av teksti við at taka samlaða tekstin við í umhugsanina. Í øðrum tulkiuppgávum vísa næmingarnir fatan og gildi av flokkingum til høvið. Teir kunnu bera saman sjónarhorn og gera úrskurðir, sum eru grundaðir á margfeldar keldur.<br>Lesarar kunnu leita, staðseta og innflætta fleiri brot av innbygdum upplýsingum ímillum møguligt órógv. Teir kunnu fáa fram niðurstøður grundaðar á uppgávufrágreiðing fyri at meta um, hvussu viðkomandi upplýsingarnar um málið eru. Teir kunnu handfara uppgávur, sum krevja av teimum, at tey minnast aftur undanfarið tilfar.<br>Harumframt kunnu næmingar á hesum stigi meta um sambandið millum nágreiniligar frágreiðingar og yvirskipaða hugburðin ella niðurstøðu hjá einum persóni um eitt evni. Teir kunnu hugleiða um ætlanina, sum høvundar brúka at miðla sín boðskap, grundað á sjónlig eyðkenni hjá tekstum (t.d. heiti og myndprýðing). Teir kunnu samanbera og síggja mótsetningar, sum koma týðiliga til sjóndar í fleiri tekstum, og meta um trúvirðið á eini keldu, sum er grundað á sjónsk eyðkenni.<br>Tekstir á 4. stigi eru ofta langir og samansettir, og innihaldið og formur eru ikki neyðturviliga typisk. Nógvar av uppgávunum eru marg-tekstastillingar. Tekstirnir og uppgávurnar innihalda óbeinleiðis ella undirskiltar ábendingar. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3 | 480 | Føroyar<br>28,4%<br><br>OECD-miðal<br>43,8% | Lesarar á 3. stigi kunnu umboða tann bókstavliga týdningin av einkultum ella margfeldum tekstum, tí eyðsýnt innihald vantar ella skipaðar ábendingar. Lesarar kunnu innlima innihald og skapa bæði grundleggjandi og framkomnar niðurstøður. Teir kunnu eisini innlima ymsar partar av tekstbrotum fyri at kenna aftur høvuðshugsanina, skilja sambandið ella útleggja týdningin av einum orði ella orðing, tá ið tær kravdu upplýsingarnar eru bornar fram á eini einstakari síðu.<br>Teir kunnu leita eftir upplýsingum, sum eru grundaðar á óbeinleiðis ábendingar og kenna aftur upplýsingar um endamálið, sum ikki eru í eini sjónligari støðu og/ella í eini órógvandi støðu. Í nøkrum førum kenna lesarar á hesum stigi aftur sambandið millum ymisk brot av upplýsingum grundað á fleirgreindar fortreytir.<br>Lesarar á 3. stigi kunnu hugleiða um eitt brot av teksti ella eitt lítið savn av tekstum og samanbera og síggja mótsetningar úr sjónarhornunum hjá fleiri høvundum grundað á týðiliga upplýsing. Hugleiðandi uppgávur á hesum stigi kunnu krevja, at lesarin ger samanberingar, skapar frágreiðingar ella metir um eyðkenni í tekstinum. Summar hugleiðandi uppgávur krevja av lesaranum eina nágreiniliga fatan av einum tekstabroti við einum kendum evni, meðan aðrar krevja grundleggjandi fatan av minni kendum innihaldi.<br>Uppgávur á 3. stigi krevja av lesaranum, at hann tekur fleiri eyðkenni við í sína umhugsan, tá ið hann samanber, finnur mótsetningar ella flokkar upplýsingar. Tær kravdu upplýsingarnar eru ofta ikki týðiligar, og har kunnu vera munandi nøgdir av mótstríðandi upplýsingum. Eyðkendir tekstir á hesum stiginum kunnu innihalda aðrar forðingar, eitt nú hugskot, sum eru øvut av tí væntaða ella eru negativt orðað. |
| 2 | 407 | Føroyar<br>58,8%<br><br>OECD-miðal<br>69,0% | Lesarar á 2. stigi kenna aftur høvuðsinnihaldið í einum tekstabroti í rímiligari longd. Teir skilja samanhangir ella skapa meining innan fyri ein avmarkaðan part av tekstinum, tá ið upplýsingarnar ikki eru sjónliggjørdar við grundleggjandi niðurstøðum og/ella tá ið teksturin/tekstirnir innihalda órógvandi upplýsingar.<br>Teir kunnu velja og meta um eina síðu í einum savni grundað á sjónlig – tó onkuntíð samansettar ígongdsetarar (prompts) – og kenna aftur eitt ella fleiri stykki av upplýsingum grundað á fleirtáttaðar, lutvíst undirskildar fortreytir.<br>Lesarar á 2. stigi kunnu, tá ið teir fáa týðiligar ábendingar, hugleiða um tað yvirskipaða endamálið ella um endamálið við ítøkiligum smálutum í tekstum við avmarkaðari longd. Teir kunnu hugleiða um einføld visuell ella typografisk drøg.<br>Teir kunnu samanbera uppáhald og eftirmeta orsakirnar til tey grundað á stuttar, sjónligar útsagnir.<br>Uppgávur á 2. stigi kunnu innihalda samanberingar ella mótsetningar grundaðar á einkultar útsagnir í tekstinum. Eyðkent fyri hugleiðandi uppgávur á hesum stigi er, at tær krevja av lesarunum, at teir gera eina samanbering ella knýta fleiri sambond millum tekstin og vitan uttanfyri við at draga upp á persónligar royndir og hugburð. |
| 1a | 335 | Føroyar<br>85,3%<br><br>OECD-miðal<br>87,6% | Lesarar á stigi 1a kunnu skilja ta bókstavligu meiningina av setningum ella stuttum brotum. Lesarar á hesum stigi kenna eisini aftur høvuðstemað ella endamál høvundsins í einum broti av teksti um eitt kent evni og skapa eitt einfalt samband millum fleiri líknandi brot av upplýsingum ella millum givnar upplýsingar og teirra egnu fyrrverandi vitan.<br>Teir kunnu velja eina viðkomandi síðu úr einum lítlum savni grundað á einfaldar ígongdseterar og finna eitt ella fleiri óheft brot av upplýsingum í stuttum tekstum.<br>Stig 1a-lesarar kunnu hugleiða um tað yvirskipaða endamálið og um tann lutfalsliga týdningin av upplýsingum (t.e. høvuðshugsanina mótvegis smálutum uttan týdning) í setningum, sum innihalda týðiligar ábendingar.<br>Flestu uppgávur á hesum stigi innihalda týðiligar ábendingar um, hvat eigur at verða gjørt, hvussu tað skal gerast, og hvat í tekstinum/tekstunum lesararnir skulu savna seg um og geva gætur. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1b | 262 | Føroyar 97,2%<br><br>OECD-miðal 97,1% | Lesarar á stigi 1b kunnu eftirmeta ta bókstavligu meiningina í einføldum setningum. Teir kunnu eisini tulka ta bókstaviligu meiningina í tekstum við at gera einføld sambond millum líknandi brot av upplýsingum í spurninginum og/ella tekstinum. Lesarar á hesum stigi kunnu leita eftir og finna eitt einfalt stykki, eina væl staðsetta, týðiliga ávísta upplýsing í einum einstøkum setningi, einum stuttum teksti ella einum einføldum lista. Teir kunnu fáa atgongd til eina viðkomandi síðu frá einum lítlum savni, sum er grundað á einfaldar ábendingar, tá ið týðilig tekin eru til staðar. Uppgávur á stigi 1b leiða týðiliga lesararnar til at umhugsa viðkomandi viðurskifti í uppgávuni og í tekstinum. Tekstir á hesum stigi eru stuttir og stuðla vanliga lesaranum, eitt nú við at endurtaka upplýsingar, myndir ella vælkend symbol, har sera fáar upplýsingar kappast. |
| 1c | 189 | Føroyar 100,0%<br><br>OECD-miðal 100% | Lesarar á stigi 1c kunnu skilja og staðfesta týdningin av stuttum setningum við einføldum setningsbygnaði á einum bókstavligum stigi og lesa við einum greiðum og einføldum endamáli í eitt avmarkað tíðarskeið.<br>Uppgávur á hesum stigi innihalda einfalt orðfeingi og einfaldan setningsbygnað. |

Førleikastigin skal verða lisin soleiðis, at allir partsførleikarnir eru í spæli, men at kompleksiteturin á teimum er hækkandi saman við støðinum á førleikastiganum.

Serliga góðu lesararnir verða flokkaðir á førleikastigi 5 og 6, góðu lesararnir eru á førleikastigi 4, og lesarar á førleikastigi 3 eru eisini lutfalsliga góðir lesarar. Førleikastig 2 er í PISA fastlagt sum lægsta stig av virkisførum lesiførleika. Tað merkir, at næmingar undir hesum marki ikki verða mettir at klára víðari lesnað, og teir kunnu fáa trupulleikar í einum vanligum starvi. Hóast førleikastig 2 liggur innan fyri økið virkisført lesføri, so er lesiførleikin hjá hesum næmingum lutfalsliga veikur. Nakrir av hesum næmingum fáa væntandi eisini trupult við at klára lesikrøvini í víðari útbúgving ella í einum starvi. Førleikastig 1a, 1b og 1c sipar til teir næmingar, sum í PISA-høpi ikki verða mettir at hava nóg góðan lesiførleika til at klára avbjóðingarnar í nútíðarsamfelagnum ella tey krøv, ið verða sett í miðnámsútbúgvingum ella í einum starvi.

## Lesiførleikastig í PISA

*Talva 3.3: Úrslitini frá PISA-kanningunum frá 2009, 2012, 2015, 2018, 2022 og 2025. Úrslitini eru víst í prosentum millum stigini fyri Føroyar frá 2009 til 2025*

| | Stig 1c | Stig 1b | Stig 1a | Stig 2 | Stig 3 | Stig 4 | Stig 5 | Stig 6 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2009 | 2 | 8 | 26 | 34 | 23 | 6 | 1 | 0 |
| 2012 | 4 | 6 | 19 | 37 | 27 | 7 | 1 | 0 |
| 2015 | 0 | 5 | 17 | 32 | 31 | 13 | 2 | 0 |
| 2018 | 0 | 5 | 19 | 39 | 26 | 10 | 1 | 0 |
| 2022 | 0 | 7 | 25 | 35 | 25 | 7 | 1 | 0 |
| 2025 | 3 | 12 | 27 | 30 | 21 | 7 | 1 | 0 |

Tað er áhugavert at hyggja nærri at, hvørjum stigi føroysku næmingarnir liggja á. Eins og í undanfarnu PISA-kanning er størsti bólkurin av føroyskum næmingum, 30%, enn á stigi 2. Alsamt fleiri næmingar, 42%, liggja undir stigi 2, t.v.s., at teir hava ikki ein virkisføran lesiførleika. Færri næmingar enn áður megna ovaru førleikastigini: 21% megna stig 3, 7% megna stig 4, 1% megnar stig 5 og sannlíkt er, at eingin føroyskur næmingur megnar stig 6.

Úrslitini staðfesta, at 42% av næmingum hava ikki ein virkisføran lesiførleika. Hetta eru 10%-stig fleiri enn í undanfarnu kanning, og vit hava ongantíð áður havt so nógvar veikar lesarar. Skulu vit betra okkara PISA-úrslit í lesing, so er avbjóðingin serliga at lyfta fleiri úr bólki 1c, 1b og 1a upp á stig 2, soleiðis at næmingarnir fáa ein virkisføran lesiførleika, væl vitandi um, at stig 2 av PISA verður flokkað sum ein vandabólkur. Eisini eiga vit at stremba eftir, at fleiri næmingar fáa annaðhvørt miðal lesføri ella dygdargott lesføri og harvið røkka stigi 4, 5 og 6 í førleikastiganum.

Kanningar, ið eru gjørdar av næmingum, ið

hava tikið lut í PISA, hava staðfest, at markið fyri virkisførum lesiførleika er førleikastig 2. Millum annað hevur ein kanadisk kanning víst, at fáa næmingar úrslit, ið er lægri enn førleikastig 2, er minni sannlíkt, at teir fáa eina miðnámsútbúgving. Ein donsk kanning hevur eisini víst á leið tað sama: Næmingar, sum liggja niðan fyri førleikastig 2, fara annaðhvørt ikki undir eina miðnámsútbúgving ella megna ikki at fullføra eina slíka (PISA, 2022).

Í talvu 3.4 eru úrslitini hjá Norðurlondum bólkað í fýra bólkar: ikki virkisført lesføri (stig 1c, 1b, 1a), vandabólkur (stig 2), miðal lesføri (stig 3 og 4) og so dygdargott lesføri (stig 5 og 6).

*Talva 3.4: Føroyar og Norðurlond, býtið í prosentum býtt upp í ikki-virkisført lesføri, vandabólk, miðal lesføri og dygdargott lesføri.*

| | Ikki-virkisført lesføri | Vandabólkur | Miðal lesføri | Dygdargott lesføri |
|---|---|---|---|---|
| Ísland | 44 | 26 | 28 | 2 |
| Føroyar | 42 | 30 | 28 | 1 |
| Noreg | 34 | 24 | 37 | 5 |
| Svøríki | 31 | 23 | 38 | 9 |
| Danmark | 29 | 26 | 39 | 4 |
| Finnland | 26 | 24 | 44 | 6 |

Føroysku dáturnar vísa, at 72% av næmingunum eru antin í vandabólkinum (30%) ella hava ikki virkisført lesføri (42%). Hesi 72% metir OECD kunnu fáa trupulleikar við at megna hægri lestur t.d. eina miðnámsútbúgving ella samsvarandi. 28% av næmingunum hava eitt miðal lesføri, og 1% av næmingunum hevur eitt dygdargott lesføri. Samanbera vit við hini Norðurlondini, hava vit flest næmingar, ið eru í vandabólkinum, samstundis sum vit hava fæst næmingar við dygdargóðum lesføri.

Mynd 3.4 nágreinar bólkarnar nærri. Gráu stabbarnir vísa býtið millum teir tríggjar bólkarnar av næmingum við ikki virkisførum lesiførleikum á stigunum 1c, 1b og 1a. Bláu stabbarnir vísa býtið av næmingum við virkisførum lesiførleikum á stigunum 2-4. Í lesing verður stig 2 roknað við upp í vandabólkin saman við stigi 1a, b, c. Stig 2 er tann ljósasti blái liturin í myndini.




*Mynd 3.4: Førleikastig í prosentum býtt upp á Norðurlond.*

Um hugt verður at býtinum av føroyskum næmingum í vandabólkinum, eru 30% av teimum á stigi 2, og 42% á stigi 1a, b og c, sum merkir, at av teimum í vandabólkinum eru 42%, sum ikki hava nøktandi lesiførleikar. Býtið av teimum við ikki nøktandi lesiførleikum er, at 27% eru á stigi 1a, 12% á 1b og 3% á 1c. Føroyar hava sostatt flestar næmingar í vandabólkinum av øllum Norðurlondunum. Føroysku og íslendsku tølini líkjast nógv, men føroysku næmingarnir klára seg eitt vet betur, serliga tí at færri næmingar eru á lægsta stignum (á stigi 1) enn í Íslandi.

29% av føroyskum næmingum hava lesiførleikar

oman fyri vandabólkin. Teir flestu, 21%, hava lesiførleikar, sum eru í lægra endanum av miðallesføri (stig 3). Næst flest, 7%, hava lesiførleikar í hægra endanum av miðallesføri (stig 4). Einans 1% av føroyskum næmingum hava dygdargóðar lesiførleikar, og hesir eru á stigi 5. Sannlíkt er, eingin føroyskur næmingur hevur lesiførleikar á stigi 6.

## Førleikastigin, fráfaringarroyndin og landsroyndirnar

Tað er altíð trupult at samanbera ymiskar kanningar, ið ikki hava júst sama endamál. Kortini vera PISA-úrslitini í lesing niðanfyri sett í samband við úrslit í fráfaringarroyndini og landsroyndini hjá sama árgangi. Samanberingin skal takast við fyrivarni, tí talan er um tríggjar ymiskar kanningar, og ymiskt kann sjálvsagt vera, hvør orka er løgd í fyrireiking og gjøgnumføring av kanningunum.

Tó er áhugavert at samanbera PISA-úrslitini 2025 við fráfaringarroyndina í føroyskum 2025. Í føroyskum verða næmingarnir mettir í ymsum førleikum, m.a. málførleika, stavseting, mállæru og lesing. Tá hugt verður eftir, hvussu stóran prosentpart næmingarnir loystu í ymsu undirøkjunum, so sæst, at hjá hesum árganginum var lesingin veikari enn hon hevur verið tey trý undanfarnu árini, samstundis sum tey stóðu seg munandi betri í mállæru enn undanfarnu árgangirnir (onnur undirøki enn lesing eru ikki víst í talvu). Hetta merkir við øðrum orðum, at PISA-úrslitini í lesing og fráfaringarroyndin í føroyskum vísa sama rák í lesing (talva 3.5).

Tá ið somu næmingar vóru uppi í landsroynd í 6. flokki trý ár frammanundan, sæst nøkulunda sama rák: Næmingarnir vóru veikastir í lesing. Sama mynstur sæst ikki við teimum næmingunum, sum vóru uppi í PISA 2022; teir stóðu seg væl í lesing til landsroyndina í 6. flokki, men tað kann vera tí at uppgávurnar vóru ov lættar, eins og staðfest verður í frágreiðingini fyri landsroyndina 2019.

Talva 3.5 vísir ein ymiskleika í, hvussu ymsu árgangirnir standa seg í lesing í fráfaringarroyndum fólkaskúlans og landsroyndini í 6. flokki. Hesin ymisleiki kann lutvíst standast av ymiskum torleikastigi í uppgávunum, men eisini av at ymsu árgangirnir hava ymsar styrkir og veikleikar, og harvið, at árgangurin sum var uppi í PISA 2025, og kanska eisini tann í 2022, eru veikari enn miðal árgangir í lesing.

*Talva 3.5: Talvan vísir úrslitini í lesing í fráfaringarroyndini og landsroyndini. 6. flokkur í 2018/19 er 9. flokkur í 2021/22; 6. flokkur í 2021/22 er 9. flokkur í 2024/25.*

| Lesing | 2018/19 | 2019/20 | 2020/21 | 2021/22 | 2022/23 | 2023/24 | 2024/25 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fráfaringarroynd | | | | **60%** | 64% | 61% | **59%** |
| Landsroynd 6. fl | **77%** | 72% | 77% | **56%** | 63% | 56% | 64% |

## Lesføri hjá føroyskum gentum og dreingjum

Úrslitið hjá teimum føroysku næmingunum í 2025 er 428 PISA-stig í lesing. Hyggja vit at kynunum hvør sær sæst, at fyri genturnar er miðaltalið 449 PISA-stig og fyri dreingirnar 407 PISA-stig, t.v.s., at genturnar fáa í miðal 42 PISA-stig fleiri enn dreingirnir. Hyggja vit at søguligu tølunum, so er munurin í 2025 tann størsti, síðan vit byrjaðu í PISA í 2006, og tí er áhugavert at leggja til merkis hendan munin. Tað sær út til, at ein høvuðsorsøk til at føroysku tølini fyri lesing vóru betur í 2022 enn 2025 er, at dreingirnir kláraðu seg munandi betur í 2022 enn 2025 og háláðu tá miðaltalið í lesing væl upp.

*Talva 3.6. Gongdin í úrtøkuni hjá gentum og dreingjum frá 2006 til 2025. Øll árini hava gentur fingið flest stig.*

| | Miðal PISA-stig: Lesing | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| 2006 | 409 | 428 | 387 | 41 |
| 2009 | 436 | 449 | 423 | 26 |
| 2012 | 443 | 463 | 423 | 40 |
| 2015 | 470 | 482 | 457 | 25 |
| 2018 | 458 | 470 | 446 | 24 |
| 2022 | 447 | 454 | 439 | 15 |
| 2025 | 428 | 449 | 407 | 42 |

Samanbera vit hesi tøl við úrtøkuna hjá gentum og dreingjum í Norðurlondum í 2025, síggja vit, at rákið er tað sama í øllum londum: Gentur fáa fleiri miðal PISA-stig í lesing enn dreingir. Í Danmark

og Íslandi er munurin minstur við 31 miðal PISA-stigum, og í Finnlandi er munurin størstur við 46 miðal PISA-stigum.

*Talva 3.7. Gongdin í úrtøkuni hjá gentum og dreingjum í ymsu Norðurlondunum 2025. Í øllum norðurlondum hava gentur fingið flest stig.*

| | Miðal PISA-stig: Lesing | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2025 | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| Føroyar | 428 | 449 | 407 | 42 |
| Ísland | 422 | 439 | 408 | 31 |
| Finnland | 474 | 498 | 452 | 46 |
| Noreg | 453 | 473 | 434 | 39 |
| Svøríki | 467 | 487 | 447 | 40 |
| Danmark | 460 | 476 | 445 | 31 |

Munurin millum kynini er hvørki serstakur fyri Føroyar ella nýggjur. Aðrar kanningar, t.d. trivnaðarkanningin og próvtøkan fyri fráfaringarroynd fólkaskúlans hava víst sama mun kynjanna millum (PISA, 2022).

## PISA og lesivanakanningar

Tað finnast ikki nógvar kanningar, sum burturav snúgva seg um lesing og lesføri hjá føroyskum børnum. Nýggjastu kanningarnar eru tvær stórar lesivanakanningar, ein kvantitativ og ein kvalitativ, ið kanna lesivanar í frítíðini hjá føroyskum børnum í 4., 6. og 9. flokki (Rasmussen o.fl., 2025). Í kanningunum eru nøkur úrslit, ið kunnu vera við til at varpa ljós á, hví lesføri hjá føroyskum gentum og dreingjum støðugt er viknað síðan 2015.

Høvuðsúrslitini í kanningunum eru, at føroysk børn lesa lítið í frítíðini, og staðfest verður, at dreingir lesa minni enn gentur. Víst verður á, at einans ein fjóðringur av føroyskum børnum lesa javnan í frítíðini, meðan umleið 65% lesa sjáldan ella ongantíð. Úrslitini vísa, at lesingin minkar við aldrinum: fleiri børn lesa í 4. flokki enn í 6. og 9. flokki (Rasmussen o.fl., 2025). Hesi úrslit eru áhugaverd at hava í huga í sambandi við PISA í lesing, tí vit vita, at fyri at hava gott lesføri, skal næmingurin megna at lesa raðið, og at tað krevst nógv og áhaldandi venjing at gerast ein stinnur lesari (Brandt, 2024).

Nakrir spurningar í kvantitativu lesivanakanningin vóru teir somu, sum í eini danskari kanning um somu viðurskifti, soleiðis at úrslitini kunnu samanberast (Rasmussen o.fl., 2025). Samanberinginarnar vísa, at føroyskir næmingar lesa munandi minni enn donsku næmingarnir (talva 3.8).

*Talva 3.8: Hvussu ofta lesur tú bøkur í frítíðini (ikki skúlating). Svarmøguleikin „Fleiri ferðir um vikuna" er vístur her. Tølini eru úr kvantitativu lesivanakanningini (Rasmussen o.fl., 2018).*

| | **4. flokkur** | **6. flokkur** |
|---|---|---|
| Føroyar | 33% | 30% |
| Danmark | 62% | 47% |
| Munur millum Føroyar og Danmark í prosentum | 29% | 17% |

Samanberingin vísir, at í summum førum lesa føroysku næmingarnir ikki meiri enn eina góða helvt av tí, sum danskir næmingar lesa: Í fjórða flokki lesa 33% av føroysku næmingunum fleiri ferðir um vikuna í mun til 62% av donsku næmingunum, í sætta flokki lesa 30% av føroysku næmingunum fleiri ferð um vikuna í mun til 47% av donsku næmingunum (Rasmussen o.fl., 2018). Hetta er ein munur á ávíkavist 29 og 17%. Í lesivanakanningini verður víst á, at í grundini er talan um eina andsøgn, tí børn í Danmark hava væl longri skúladag, mangastaðni hava tey longri leið í skúla og tey brúka líka nógva tíð til talgildar miðlar sum føroyskt børn (Rasmussen o.fl., 2018).

## Samanumtøka

Samanumtikið vísa føroysku PISA-úrslitini fyri lesføri í lesing í 2025 eina afturgongd fyri miðalnæmingar. Hóast afturgongd hevur verið síðani 2015, sum var árið við bestu úrslitinum í lesing í Føroyum, so er afturgongdin upp aftur størri í árunum 2022 til 2025. Úrslitini fyri miðal OECD-londini versna somuleiðis støðugt, og benda tølini tí á eitt rák, sum røkkur út um Føroyar. Munurin er tó tann, at afturgongdin er væl størri í Føroyum enn í miðal OECD-londum.

Føroysku úrslitini kunnu vekja undran, tí síðan fyrstu PISA-kanningina í 2006 hevur eitt stórt og miðvíst arbeiði verið gjørt fyri at styrkja lesing og bøta um lesitilfar, serliga í yngru flokkum. Harumframt hevur føroysklærugreinin fingið fleiri tímar, føroyskt undirvísingartilfar hevur verið sett undir luppin, og eftirútbúgving er sett í verk (Rasmussen o.fl., 2025). Samanumtikið kann sigast, at:

- Úrslitini fyri lesføri í lesing í 2025 eru tey ringastu síðani 2006, tá ið Føroyar luttóku í PISA-kanningini á fyrsta sinni. PISA 2025 vísir eina áhaldandi afturgongd í lesiførleikanum hjá føroyskum næmingum, sum byrjaði í 2015. Størsta afturgongdin er frá 2022 til 2025. Føroyskir næmingar eru aftan fyri OECD-miðal, og munurin er vaksin nakað síðani 2022.
- Út við tríggir fjórðingar av føroyskum næmingum eru í vandabólkinum í lesføri í lesing. Hetta er

ein sera stórur partur av føroyskum næmingum. Harumframt hevur út við helvtin av næmingum ikki ein virkisføran lesiførleika.

- Føroyskar gentur hava í miðal klárað seg betur í lesing enn dreingir í øllum PISA-kanningunum, sum eru gjørdar síðani 2006. Munurin millum kynini vaks frá 2022 til 2025, og dreingirnir fáa nú væl færri PISA-stig í miðal fyri sínar lesiførleikar enn í 2022. Genturnar í hinum Norðurlondunum fáa somuleiðis betur úrslit í lesing enn dreingirnir.
- Føroysku lesivanakanningar (Rasmussen, 2025) og úrslit frá fráfaringar- og landsroyndum varpa eitt breiðari ljós á PISA-úrslitini í lesing. Ábendingar eru um, at samsvar er millum PISA-úrslitini í lesing og úrslitini í fráfaringar- og landsroyndum. Lesivanakanningin rør framundir, at føroyskir næmingar lesa ov lítið og tískil fáa ov lítla venjing í lesing.

## Tilmæli

Hyggja vit yviskipað at øllum PISA-kanningunum, Føroyar hava tikið lut í, sæst ein greið framgongd í lesing árini 2006-2015. Hendan framgongd er vend til afturgongd fyrst í 2018 og síðan aftur í 2022 og 2025. Myndugleikar eiga at taka støðugu afturgongdina í álvara og umrøða møgulig nýggj og eldri tilmæli og átøk, ið kunnu bøta um keðiligu gongdina.

Hesi kundu verið:

- Styrkja mál- og lesimenning sum granskingarøki og harvið eisini styrkja fakøkið á námsfrøðinga- og læraraútbúgvingunum.
- Gera eina samskipaða ætlan í fólkaskúlanum at menna lesføri tvørtur um lærugreinir, har lærarar í øllum lærugreinum kenna sín leiklut og felags ábyrgd at styrkja lesføri.
- Fremja eina støðuga dagføring av tíðarbærum lesitilfari á føroyskum. Dentur eigur at vera lagdur á tilfar til eldru næmingar og serstakliga dreingir og á at halda teimum til at lesa meira.
- At betra um lesifatanina við a) at halda fast í at lesa pappírstekst og b) við at lesa talgildan tekst, har næmingurin ikki noyðist at skrolla, tá ið hann lesur. Uppseting og skrolling kunnu hava stóra ávirkan á lesifatanina í talgildari lesing (Clinton-Lisell & Litzinger, 2026).
- Seta í verk gransking í lesiundirvísingini í fólkaskúlanum, frálæruhættum og undirvísingaramboðum, og hvussu hesi kunnu styrkja lesføri í lesing hjá føroyskum næmingum. Dentur kundi t.d. verið lagdur á lesiførleikar hjá dreingjum, og hvussu vit kunnu gera lesing áhugaverda og viðkomandi hjá ungum.
- Støðugt ýta av, hvat grannalondini gera, tí avbjóðingarnar líkjast.

# Kapittul 4: Úrslitini í støddfrøði 2025

## Samandráttur

Í PISA 2025 fáa føroysku næmingarnir 452 PISA-stig í miðal í støddfrøði. Hetta eru 6 stig fleiri enn í 2022. Føroyar eru einasta Norðurlandið, har miðalúrslitið hækkar frá 2022 til 2025, meðan hini Norðurlondini og OECD-miðaltalið ganga aftur. Framgongdin er tó ikki hagfrøðiliga signifikant, og føroyska úrslitið er framvegis 39 stig lægri enn í 2018.

Á førleikastiganum eru 64,6% av næmingunum á stigi 2 ella hægri. Hetta er ein lítil bati frá 2022, men enn er meira enn triði hvør næmingur undir stigi 2, sum sambært OECD (2023) er grundleggjandi minstamarkið fyri støddfrøðiligum lesføri, ið krevst fyri at kunna taka virknan lut í nútíðarsamfelagnum. Eisini eru lutfalsliga fáir føroyskir næmingar, sum røkka teimum hægstu førleikastigunum. Samanumtikið bendir PISA 2025 á eina varliga jaliga gongd eftir veika úrslitið í 2022, men framvegis eru greiðar avbjóðingar, bæði við at fáa fleiri næmingar upp um stig 2 og at fáa fleiri at røkka hægri førleikastigum.

## Inngangur

Í PISA-kanningini verður hugtakið *støddfrøðiligt lesføri* brúkt til at lýsa støddfrøðiliga førleikan, sum verður kannaður hjá 15-ára gomlum næmingum. Hugtakið fevnir bæði um støddfrøðiliga vitan og um førleikan at nýta hesa vitan í ymiskum samanhangum. Hetta snýr seg millum annað um at brúka skilvísa støddfrøðiliga hugsan, at brúka støddfrøðiligar mannagongdir og amboð, at loysa trupulleikar og at meta um støður, sum hava samband við veruliga lívið. Allýsingin av støddfrøðiligum lesføri niðanfyri endurspeglar hendan dentin á at kunna nýta støddfrøði í fjølbroyttum samanhangum og soleiðis luttaka virkið í nútíðarsamfelagnum.

*Allýsing av støddfrøðiligum lesføri fyri PISA 2025 (OECD, 2023).*
Støddfrøðiligt lesføri er evnini hjá tí einstaka at nýta skilvísa støddfrøðiliga hugsan og at orða, brúka og tulka støddfrøði í eini røð av fjølbroyttum samanhangum úr veruliga lívinum. Tað fevnir um at kunna nýta støddfrøðilig hugtøk, støddfrøðiligar mannagongdir, støddfrøðiligar sannroyndir og amboð til at lýsa, greiða frá og meta um ymisk fyribrigdi. Tað stuðlar tí einstaka í at varnast leiklutin, ið støddfrøði hevur í heiminum og í at gera væl grundaðar metingar og taka væl grundaðar avgerðir, ið er neyðugt hjá uppbyggjandi, virkandi og hugsanarsomum 21.-aldar-samfelagsborgarum.

## Hvat kannar PISA viðvíkjandi støddfrøði?

PISA-hugtakskarmurin fyri støddfrøði (OECD, 2023) lýsir gjølla, hvat støddfrøðiligt lesføri fevnir um, og hvørjir førleikar og øki verða kannað í PISA. Hugtakskarmurin er grundarlagið undir støddfrøðiuppgávunum, sum næmingarnir møta í kanningini. Í PISA 2022-kanningini var støddfrøði høvuðsøkið, og tí varð hugtakskarmurin fyri støddfrøði lýstur í dýpdina í føroysku frágreiðingini (Højsted, 2022). Her kemur ein styttri gjøgnumgongd.

Hugtakskarmurin er samansettur av fýra yvirskipaðum pørtum: Mannagongdir, støddfrøðiligt innihald, samanhangir og 21.-aldar-førleikar.




*Mynd 4.1: PISA-hugtakskarmurin (umsettur frá https://pisa2022-maths.oecd.org/; OECD, 2023, s. 10).*

## Mannagongdir

PISA-uppgávurnar kanna, í hvønn mun næmingar megna fýra støddfrøðiligar mannagongdir. Hesar eru tætt knýttar at støddfrøðiligu modelleringsringrásini (Højsted, 2016), sum í stuttum snýr seg um at brúka støddfrøði til at loysa trupulleikar frá veruliga lívinum.

- *Orða* snýr seg um at kenna aftur støddfrøðina í einum trupulleika úr veruliga lívinum og umseta hann til ein støddfrøðiligan trupulleika.
- *Brúka* snýr seg um at nýta støddfrøðilig hugtøk, fakta, mannagongdir og amboð til at koma fram til eitt støddfrøðiligt úrslit.
- *Tulka og eftirmeta* snýr seg um at tulka úrslitið í mun til upprunaliga samanhangin og meta um, hvørt úrslitið er rímiligt og gevur meining.
- *Skilvís støddfrøðilig hugsan* fevnir millum annað um at kenna aftur støddfrøðiligar samanhangir, gera skilvísar niðurstøður, menna loysnir og grundgeva fyri teimum. Skilvís støddfrøðilig hugsan er ein partur av hinum mannagongdunum (og er tískil í miðjuni á mynd 4.1), men verður eisini kannað sum ein sjálvstøðug mannagongd.

## Støddfrøðiligt innihald

Støddfrøðiliga innihaldið er býtt í fýra øki: *mongdir*, *sannlíkindi og dátur*, *broyting og samanhangur* og *rúm og skap*. Hesi fevna millum annað um tøl og rokning, dátur og óvissu, funktiónir og broytingar umfram geometrisk skap og rúmliga fatan.

## Samanhangir

PISA-uppgávurnar taka støði í veruliga lívinum. Samanhangirnir verða býttir í fýra flokkar:

- *Persónligir* samanhangir, sum snúgva seg um gerandislív, familju og frítíð.
- *Arbeiðslív,* sum fevnir um støður og uppgávur úr arbeiðslívinum.
- *Samfelagsligir* samanhangir, sum viðvíkja samfelagsligum viðurskiftum og almennum spurningum.
- *Vísindaligir* samanhangir, sum snúgva seg um náttúruvísindi, tøkni og støddfrøði í sjálvum sær.

## 21.-aldar-førleikar

Hugtakskarmurin fevnir eisini um 21.-aldar-førleikar so sum kritiska og skapandi hugsan, sjálvstøðugt arbeiði, nýtslu av upplýsingum og samskifti. Hesir førleikar verða ikki kannaðir beinleiðis, men verða mettir at hava týdning fyri, at næmingar kunnu loysa PISA-uppgávurnar (OECD, 2023).

## PISA-uppgávur

Hvør uppgáva, sum næmingarnir møta í PISA-kanningini, verður flokkað til at máta eina mannagongd, eitt støddfrøðiligt øki og ein samanhang. Sí uppgávudømið "Skógarøki" seinni í hesum kapitlinum.

## Úrslit

Í PISA 2025 er støddfrøði ikki høvuðsøkið, og tí er grundarlagið fyri nágreiniligum greiningum av ymiskum pørtum av støddfrøðiliga lesførinum avmarkað. Í hesum kapitli verður dentur lagdur á miðal PISA-stig, gongdina í føroysku úrslitunum yvir tíð og samanberingar við hini Norðurlondini, OECD-miðaltalið og onnur luttakandi lond. Harumframt verður býtið av næmingum á førleikastiganum lýst við serligum denti á lág og høg avrik, og hugt verður at muninum millum gentur og dreingir.

## Miðal PISA-stig

Í PISA 2025-kanningini fáa føroysku næmingarnir 452 PISA-stig í miðal í støddfrøði. Hetta eru 6 stig hægri enn í 2022, tá føroyska miðalúrslitið var 446 PISA-stig. Úrslitið í 2025 bendir sostatt á eina ávísa framgongd eftir stóru afturgongdina í 2022.

*Talva 4.1: Miðal PISA-stig yvir tíð.*

| Ár | OECD | Bretland | Svøríki | Noreg | Ísland | Finnland | Danmark | Føroyar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 501 | 495 | 502 | 490 | 506 | 548 | 513 | 450 |
| 2009 | 502 | 492 | 494 | 498 | 507 | 541 | 503 | 448 |
| 2012 | 499 | 494 | 478 | 489 | 493 | 519 | 500 | 468 |
| 2015 | 495 | 492 | 494 | 502 | 488 | 511 | 511 | 482 |
| 2018 | 496 | 502 | 502 | 501 | 495 | 507 | 509 | 491 |
| 2022 | 480 | 489 | 482 | 468 | 459 | 484 | 489 | 446 |
| 2025 | 469 | 488 | 464 | 452 | 450 | 469 | 471 | 452 |

Meðan føroyska miðalúrslitið hækkaði, gingu øll hini Norðurlondini aftur. Danmark fór úr 489 niður í 471 stig, Finnland úr 484 niður í 469, Svøríki úr 482 niður í 464, Noreg úr 468 niður í 452 og Ísland úr 459 niður í 450 stig. Sama gongd sæst í OECD-miðaltalinum, sum minkaði úr 480 PISA-stigum í 2022 niður í 469 í 2025. Føroyar eru sostatt einasta Norðurlandið, har miðalúrslitið er hægri í 2025 enn í 2022. Føroyska miðalúrslitið er tað sama sum tað norska, og fyri fyrstu ferð, síðani Føroyar fóru at luttaka í PISA, er tað hægri enn úrslitið hjá einum øðrum Norðurlandi, nevniliga Íslandi.




*Mynd 4.2: Miðal PISA-stig í støddfrøði yvir tíð.*

Hóast føroyska úrslitið er frægari enn í 2022, er støðið framvegis munandi lægri enn undanfarin ár. Í 2018 fingu føroysku næmingarnir 491 PISA-stig, og eru sostatt 39 stig á muni millum úrslitini í 2018 og 2025. Gongdin yvir tíð vísir, at føroyska úrslitið vaks úr 448 stigum í 2009 til 491 stig í 2018, áðrenn tað fall nógv í 2022. Úrslitið í 2025 merkir, at ein lítil partur av hesi afturgongdini er vunnin aftur, men Føroyar eru framvegis langt frá støðinum í 2018.

Í mynd 4.3 síggjast miðal PISA-stig í støddfrøði hjá londum í Evropa. Føroyska úrslitið er í niðaru helvtini millum hesi lond. Í hesi talvuni við evropeiskum londum eru eisini tikin við nøkur lond, sum liggja á markinum ella hava onnur tøtt sambond, ið gera, at tey ofta eru tikin við í evropeiskum hagtølum og OECD-samanbering. Hesi londini eru Turkaland, Georgia, Armenia, Kýpros og Kosovo.




*Mynd 4.3: Miðal PISA-stig í støddfrøði 2025 fyri Evropa. Í londum merkt við * hevur datainnsavningin ikki verið sambært leiðreglunum.*




*Mynd 4.4: Munur á miðal PISA-stigum millum 2025 og 2022. Føroyar eru merktar við reyðum stabba, OECD-miðal við gráum. Appilsingula økið vísir tey lond, har munurin ikki er hagfrøðiliga signifikantur. Av Norðurlondum var tað bert Danmark, sum hevði eina signifikanta afturgongd í 2025.*

## Hagfrøðilig óvissa

Tá hugt verður at broytingini frá 2022 til 2025, er týdningarmikið at taka hædd fyri hagfrøðiligari óvissu. Føroyska framgongdin er ikki hagfrøðiliga signifikant. Hetta merkir, at framgongdin er lítil í mun til óvissuna, sum er knýtt at mátingini og samanberingini av PISA-úrslitum millum árini. Av Norðurlondunum er tað bert Danmark, sum hevur eina hagfrøðiliga signifikanta broyting frá 2022 til 2025, og har er talan um afturgongd. Sí mynd 4.4, sum vísir mun á miðal PISA-stigum millum 2025 og 2022. Appilsingula økið vísir tey lond, har munurin ikki er hagfrøðiliga signifikantur.

## Kynsmunur

Í PISA 2025 fingu føroysku dreingirnir 457 PISA-stig í miðal, meðan genturnar fingu 448 stig. Dreingirnir fingu sostatt 9 stig fleiri enn genturnar. Hetta samsvarar væl við gongdina í undanfarnu PISA-kanningunum, tí dreingirnir hava fingið eitt hægri miðalúrslit enn genturnar í øllum kanningunum. Síðani 2009 hevur munurin verið lutfalsliga støðugur og ligið millum 8 og 10 PISA-stig.

*Talva 4.2: Úrslit í støddfrøði skift á kyn og ár. Øll árini hava dreingir havt flest stig.*

| | Miðal PISA-stig | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| 2006 | 450 | 449 | 451 | -2 |
| 2009 | 448 | 444 | 453 | -9 |
| 2012 | 468 | 464 | 472 | -8 |
| 2015 | 482 | 478 | 486 | -8 |
| 2018 | 491 | 486 | 496 | -10 |
| 2022 | 446 | 441 | 451 | -10 |
| 2025 | 452 | 448 | 457 | -9 |

Sama yvirskipaða mynstur sæst í hinum Norðurlondunum. Í 2025 fingu dreingirnir fleiri PISA-stig enn genturnar í øllum Norðurlondunum, men støddin á muninum var ymisk. Munurin var størstur í Danmark við 15 stigum og minstur í Finnlandi við 2 stigum.

*Talva 4.3: Úrslit í støddfrøði skift á kyn og Norðurland. Í 2025 fingu dreingir flest stig í øllum Norðurlondum.*

| | Miðal PISA-stig: Støddfrøði | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2025 | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **Munur millum gentur og dreingir** |
| Føroyar | 452 | 448 | 457 | -9 |
| Ísland | 450 | 444 | 456 | -12 |
| Finnland | 469 | 468 | 470 | -2 |
| Noreg | 452 | 449 | 455 | -6 |
| Svøríki | 464 | 463 | 465 | -2 |
| Danmark | 471 | 463 | 478 | -15 |

## Førleikastigin fyri støddfrøðiligt lesføri

Førleikastigin gevur eina meira nágreiniliga mynd av støddfrøðiliga lesførinum hjá næmingunum enn miðal PISA-stigið einsamalt. Stigin lýsir, hvat næmingar á ymiskum førleikastigum vanliga megna. Hann skal síggjast í sambandi við PISA-hugtakskarmin, sum lýsir støddfrøðiligt lesføri við støði í mannagongdum, støddfrøðiligum innihaldi, samanhangum og 21.-aldar-førleikum.

Førleikastigin, sum varð víðkaður í 2022 (OECD, 2023), hevur átta stig, ið ganga frá niðasta til hægsta stig í raðfylgjuni 1c, 1b, 1a, 2, 3, 4, 5 og 6. Niðara markið fyri hvørt stig vísir, hvussu nógv PISA-stig næmingarnir í minsta lagi skulu hava fyri at røkka viðkomandi førleikastigi. Næmingar, sum eru á einum ávísum stigi, verða mettir at megna tað, sum verður lýst á stigunum niðanfyri.

*Talva 4.4: Førleikastig lýst eftir førleika hjá nemingunum.*

| Førleikastig | Niðara mark | Prosent av nemingunum á hesum stigi ella hægri | Tað, nemingarnir vanliga megna |
|---|---|---|---|
| 6 | 669 | Føroyar 0,2% OECD-miðal 1,9% | Á stigi 6 megna nemingar at arbeiða við abstraktum trupulleikum og vísa kreativitet og smidliga hugsan fyri at menna loysnir. T.d. kunnu teir kenna aftur, tá ein mannagongd, ið ikki verður nevnd í eini uppgávu, kann verða brúkt í einum óvanligum samanhangi, ella tá neyðugt er at vísa djúpa fatan av einum støddfrøðiligum hugtaki sum part av einari grundgeving. Teir kunnu sambinda ymiskar upplýsingar, keldur og representatiónir, herundir munagóða nýtslu av simulatiónum og rokniarki sum pørtum av teirra loysn. Nemingar á hesum stigi megna kritiska hugsan og meistra støddfrøðiligt symbol- og reglufesti, sum teir brúka til neyvt at samskifta sína skilvísu hugsan víðari við. Teir megna at umhugsa, hvussu hóskandi teirra mannagongd er í mun til úrslitið og upprunaligu støðuna. |
| 5 | 607 | Føroyar 2,7% OECD-miðal 7,8% | Á stigi 5 kunnu nemingar menna og arbeiða við modellum av kompleksum støðum, har teir ásanna ella sjálvir seta avmarkingar og lýsa fortreytir. Teir kunnu velja systematiskar og væl skipaðar trupulleikaloysingarætlanir til at viðgera truplar uppgávur, sum t.d. at taka avgerð um, hvussu ein roynd skal mennast, at útvikla eina hóskandi mannagongd, ella at arbeiða við kompleksum visualiseringum, ið ikki eru givnar í uppgávuni. Nemingarnir vísa góðan førleika at loysa trupulleikar, har loysnir ofta krevja nýtslu av støddfrøðivitan, ið ikki er beinleiðis lýst í uppgávuni. Nemingar á hesum stigi umhugsa sítt arbeiði og støddfrøðilig úrslit í mun til samanhangin úr veruliga lívinum. |
| 4 | 545 | Føroyar 13,2% OECD-miðal 21,4% | Á stigi 4 kunnu nemingar arbeiða effektivt við neyvt lýstum modellum av kompleksum ítøkiligum støðum, onkuntíð við tveimum variablum, umframt at kunna arbeiða við ógreiðum modellum, ið teir úrleiða við at brúka eina framkomna telduliga hugsanartilgongd. Nemingar á hesum stigi byrja at fara í holt við aspekt av kritiskari hugsan sum t.d. at meta um, hvussu rímiligt eitt úrslit er, við at gera kvalitativar metingar, tá ið útrokningar ikki eru møguligar út frá givnum upplýsingum. Teir kunnu velja millum og tvinna saman ymiskar representatiónir av upplýsingum, harímillum symbolskar ella grafiskar representatiónir, og sambinda tær beinleiðis til aspekt av støðum frá veruliga lívinum. Á hesum stigi kunnu nemingar eisini skapa og samskifta frágreiðingar og grundgevingar við støði í teirra tulkingum, skilvísu hugsan og háttalagi, víðari. |
| 3 | 482 | Føroyar 35,0% OECD-miðal 42,1% | Á stigi 3 kunnu nemingar finna upp á mannagongdir til at loysa uppgávur, harímillum mannagongdir, ið krevja eina røð av avgerðum ella smidleika í at skilja hugtøk, ið líkjast. Á hesum stigi byrja nemingar at brúka telduligar hugsanarførleikar til at menna sínar mannagongdir til at loysa uppgávur. Teir eru førir fyri at loysa uppgávur, ið krevja, at fleiri ymiskar vanaútrokningar, ið ikki eru neyvt lýstar í uppgávuorðingini, verða gjørdar. Teir kunnu brúka rúmliga ímyndan sum ein part av einari loysingarmannagongd ella avgera, hvussu ein simulatión skal brúkast til at samla dátur, ið eru hóskandi í mun til uppgávuna. Nemingar á hesum stigi kunnu tulka og nýta representatiónir við støði í ymiskum upplýsingarkeldum og hugsa skilvíst við beinleiðis støði í hesum upplýsingum, harímillum taka treytaðar avgerðir við at brúka eina tvívegis talvu. Teir vísa typiskt eitt sindur av førleika til at viðgera prosent, brot og desimaltøl umframt at kunna arbeiða við lutfalsrokning. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2 | 420 | Føroyar 64,6%<br><br>OECD-miðal 65,1% | Á stigi 2 kunnu næmingar kenna aftur støður, har teir noyðast at sniðgeva einfaldar mannagongdir til at loysa trupulleikar, harímillum at gjøgnumføra einfaldar simulatiónir, ið innihalda ein variabul sum part av loysingarmannagongdini. Teir kunnu taka upplýsingar, sum hava týdning, úr einari ella fleiri upplýsingarkeldum, sum gera brúk av heldur kompleksum representatiónsformum, sum t.d. tvívegis tabellir, talvur ella tvey-dimensjónellar representatiónir av 3-dimensjónellum lutum. Næmingar á hesum stigi vísa grundleggjandi fatan av funktionellum samanhangum og kunnu loysa trupulleikar, ið viðvíkja einføldum lutfalli. Teir eru førir fyri at gera beinleiðis tulkingar av úrslitum. |
| 1a | 358 | Føroyar 88,2%<br><br>OECD-miðal 84,7% | Á stigi 1a kunnu næmingar svara spurningum, sum snúgva seg um einfaldar samanhangir, har allar upplýsingar av týdningi eru givnar, og spurningarnir eru nágreiniliga skilmarkaðir. Upplýsingar kunnu verða givnir í ymiskum, men einføldum, sniði, og næmingar kunnu verða noyddir til at arbeiða við tveimum upplýsingarkeldum samstundis fyri at fáa fatur á upplýsingum av týdningi. Teir eru førir fyri at gjøgnumføra einfaldar vanamannagongdir samsvarandi beinleiðis boðum í ítøkiligum støðum, sum onkuntíð kunnu krevja fleiri endurtøkur av einari vanamannagongd fyri at loysa ein trupulleika. Teir kunnu útinna gerðir, sum eru sjálvsagdar ella krevja sera avmarkaða samanrenning av upplýsingum, men í øllum støðum fylgja gerðirnar beinleiðis av givnari tilskundan. Næmingar á hesum stigi kunnu brúka grundleggjandi algoritmur, formlar, mannagongdir ella reglur fyri at loysa uppgávur, sum aloftast viðvíkja heilum tølum. |
| 1b | 295 | Føroyar 98,2%<br><br>OECD-miðal 96,1% | Á stigi 1b kunnu næmingar geva svar til spurningar, ið viðvíkja lættskilligum samanhangum, har allar upplýsingar av týdningi eru greitt givnar í einari einfaldari representatión (t.e. talvu ella grafiskt) og, tá neyðugt er, at kenna tað aftur, tá onkur upplýsing er óviðkomandi og kann verða ikki tikin við í mun til ávísan uppgávuspurning. Teir megna at útinna einfaldar útrokningar við heilum tølum, ið fylgja frá greiðum beinleiðis boðum, sum eru lýst við stuttum teksti við einfaldum setningsbygnaði. |
| 1c | 233 | Føroyar 99,9%<br><br>OECD-miðal 100,0% | Á stigi 1c kunnu næmingar geva svar til spurningar, ið viðvíkja lættskilligum samanhangum, har allar upplýsingar av týdningi eru greitt givnar í einum einføldum og kendum sniði (t.d. ein lítil talva ella eitt bílæt) og lýst í einum sera stuttum teksti við einfaldum setningsbygnaði. Teir megna at fylgja greiðum boðum, ið lýsa eina einstaka gerð. |

Prosenttølini í talvu 4.4 eru uppsavnað. Tað merkir til dømis, at parturin á stigi 3 fevnir um allar næmingar, sum eru á stigi 3 ella hægri.

Føroyska miðalúrslitið á 452 PISA-stigum merkir, at føroyskir næmingar í miðal eru á førleikastigi 2. Í 2025 eru 64,6% av næmingunum á stigi 2 ella hægri, meðan 35,4% eru undir stigi 2. Stig 2 verður í PISA nýtt sum eitt grundleggjandi minstamark fyri tað støddfrøðiliga lesførið, sum krevst fyri at kunna taka virknan lut í nútíðarsamfelagnum (OECD, 2023).

Samanborið við 2022 er ein lítil bati at síggja. Tá vóru 37,1% av føroysku næmingunum undir stigi 2 samanborið við 35,4% í 2025. Støðan er tó framvegis langt frá 2018, tá bert 12% av næmingunum vóru undir stigi 2.




*Mynd 4.5: Prosentpartur av næmingunum eftir førleikastigi í støddfrøði.*

Verður hugt at einstøku førleikastigunum í 2025, er størsti bólkurin á stigi 2, har 29,6% av næmingunum eru.

Samanborið við OECD-miðaltalið er parturin á stigi 2 ella hægri nærum tann sami. 64,6% í Føroyum og 65,1% í OECD-londunum í miðal. Tó eru færri føroyskir næmingar á teimum hægru førleikastigunum. Í Føroyum eru 10,6% av næmingunum á stigi 4 og 2,5% á stigi 5, meðan samsvarandi OECD-tøl eru 13,6% og 5,9%.

Í norðurlendsku samanberingini hava Føroyar størsta partin av næmingum undir stigi 2, 35,4%. Munurin er tó ikki stórur samanborin við Noreg, har 33,6% eru undir stigi 2, ella við Ísland, har parturin er 33,0%. Í Svøríki, Finnlandi og Danmark er parturin undir stigi 2 lægri. Eisini á teimum hægstu førleikastigunum liggja Føroyar lutfalsliga lágt samanbornar við flestu hini Norðurlondini.

*Talva 4.5: Prosentpartur av næmingum eftir førleikastigi í Norðurlondum.*

| **Støddfrøði** | **Stig 1c og minni** | **Stig 1b** | **Stig 1a** | **Stig 2** | **Stig 3** | **Stig 4** | **Stig 5** | **Stig 6** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **%** | **%** | **%** | **%** | **%** | **%** | **%** | **%** |
| Føroyar | -1,9 | -9,9 | -23,6 | 29,6 | 21,7 | 10,6 | 2,5 | 0,2 |
| Noreg | -1,8 | -10,2 | -21,6 | 27,4 | 23,8 | 11,8 | 3,0 | 0,4 |
| Ísland | -1,4 | -9,2 | -22,4 | 29,9 | 23,7 | 11,0 | 2,3 | 0,2 |
| Svøríki | -1,5 | -8,4 | -19,5 | 26,7 | 24,4 | 14,5 | 4,5 | 0,5 |
| Finnland | -1,1 | -6,8 | -18,8 | 27,2 | 29,1 | 14,9 | 3,8 | 0,4 |
| Danmark | -0,8 | -5,2 | -17,9 | 29,4 | 29,2 | 14,1 | 3,1 | 0,2 |




*Mynd 4.6: Prosentbýtið av næmingum á førleikastigi 2 ella hægri og undir stigi 2; bert Norðurlond víst.*

Samanumtikið vísir býtið á førleikastiganum ein lítlan bata frá 2022, men framvegis er meira enn triði hvør føroyskur næmingur undir grundleggjandi minstamarkinum. Samstundis eru lutfalsliga fáir næmingar á teimum hægstu førleikastigunum. Avbjóðingin er tí bæði at fáa fleiri næmingar upp um stig 2 og at fáa fleiri at røkka teimum hægru førleikastigunum.

## Gongdin í støddfrøðiligum lesføri

Úrslitið í PISA-støddfrøði 2025 gevur orsøk til varligt bjartskygni. Føroysku næmingarnir fáa 452 PISA-stig í miðal, 6 stig fleiri enn í 2022.

Sæð í ljósinum av gongdini í hinum Norðurlondunum er føroyska úrslitið lutfalsliga jaligt. Føroyar eru einasta Norðurlandið, har miðalúrslitið hækkar frá 2022 til 2025, meðan OECD-miðaltalið og øll hini Norðurlondini ganga aftur, og í fleiri londum er afturgongdin munandi. Hóast føroyska framgongdin ikki er hagfrøðiliga signifikant, bendir úrslitið á, at Føroyar hava hildið støðinum betur enn hini Norðurlondini í hesum tíðarskeiðinum.

Eisini sæst ein lítil bati á førleikastiganum. Í 2025 eru 64,6% av føroysku næmingunum á stigi 2 ella hægri, samanborið við 62,9% í 2022. Framvegis er tó meira enn triði hvør næmingur undir minstamarkinum fyri støddfrøðiligt lesføri. Samstundis eru lutfalsliga fáir næmingar á teimum hægstu stigunum.

Í kjalarvørrinum á PISA 2022 eru fleiri av tilmælunum frá táverandi frágreiðing fylgd upp. Námsvísindadeildin hevur í samstarvi við Nám og Undirvísingarstýrið og við stuðli frá Mentamálaráðnum sett í verk menningarverkætlanina “Støddfrøði í verki”, sum skal menna modelleringsførleikan hjá næmingum, undirvísingartilfar og førleikarnar hjá lærarum. Harumframt eru nýggjar námsætlanir settar í gildi, har støddfrøðiligir førleikar, herundir modelleringsførleiki, eru nevndir sum lærumál.

Tað ber ikki til við støði í PISA 2025 at staðfesta, at hesi átøk hava elvt til framgongdina. Úrslitini geva tó eina varliga ábending um, at gongdin eftir veika úrslitið í 2022 vendir rætta vegin. Tí er týdningarmikið at halda fast í og byggja víðari á tað menningararbeiðið, sum er sett í verk.

## Tilmæli

Høvuðstilmælið er at byggja víðari á verandi átøk og tryggja, at tey verða rótfest í vanligu støddfrøðiundirvísingini. Serliga verður mælt til:

- at halda fram við og víðka støddfrøði í verki
- at stuðla lærarum í at seta nýggju námsætlanirnar í verk
- at tryggja, at støddfrøðilig modellering og talgild støddfrøðilig amboð verða regluligir partar av undirvísingini
- at lata uppgávur, eftirmetingar og próvtøkur endurspegla støddfrøðiligar førleikar
- at hava fokus bæði á næmingar undir stigi 2 og á at fáa fleiri næmingar upp á hægri førleikastig
- at fylgja átøkunum við gransking og eftirmeting.

## Uppgávudømi

Nakrar uppgávur, sum næmingarnir hava møtt í kanningini verða leysgivnar sum uppgávudømi,[1] tá støddfrøði er høvuðsøkið (OECD, 2023). Av tí at støddfrøði ikki er høvuðsøkið hesaferð, er eingin nýggj støddfrøðiuppgáva leysgivin. Í næsta broti eru tveir spurningar, ið vóru við í PISA 2022-frágreiðingini, endurgivnir.

---

1 Sí allar leysgivnar PISA-uppgávur á https://www.oecd.org/en/about/programmes/pisa/pisa-test.html

## Skógarøki

Mynd 4.7 vísir innleiðingina, sum næmingarnir fáa til uppgávuna Skógarøki.




*Mynd 4.7: Innleiðing til uppgávuna Skógarøki.*

Innleiðingin gevur næmingunum nakrar upplýsingar um uppgávusamanhangin, sum er, at mongdin av skógarøki í einum landi kann broytast við tíðini. Eisini verður greitt frá, at rokniark skal nýtast til at loysa uppgávuna.

Aftaná skulu næmingarnir venja seg í at brúka rokniarkið. Sí mynd 4.8.




*Mynd 4.8: Vegleiðing til samvirkna rokniarkið.*

Næmingarnir fáa vegleiðing í, hvussu teir brúka amboðini í rokniarkinum til tríggjar gerðir:

1. At skipa teigar (da. kolonner) í fallandi raðfylgju.
2. At rokna (leggja saman, trekkja frá, falda ella dividera) við dátum frá tveimum teigum.
3. At finna miðaltalið av einum teigi.

Ikki fyrrenn næmingarnir hava fullført hesar tríggjar gerðir, kunnu teir fara víðari í uppgávuni til fyrsta spurning (sí mynd 4.9).




*Mynd 4.9: Spurningur 1 í uppgávuni Skógarøki.*

Næmingarnir kunnu altíð fara til vegleiðingina fyri, hvussu rokniarkið kann brúkast, við at trýsta á bjálkan "Soleiðis brúkar tú rokniarkið".

Dáturnar, sum skulu viðgerast í hesari uppgávuni, er mongdin av skógarøki sum prosentpartur av samlaða landøkinum í 15 londum í árunum 2005, 2010 og 2015. Hesar dátur eru fastlæstar í teigunum B, C og D. Teigarnir E, F og G eru tómir, tá næmingarnir byrja upp á uppgávuna, og londini eru skipað í alfabetiskari raðfylgju.

Í fyrsta spurningi verða næmingarnir bidnir um at eyðmerkja, hvørji trý lond í tíðarskeiðnum millum 2005 og 2015 høvdu ávikavist størstan vøkstur í prosentstigum, onga broyting samanlagt ella størstu minking í prosentstigum.

Ein loysingarháttur er trekkja teig D frá teigi B, sum viðførir, at prosentigið av skógarøki í 2005 verður trekt frá prosentstiginum av skógarøki í 2015 fyri øll lond. Úrslitið gerst sjónligt í teigi E. Síðani kann næmingurin velja at skipa teig E í fallandi raðfylgju fyri lættari at eyðmerkja londini, ið tað verður spurt eftir í fyrsta spurningi. Rætta svarið er, at landið við størsta vøkstri í prosentstigum er Grikkaland (2,34), meðan Armenia onga broyting hevði samanlagt (0,0), og Panama hevði størstu minking í prosentstigum (-2,22).

Fyri at fáa fult rætt svar skulu næmingar eyðmerkja øll trý londini rætt. Hetta verður mett sum ein trupul spurningur, og fult rætt svar hoyrir til førleikastig 5. Partvíst rætt svar verður givið, um næmingurin eyðmerkir tvey lond rætt, og svarar tað til førleikastig 4.

*Talva 4.6: Upplýsingar um fyrsta spurning í uppgávuni Skógarøki.*

| | |
|---|---|
| Uppgávunavn | Skógarøki – CMA161Q01 |
| Støddfrøðiligt innihaldsøki | Sannlíkindi og hagfrøði |
| Mannagongd | Orða |
| Samanhangur | Samfelagsligur |
| Uppgávuslag | Samansett fleirvala-uppgáva (en. multiple choice) – automatisk teldugreining |
| Svar | Fult rætt svar: Øll lond eyðmerkt rætt<br>Partvíst rætt svar: Tvey lond eyðmerkt rætt |
| Førleikastig | 5 (fult rætt svar)<br>4 (partvíst rætt svar) |




*Mynd 4.10: Spurningur 2 í uppgávuni Skógarøki.*

Í spurningi 2 verða næmingar bidnir um at umhugsa dáturnar í mun til tvey tíðarskeið – 2005 til 2010 og 2010 til 2015 – og síðani bidnir um at eyðmerkja útsøgnina, ið rætt lýsir miðalbroytingina av prosentpartinum av skógarøki í báðum tíðarskeiðunum.

Ein loysingarháttur er at finna miðaltalið av teigunum B, C og D (tað blívur ávíkavist 33,33; 33,18 og 33,05) og leggja til merkis, at miðaltalið fellur frá 2005 til 2010 (frá 33,33 til 33,18), og at tað eisini fellur frá 2010 til 2015 (frá 33,18 til 33,05). Tað vil siga, at miðalbroytingin er negativ í báðum tíðarskeiðunum.

Fyri at fáa rætt svar skulu næmingarnir tí velja røttu útsøgnina. Hetta veður mett sum ein trupul spurningur, ið svarar til førleikastig 5.

*Talva 4.7: Upplýsingar um næsta spurning í uppgávuni Skógarøki.*

| | |
|---|---|
| Uppgávunavn | Skógarøki – CMA161Q02 |
| Støddfrøðiligt innihaldsøki | Sannlíkindi og hagfrøði |
| Mannagongd | Tulka/eftirmeta |
| Samanhangur | Samfelagsligur |
| Uppgávuslag | Einføld fleirvala-uppgáva (en. *multiple choice*) – automatisk teldugreining |
| Svar | Miðalbroytingin fyri bæði tíðarskeiðini var negativ |
| Førleikastig | 5 |

# Kapittul 5: Næmingarnir og umhvørvið

Ungdómar kring heimin eru vitni til sera fløktar umhvørvisligar avbjóðingar, sum teir eru noyddir at fyrihalda seg til og út frá tí eisini at umhugsa, hvussu ein meira burðardygg framtíð kann skipast, og hvat teirra íkast til hetta kann vera. Hetta kann síggjast bæði í ítøkiligum átøkum umhvørvinum at frama, og í hvørjari starvsleið tey ætla at fylgja.

Til at máta hetta verður í PISA-kanningini 2025 brúktur ein leistur, sum byggir á eina heildarfatan av, hvussu næmingar kunnu mennast til virknar luttakarar í arbeiðinum fyri einari burðardyggari framtíð. Í staðin fyri bert at máta fakligan kunnleika verður hugt at fleiri samanhangandi tættum, sum tilsamans lýsa næmingans virkna leiklut í umhvørvismálum.

Mynd 5.1 vísir hugtaksliga leistin, sum PISA byggir á til at kanna umhvørvisstøði. Hann fevnir um tríggjar høvuðstættir hjá næmingunum umframt ein skúlatengdan tátt. Fyrsti táttur er *førleiki í umhvørvisvísindum*, sum verður lýstur við næmingaúrslitum í umhvørvisvísindum. Annar tátturin er *hugburður til umhvørvið,* sum fevnir um umhvørvismedvit, trúgv á egnan førleika at skapa broytingar til frama fyri umhvørvið og trúgv á, at felags átøk kunnu gera mun. Triði tátturin er *áhugi og ábyrgdarkensla fyri umhvørvinum,* sum kemur til sjóndar bæði í luttøku í umhvørvisverjandi tiltøkum og í áhuga fyri einari framtíðar-starvsleið innan umhvørvisøkið.

Hesir tríggir tættirnir mennast tó ikki av sær sjálvum. Teir byggja á teir møguleikar, sum skúlin gevur næmingunum at arbeiða við umhvørvismálum. PISA leggur tí eisini dent á *møguleikarnar í skúlanum at styrkja virknan leiklut hjá næmingunum,* fyrst og fremst gjøgnum undirvísing og læring um umhvørvið. Hetta fevnir um, hvussu ofta næmingar fáa høvi at kjakast um umhvørvisavbjóðingar, at kanna og granska umhvørvisevni, og at fara á útferðir og arbeiða við uppgávum, har umhvørvið er í miðdeplinum.

Samanlagt geva hesir fýra tættirnir eina heildarmynd av, hvussu skúlaskipanir kunnu menna næmingar, ið bæði hava neyðugan kunnleika, ein jaligan hugburð og vilja taka virknan lut í arbeiðinum fyri einum burðardyggum samfelagi.




*Mynd 5.1: Leisturin, sum PISA 2025 hevur brúkt at kanna virkisførleikan hjá næmingum til umhvørvisviðurskifti.*

## Førleiki í umhvørvisvísindum: Næmingaúrslit í umhvørvisvísindum

Í PISA 2025 vórðu umhvørvisvísindi tikin við í náttúruvísindaligu royndini, og ein stigi at máta umhvørvislesføri (en. *environmental literacy*) hjá næmingum er mentur, sum skal máta, hvussu væl næmingarnir megna at:

- greiða frá avleiðingunum av samspælinum millum menniskju og skipanirnar hjá náttúru og jarðarknøtti *(førleiki 1)*,

- taka grundaðar avgerðir um at virka við støði í meting av ymiskum ábendingum og frágreiðingum og við at nýta skapandi og skipanarliga hugsan til at verja umhvørvið *(førleiki 2)*, og
- vísa vón og virðing fyri ymiskum sjónarmiðum í arbeiðinum at finna loysnir á sosio-vistfrøðiligum kreppum *(førleiki 3)*.

Ein stigi fyri umhvørvisvísindi varð mentur við støði í einum úrvali av uppgávum úr náttúruvísindaligu PISA-royndini í 2025. Stigin byggir á innihaldsliga vitan, arbeiðshættir og vitanarfrøðiliga vitan í náttúruvísindaliga hugtakskarminum, sum hava greitt tilknýti til umhvørvis- og vistfrøðiligar spurningar. Av tí at náttúruvísindaliga royndin fyrst og fremst mátar kognitivar førleikar, kunnu bert førleiki 1 og førleiki 2 mátast við royndaruppgávunum.

Fyri at fáa eina breiðari mynd av umhvørvisførleikanum hjá næmingunum vórðu aðrir tættir kannaðir í næmingaspurnablaðnum. Hesir spurningarnir eru ætlaðir at stuðla teimum kognitivu mátingunum við at lýsa hugburð, hugsanarhættir og avgerðargongdir, sum hava týdning í sambandi við umhvørvisligar og sosial-vistfrøðiligar avbjóðingar.

Miðalúrslitið í umhvørvisvísindum var 480 stig í OECD-londunum. Mynd 5.2 vísir miðalúrslitið hjá hvørjum landi og búskaparøki, har tað eisini sæst, at Føroyar liggja undir miðal, og at Norðurlond liggja rættiliga spjadd, tá tað snýr seg um lesføri í umhvørvisvísindum.




*Mynd 5.2: Miðalúrslit í umhvørvisvísindum. Føroyar eru vístar við reyðum stabba; Norðurlond við bláum stabbum og Írland og Bretland við grønum stabbum.*

Í Norðurlondum, eins og í Føroyum, megna genturnar sum heild betur at fyrihalda seg til umhvørvisvísindi enn dreingirnir. Tað er tó ymist, hvussu stórur munurin er; størstur er hann í Finnlandi og minstur í Danmark. Føroyski munurin í lesføri í umhvørvisvísindum líkist rættiliga nógv tí norska (talva 5.1).

| | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark | Miðal, Norðurlond |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Gentur | 454 | 436 | 516 | 477 | 484 | 473 | 490 |
| Dreingir | 441 | 431 | 488 | 462 | 476 | 470 | 473 |
| Miðal fyri landið | 447 | 433 | 502 | 469 | 485 | 472 | 482 |
| Munur G-D | 13 | 5 | 28 | 15 | 8 | 3 | 17 |

*Talva 5.1: Lesføri innan umhvørvisvísindi eftir kyni og í Norðurlondum.*

Førleikin í umhvørvisvísindum er eisini uppgjørdur í førleikastigum við sama uppbýti, sum er brúkt til náttúruvísindi, og í mynd 5.3 sæst, at Føroyar liggja undir miðal. Londini standa í raðfylgju alt eftir, hvussu stórur partur av næmingunum ikki rakk upp á tað, OECD kallar „virkisført lesføri“. Virkisført lesføri verður nevnt stig 2. Í hesum føri vóru tað 35% av føroysku næmingunum, sum ikki rukku upp á stig 2; 32% av næmingum vóru á stigi 2; 22% á stigi 3; og knapt 10% vóru á stigi 4. Eins og í náttúruvísindum rukku sera fáir næmingar hægri enn stigi 4 í lesføri í umhvørvisvísindum, sum eisini sæst á mynd 5.3.




*Mynd 5.3: Førleikastig í umhvørvisvísindum, roknað eftir sama stiga sum í náttúruvísindum.*

## Hugburður til umhvørvið: Umhvørvismedvit

Fyri at máta umhvørvismedvitið vórðu næmingarnir bidnir sjálvir at meta um, hvussu væl teir kendu seks ymisk umhvørvisevni. Teir kundu svara við at velja svar á einum stiga við fýra møguleikum, eins og víst í talvu 5.2.

Í miðal í OECD-londunum svaraðu meira enn 30% av næmingunum, at teir kendu væl til avleiðingarnar av plastdálking og vóru førir fyri at greiða væl frá teimum. Næstan 30% søgdu tað sama um útrudding av plantum og dýrum. Føroysku tølini fyri hesar báðar spurningarnar vóru ikki heilt ólík teimum í OECD.

OECD ger vart við, at kunnleikin um onnur umhvørvisviðurskifti er nógv minni enn um plastdálking og útrudding av sløgum. Til dømis metti bert umleið ein av tíggju næmingum (12%) í OECD seg at vera føran fyri at greiða væl frá um kjarnorkuburturkast. Føroysku tølini vóru uppaftur lægri (7%). Ein av spurningunum var um vatntrot, og hetta fyribrigdið tykist vera heilt ókent hjá føroyskum næmingum, har útvið helvtin (47%) segði seg ikki hava hoyrt um hetta.

Umhvørvismedvitið er ymiskt í ymsum londum og búskaparøkjum (mynd 5.4).




*Mynd 5.4: Umhvørvismedvit hjá næmingunum eftir landi/búskapi. Myndin er grundað á sjálvsmeting hjá næmingunum, tá teir eru spurdir um teirra vitan um seks evni (sí talvu 5.2). Lond og búskapir eru skipað í vaksandi raðfylgju sambært miðaltølunum fyri næmingasvarunum fyri hvørt land/búskap. Myndin vísir, at Føroyar og lutvíst eisini Ísland eru á nógv lægri stigi enn okkara grannalond. Reyður stabbi er Føroyar; bláir stabbar eru Norðurlond, og grønir stabbar eru Bretland og Írland.*

| | Eg havi ongantíð hoyrt um hetta | | Eg havi hoyrt um hetta, men eg hevði ikki verið før/ur fyri at greitt frá, hvat hetta í roynd og veru snýr seg um | | Eg veit eitt sindur um hetta og kundi greitt yvirskipað frá tí | | Eg kenni til hetta og hevði kunnað greitt væl frá tí | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Miðaltøl** | **OECD** | **Føroyar** | **OECD** | **Føroyar** | **OECD** | **Føroyar** | **OECD** | **Føroyar** |
| **Avleiðingar av plastdálking** | 6 | 9 | 18 | 15 | 44 | 42 | 33 | 35 |
| **At plantur ella djór doyggja út** | 6 | 7 | 19 | 20 | 45 | 48 | 30 | 26 |
| **Avleiðingarnar av at rudda skógir burtur fyri at nýta jørðina øðrvísi** | 10 | 20 | 23 | 28 | 41 | 34 | 26 | 18 |
| **Vatntrot** | 8 | 47 | 24 | 35 | 43 | 14 | 25 | 4 |
| **Økingina av vakstrarhúsgassum í atmosferuni** | 15 | 37 | 28 | 33 | 36 | 21 | 21 | 9 |
| **Kjarnorkuburturkast** | 14 | 27 | 41 | 42 | 33 | 24 | 12 | 7 |

*Talva 5.2: Umhvørvismedvit greinað eftir áskoðan á egna vitan um ávís umhvørvisviðurskifti. Tølini eru prosent av næmingum, sum hava valt teir ymsu valmøguleikarnar til útsagnirnar, har OECD-miðal og føroysku miðaltølini eru víst. Tað tykist, sum tað bert er spurningurin um at plantur og djór doyggja út, sum tey kenna til á sama støði sum í øðrum londum. Hesir spurningarnir eru grundarlagið undir indeksinum av umhvørvismedviti, sum er víst í myndini omanfyri, har Føroyar vísa seg at vera millum londini við minst umhvørvismedviti (mynd 5.4).*

## Hugburður til umhvørvið: Trúgv á egnan førleika at skapa broytingar til frama fyri umhvørvið

Í miðal í OECD-londunum svaraðu meira enn 80% av næmingunum, at teir vóru samdir ella púra samdir í, at felags átøk kunnu loysa umhvørvistrupulleikar, og at teir sjálvir kunnu hava eina jaliga ávirkan á umhvørvið. Harumframt vórðu tríggir av hvørjum fýra næmingum samdir ella púra samdir í útsøgnini: „*At ansa eftir alheims-umhvørvinum er týdningarmikið fyri meg (talva 5.3).*" Í 42 londum og búskaparøkjum vóru meira enn 80% av næmingunum samdir í hesi útsøgnini. Eisini í teimum londunum, har undirtøkan var lægst, svaraði meira enn helvtin av næmingunum, at tað hevur týdning fyri teir at verja umhvørvið. Her er vert at leggja til merkis, at av Norðurlondum var tað bara Ísland, sum hevði eitt hægri virði enn OECD-miðal, so Norðurlond liggja rættiliga lágt, tá tað snýr seg um at ansa eftir alheims-umhvørvinum. Av Norðurlondum lógu Føroyar lægst.

Hinvegin vóru færri næmingar, sum mettu seg vita, hvussu tey kunnu samstarva við onnur fyri at røkka jaligum úrslitum fyri umhvørvið. Eisini á hesum økinum var stórur munur millum lond og búskaparøki, har talið av næmingum, sum vóru samdir í hesi útsøgnini, var úr 48% upp í 90%. Serliga Føroyar og Danmark lógu lágt her við bara gott helvtini, sum segði seg vita, hvussu tey kunnu samstarva til gagns fyri umhvørvið.

Samanumtikið er stórur munur millum lond og búskaparøki, tá ið hugt verður at sannføringini hjá næmingunum um, at teir kunnu vera við til at skapa jaligar broytingar fyri umhvørvið (mynd 5.5). Trúgvin á egnan førleika at skapa broytingar er tætt knýtt at vónini um, at tað ber til at skapa eina framtíð, sum er verd at arbeiða fram ímóti (White o.fl., 2023). Føroyar liggja í niðara enda í mun til at trúgv á, hvat vit kunnu gera sjálvi; av Norðurlondum liggur bert Danmark lægri. Samstundis vísa føroysku úrslitini eina trúgv uppá, at samstarv er vegurin fram; 89% av svararunum hildu, at um fólk arbeiða saman, so kunnu vit loysa umhvørvisviðurskifti. Hetta er nógv hægsta virðið í Norðurlondum og væl hægri enn OECD-miðal (talva 5.3).




*Mynd 5.5: Sannføring hjá næmingum um teirra førleikar at gera munagóð átøk til frama fyri umhvørvið, skipað eftir landi/búskapi.*

| % av næmingunum, sum eru antin samd/ir ella sera samd/ir í útsøgnunum niðanfyri | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark | OECD-miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eg veit, hvussu eg skal samstarva við onnur fyri at ávirka umhvørvið positivt | 56% | 78% | 70% | 64% | 69% | 58% | 68% |
| Eg veit, at tað er okkurt, sum eg kann gera fyri at ávirka umhvørvið positivt | 82% | 83% | 80% | 81% | 81% | 83% | 81% |
| Um fólk arbeiða saman, kunnu vit loysa umhvørvisviðurskifti | 89% | 85% | 80% | 81% | 84% | 79% | 82% |
| At ansa eftir alheims-umhvørvinum er týdningarmikið fyri meg | 67% | 84% | 63% | 68% | 72% | 57% | 75% |

*Talva 5.3: Prosentbýti av næmingum, sum eru samdir ella sera samdir um útsagnir um átøk eru gagnlig fyri umhvørvið.*

## Hugburður til umhvørvið: Trúgv á felags førleika at bøta um umhvørvið

Í miðal í OECD-londunum svaraðu umleið tveir ella fleiri av hvørjum trimum næmingum, at teir trúgva uppá, at felags átøk kunnu vera við til at loysa umhvørvistrupulleikar, sum vístir eru í talvu 5.6. Til dømis vóru 73% (OECD-miðal) av næmingunum samdir ella púra samdir í útsøgnini „*Eg vænti, at vit í samstarvi við nærsamfelagið kunnu átaka okkum ein týdningarmiklan leiklut, tá tað kemur til at ávirka umhvørvið positivt*“. Í Føroyum vóru 79% samd í hesum.

Trúgvin hjá næmingunum á felags førleikan at betra umhvørvið er sera ymisk frá landi til land og millum búskaparøki, sum víst í mynd 5.6. Flestu Norðurlond liggja undir OECD-miðal, tá tað snýr seg um táttin „trúgv á felags førleika at bøta um umhvørvið“.




*Mynd 5.6: Trúgv á máttin í felags umhvørvisvirksemi, skipað eftir landi/búskapi. Føroyar liggja lutfalsliga tætt við OECD-miðal.*

| | Sera ósamd/ur | | Ósamd/ur | | Samd/ur | | Sera samd/ur | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **OECD** | **Føroyar** | **OECD** | **Føroyar** | **OECD** | **Føroyar** | **OECD** | **Føroyar** |
| **Eg vænti, at vit í samstarvi við nærsamfelagið kunnu átaka okkum ein týdningarmiklan leiklut, tá tað kemur til at ávirka umhvørvið positivt** | 9 | 4 | 19 | 17 | 59 | 72 | 14 | 7 |
| **Eg vænti, at skúlin og nærumhvørvið kunnu vera við til at hava positiva ávirkan á alheims umhvørvisviðurskifti (t.d. veðurlagsbroytingar og endurskapan av búøkjum)** | 12 | 8 | 19 | 21 | 56 | 64 | 13 | 7 |
| **Eg vænti, at vit í samstarvi við skúlan kunnu minka um orkunýtsluna hjá skúlanum** | 10 | 5 | 22 | 25 | 54 | 62 | 14 | 8 |
| **Eg vænti, at vit í samstarvi við nærsamfelagið kunnu minka um nýtsluna av fossilum brennievnum** | 11 | 7 | 26 | 28 | 51 | 57 | 11 | 9 |

*Talva 5.4: Føroyskir næmingar taka sum heild undir við fatanini av, at tey í samstarvi við nærsamfelagið, nærumhvørvið og skúlan kunnu fremja eina jaliga broyting í sambandi við umhvørvisviðurskifti.*

## Hugburður til umhvørvið og úrslit í umhvørvisvísindum

Sambært OECD hava næmingar, sum hava ein jaligan hugburð til umhvørvið á einum øki, vanliga eisini ein jaligan hugburð á øðrum umhvørvisøkjum. Sterkasta sambandið sæst millum trúnna á felags førleika til at betra um umhvørvið og trúnna á egnan førleika at skapa jaligar broytingar. Eisini er ein greiður samanhangur millum umhvørvismedvit og hesar báðar fatanir.

Næmingar, sum fáa góð úrslit í umhvørvisvísindum, hava sum heild eisini ein jaligari hugburð til umhvørvið. Hetta sambandið sæst í nærum øllum londum og búskaparøkjum, sum luttaka í PISA 2025.

Sosialt og búskaparligt bakstøði hava eisini týdning. Næmingar við betri sosialum og búskaparligum fortreytum, og næmingar í skúlum við betri fortreytum, hava í miðal bæði jaligari hugburð til umhvørvið og betri úrslit í umhvørvisvísindum. Kortini eru sambondini millum hugburð og fakligu úrslit framvegis greið, eisini tá hædd verður tikin fyri hesum munum.

Sambondini kunnu skiljast á ymiskar hættir. Næmingar, sum hava góðan kunnleika til umhvørvið, eru helst meira tilvitaðir um týdningin av umhvørvismálum og hava tí ein jaligari hugburð. Hinvegin kann ein jaligur hugburður eisini økja um áhugan fyri at læra um umhvørvið og harvið styrkja fakligu førleikarnar. Úrslitini benda sostatt á, at vitan og hugburður ávirka hvørt annað og saman kunnu styrkja næmingsins virknu ábyrgd í umhvørvismálum.

## Virkin ábyrgd í umhvørvismálum: Luttøka í átøkum, sum verja umhvørvið (stuttsiktað)

Tátturin „Virkin ábyrgd fyri umhvørvinum" kannar, í hvønn mun næmingar umseta sína vitan og sín hugburð til ítøkiligar gerðir og hava varandi áhuga. Stuttsiktað snýr tað seg um, hvørt næmingar taka lut í gerandisligum tiltøkum, sum stuðla burðardygd. Meira langsiktað verður hugt at, um teir síggja fyri sær eina framtíðar-starvsleið, har teir kunnu vera við til at verja umhvørvið. PISA leggur dent á, at næmingar kunnu gera mun á ymiskan hátt, og at virkin ábyrgd snýr seg um at hava greið mál, halda fram við at arbeiða fyri teimum og laga seg til nýggjar avbjóðingar.

Millum tey fimm umhvørvisverjandi tiltøkini, sum PISA spurdi um, vóru tey vanligastu at tosa við familju og vinir um, hvussu ein kann verja umhvørvið og at velja vørur við atliti at burðardygd. Harumframt svaraðu nógv, at tey høvdu broytt matvanar fyri at minka um ávirkanina á umhvørvið. Hinvegin vóru tað lutfalsliga fá, sum høvdu skrivað um umhvørvismál á sosialum miðlum ella luttikið í friðarligum mótmælisgongum ella átøkum. Hetta mynstrið er galdandi fyri flestu lond, eisini Føroyar og hini Norðurlondini.

Hóast føroyskir næmingar taka undir við felags átøkum til frama fyri umhvørvið, so eru føroysku svarini væl lakari, tá tað snýr seg um at gera nakað ítøkiligt sjálvi, og í nógvum førum lægri enn í hinum Norðurlondunum (sí talvu 5.5, sum vísir prosenttølini fyri tey, sum **ongantíð** hava luttikið í nøkrum ávísum umhvørvisátøkum).

| % av næmingum, sum ongantíð seinasta árið hava luttikið í virksemi nevndum niðanfyri | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Luttikið í eini friðargongu ella mótmælisgongu um umhvørvisviðurskifti** | 87% | 60% | 87% | 82% | 88% | 82% |
| **Lagt tínar stúranir um umhvørvis-viðurskiti út á ein sosialan miðil** | 84% | 65% | 84% | 83% | 86% | 80% |
| **Keypt vørur við støði í, hvussu burðardyggar tær eru** | 61% | 50% | 49% | 59% | 53% | 48% |
| **Givin við at eta ávísar matvørur fyri at minka um umhvørvisárinini** | 73% | 66% | 72% | 72% | 67% | 68% |
| **Kjakast við vinir og familju um, hvussu tey kunnu ávirka umhvørvið positivt** | 48% | 43% | 43% | 46% | 45% | 35% |

*Talva 5.5: Prosentbýti av teimum svarum, har næmingarnir siga, at teir ongantíð seinastu 12 mánaðirnar hava luttikið í hesum umhvørvisgagnligu átøkunum. Írestandi næmingarnir søgdu í sínum svarum, at tey hava gjørt hetta antin eina ferð, nakrar ferðir ella ofta.*

## Orsakir til ikki at taka lut í umhvørvisverjandi tiltøkum

Millum teir næmingarnar, sum ikki høvdu tikið lut í nøkrum tiltøkum at verja umhvørvið, var vanligasta orsøkin, at teir ikki kendu nakran, sum var virkin í slíkum virksemi. Nógvir næmingar søgdu eisini, at teir væntaðu, at onnur fóru at loysa trupulleikarnar, ella at teir ikki hildu, at teirra egna íkast fór at gera nakran mun. Harumframt vóru tað nógv, sum søgdu seg ikki vita, hvussu tey kundu taka lut. Hetta er galdandi bæði í PISA-kanningini sum heild, og eisini tá bert verður hugt at Norðurlondum.

Nakrar orsakir til einki at gera, sambært næmingum í Norðurlondum, eru lýstar í talvu 5.5, og har sæst, at norðurlendsku næmingarnir vita ikki, hvat teir kunnu gera; teir vilja ikki gera tað einsamallir, og eisini sæst, at føroyskir næmingar, eins og teir donsku, vænta, at onnur loysa trupulleikan.

| % av næmingum sum eru **samdir** í hesum orsøkunum fyri **ikki** at hava luttikið í umhvørvisgagnligum átøkum | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eg visti ikki hvussu** | 58% | 49% | 30% | 38% | | 34% |
| **Eingin, sum eg kendi, luttók í virksemi at gagna umhvørvinum** | 74% | 61% | 52% | 58% | | 60% |
| **Eg hugsaði ikki, at tað, sum eg gjørdi, fór at gera mun** | 50% | 48% | 44% | 46% | | 53% |
| **Onkur annar fer at loysa trupulleikan** | 67% | 47% | 56% | 54% | | 63% |

*Talva 5.6: Prosenttøl við svarum, har næmingarnir eru samd/ir ella sera samd/ir um møguligar orsakir til, at tey seinasta árið ikki hava luttikið í virksemi, sum ávirkar positivt. Svensku næmingarnir hava ikki svarað hesum spurninginum.*

## Virkin ábyrgd fyri umhvørvinum: Væntanir um (ella áhugi fyri) starvsleið innan umhvørvisøkið (langsiktað)

Í PISA 2025 vórðu næmingar fyri fyrstu ferð spurdir, í hvønn mun teir høvdu áhuga í at arbeiða við umhvørvisvernd í sínum komandi yrki. Úrslitini vísa, at hetta er ein útbreidd framtíðarætlan hjá ungum kring heimin. Í nærum øllum londum og búskaparøkjum svaraði meirilutin av næmingunum, at teir í ávísan mun ella í stóran mun vóru áhugaðir í at arbeiða við umhvørvismálum í framtíðini.

Tó eru greiðir munir millum ymiskar næmingabólkar. Í næstan øllum londum vísa gentur størri áhuga enn dreingir fyri einari starvsleið, har tær kunnu vera við til at verja umhvørvið. Eisini er ein ávísur munur eftir sosialari og búskaparligari bakgrund, men hesin er munandi minni enn kynsmunurin.

Næmingar, sum ynskja at arbeiða við umhvørvisvernd í framtíðini, hava í miðal betri úrslit í umhvørvisvísindum og eisini í hinum PISA-økjunum – lesing, støddfrøði og náttúruvísindum. Harumframt hava teir gjøgnumgangandi størri umhvørvismedvit, sterkari trúgv á, at teir sjálvir og onnur saman kunnu gera mun, og ein jaligari hugburð til umhvørvið.

Samanlagt benda úrslitini á, at umhvørvisvernd er vorðin ein týðandi partur av framtíðarætlanunum hjá mongum ungum. Samstundis vísa tey, at ikki allir næmingar hava somu fortreytir fyri at gera hesar ætlanir til veruleika. Serliga hella gentur og næmingar við sterkum fakligum førleikum og jaligum hugburði til umhvørvið meira enn onnur til at síggja umhvørvisvernd sum ein part av síni komandi yrkisleið.

## Samanhangur millum førleika, hugburð og virkna ábyrgd hjá næmingunum

Úrslitini úr PISA 2025 vísa, at teir ymisku tættirnir í næmingsins virknu ábyrgd fyri umhvørvinum hanga tætt saman. Næmingar, sum taka lut í tiltøkum fyri at verja umhvørvið, hava eisini oftari áhuga í at arbeiða við umhvørvismálum í framtíðini. Somuleiðis hava teir gjøgnumgangandi størri umhvørvismedvit; eina sterkari trúgv á, at teir sjálvir og onnur saman kunnu gera mun og ein jaligari hugburð til umhvørvið enn næmingar, sum ikki taka lut í slíkum virksemi.

Sambandið millum virknu ábyrgdina og fakligu úrslitini í umhvørvisvísindum er hinvegin minni eintýtt. Í miðal í OECD-londunum hava næmingar, sum taka lut í umhvørvisverjandi tiltøkum, betri úrslit enn aðrir næmingar. Hetta mynstrið sæst tó bert í umleið helvtini av londunum og búskaparøkjunum, meðan onnur lond vísa veikari ella øvutan samanhang. Úrslitini benda tí á, at virkin ábyrgd og fakligur førleiki ofta fylgjast at, men at sambandið er ávirkað av øðrum viðurskiftum og er ymiskt frá landi til land.

## Næmingar, sum leggja dent á umhvørvið, men ikki taka virknan lut

Flestu næmingar, sum hava ein jaligan hugburð til umhvørvið, vísa eisini virkna ábyrgd í umhvørvismálum, annaðhvørt við at taka lut í tiltøkum at verja umhvørvið ella við at ynskja sær eina starvsleið í framtíðini, har teir kunnu arbeiða við umhvørvisvernd. Kortini er ein minni bólkur av næmingum, sum hóast jaligan hugburð ikki umsetir hendan hugburð til ítøkiligar handlingar ella framtíðarætlanir.

Tann greiðasti munurin sæst í undirvísingini. Næmingar, sum bæði hava ein jaligan hugburð og vísa virkna ábyrgd í umhvørvismálum, uppliva oftari, at umhvørvismál verða tikin upp í undirvísingini. Hetta bendir á, at skúlin kann hava ein týðandi leiklut í at hjálpa næmingum at umseta jaligan hugburð til virknan áhuga og handling.

## Møguleikar í skúlanum at styrkja virknan leiklut hjá næmingunum: Skúlamøguleikar at læra um umhvørvi og átøk

Skúlin hevur ein týðandi leiklut í at tryggja næmingunum umhvørvisligt lesføri og í at leggja gott støði undir teirra hugburð og tilknýti til umhvørvið. Hetta kann gerast við skipaðum virksemi kring umhvørvisviðurskifti.

Sum tað sæst í talvu 5.7, tykist skúlavirksemi sum heild, bæði í OECD sum heild og í Norðurlondum, at fara fram inni í skúlastovuni, heldur enn at farið verður aðrastaðni. Her eru Føroyar og Danmark oftari enn onnur uttan fyri flokshølið fyri at læra um umhvørvisviðurskifti. Hinvegin verður minni kjakast um umhvørvisviðurskifti í Føroyum enn í hinum londunum, eins og eisini minni verður kannað og granskað í umhvørvisviðurskiftum.

OECD vísir á, at tað eru stórir munir á næmingasvarunum millum ymsu londini og búskapirnar. Í ávísan mun er tað so, at næmingar í skúlum við avmarkaðum fíggjarligum umstøðum vístu á fleiri møguleikar at læra um umhvørvisviðurskifti enn næmingar í skúlum, sum fíggjarliga eru væl fyri. Á sama hátt vístu næmingar í skúlum „á bygd" á fleiri møguleikar fyri læru um umhvørvið enn næmingar í býarskúlum. Serliga hetta seinna kann vera viðkomandi hjá okkum í Føroyum, tí flestu skúlar liggja soleiðis fyri, at tað er stutt út at kanna umhvørvisviðurskifti. Tað er kanska orsøkin til, at vit í Føroyum eru tey, har næmingarnir í størstan mun eru samdir í útsøgnini um, at lærararnir gera útferðir við teimum fyri at kanna umhvørvisviðurskifti.

| % av næmingum, sum eru antin samd/ir ella sera samd/ir við útsøgnunum niðanfyri | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark | OECD-miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lærarin ger útferðir við okkum fyri at kanna umhvørvisviðurskifti** | 34% | 31% | 25% | 28% | 20% | 33% | 31% |
| **Í mínum flokki kjakast vit um loysnir upp á umhvørvisviðurskifti** | 38% | 50% | 45% | 49% | 50% | 52% | 44% |
| **Lærarin gevur okkum møguleika at granska í umhvørvisviðurskiftum** | 47% | 56% | 50% | 55% | 54% | 65% | 50% |
| **Mín vitan um umhvørvið verður tikin við í próvtølini** | 46% | 59% | 54% | 56% | 69% | 41% | 46% |

*Talva 5.7: Møguleikar fyri í skúlanum at læra um umhvørvi, skipað eftir undirvísingarslagi*




*Mynd 5.7: Møguleikar fyri í skúlanum at læra um umhvørvi, skipað eftir landi/búskapi. Hetta indeksið er gjørt út frá svarunum til spurningarnar, sum eru vístir í talvu 5.7 omanfyri, og er sostatt grundað á næmingasvarini um, hvussu ofta umhvørvisviðurskifti eru tikin við í undirvísing og eftirmeting. Føroyar og Finnland liggja beint við OECD-miðal, meðan hini Norðurlondini (myrkabláir stabbar) liggja eitt sindur hægri, og Bretland og Írland (grønu stabbarnir) liggja báðu megin við.*

Í talvu 5.8 síggja vit skúlaleiðarasvarini um, hvat skúlarnir gera fyri at arbeiða til frama fyri umhvørvinum. Her sæst, at skúlastjórarnir halda, at útferðir verða fyriskipaðar í minni mun, enn tey halda í hinum Norðurlondunum. Verður hetta samanborið við næmingasvarini í talvu 5.7, kann tykjast vera ein andsøgn, tí næmingasvarini bendu á, at vit gera hetta í størri mun enn í hinum Norðurlondunum. Hóast samsvar ikki er í prosenttølunum í svarunum til spurningin um, hvørt vitanin hjá næmingunum verður formliga eftirkannað, so liggja Føroyar lágt í svarunum hesum viðvíkjandi.

Skúlastjórarnir svaraðu eisini ítøkiliga um ymiskt virksemi, sum kann fremjast í skúlahøpi, og á summum økjum eru føroysku skúlarnir væl við, t.d. við ruddingardøgum og endurnýtsluskipanum, men á øðrum økjum eru vit als ikki komin í gongd, t.d. við at luttaka í altjóða átøkum at telja og eyðmerkja dýr og plantur í nærumhvørvinum, arbeiða saman við staðbundnum umhvørvisfelagsskapum ella foreldrabólkum, ella at fáa serfrøðingar inn á skúlarnar at greiða frá (talva 5.9).

| | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark | Norðurlond | OECD – NL | Onnur lond |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Í okkara skúla er undirvísing í umhvørvisviðurskiftum við í fleiri lærugreinum | 83% | 83% | 97% | 96% | 89% | | 91% | 87% | 96% |
| Okkara skúli skipar fyri útferðum, har næmingarnir kunnu kanna umhvørvisviðurskifti | 61% | 77% | 95% | 84% | 68% | 81% | 79% | 74% | 81% |
| Okkara skúli eggjar lærarum til at vísa eitthvørt ella gera royndir fyri at greiða frá umhvørvisviðurskiftum | 72% | 70% | 85% | 75% | 72% | 80% | 76% | 83% | 96% |
| Okkara skúli eggjar til at brúka eina røð av keldutilfari (t.d. dokumentarfilmar og greinir) til at kjakast um umhvørvisviðurskifti í flokkunum | 67% | 91% | 95% | 90% | 94% | 86% | 91% | 84% | 95% |
| Okkara skúli virkar fyri loysnum innan umhvørvisviðurskifti*) | 67% | 83% | 86% | 47% | 66% | 71% | 67% | 83% | 93% |
| Okkara skúli heldur formligar royndir fyri at kanna vitanina hjá næmingunum um umhvørvisviðurskifti | 11% | 57% | 48% | 63% | 77% | 31% | 58% | 67% | 88% |

*) Á enskum „My school promotes solutions to environmental issues“.

*Talva 5.8: Hvussu samd/ur ert tú í hesum útsøgnum? Fýra svarmøguleikar vóru: Sera ósamd/ur, Ósamd/ur, Samd/ur og Sera samd/ur. Prosentini í talvuni niðanfyri vísa samanløgdu tølini fyri tey, sum eru „samd“ ella „sera samd“ við útsagnirnar. Føroysku skúlastjórarnir svaraðu sum heild bert „samd/ur“, meðan býtið í hinum londunum ofta var 2:1 millum „samdur“ og „sera samdur“.*

| | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Danmark |
|---|---|---|---|---|---|
| At planta ein skúlaurtagarð | 17% | 12% | 7% | 12% | 22% |
| At taka lut í skipaðum næmingabólkum, sum fáast við umhvørvisviðurskifti | 11% | 19% | 35% | 11% | 24% |
| Ruddingardegi fyri allan skúlan ella nærsamfelagið | 44% | 32% | 35% | 55% | 44% |
| Endurnýtsluskipanum | 45% | 29% | 54% | 17% | 35% |
| Útferðum at kanna handfaring av burturkasti (eitt nú at kanna kloakering ella tyrving) | 7% | 7% | 19% | 7% | 27% |
| At lurta eftir innbodnum gestarøðarum við serfrøði í umhvørvisviðurskiftum (t.d. lívfrøðingum, umhvørvisvísindafólkum og/ella umhvørvisforsprákarum) | 0% | 3% | 10% | 3% | 17% |
| At taka lut í skipaðum umhvørvisskúlabólkum, har starvsfólk, næmingar, foreldur og onnur áhugað í nærsamfelagnum kunnu luttaka við burðardygd innan skúlaverkið fyri eyga | 0% | 13% | 18% | 4% | 12% |
| At kanna lívfrøðiligt margfeldi á skúlaøkinum, í lokalum viðarlundum og á frítíðarøkjum | 28% | 9% | 13% | 25% | 35% |
| At hátíðarhalda avrikið hjá skúlanum, tá ið sett umhvørvismál verða rokkin | 6% | 21% | 8% | 2% | 5% |
| At deila vitan hjá upprunafólkum í sínum egna landi ella úr øðrum londum | 17% | 6% | 27% | 44% | 10% |
| At taka lut í ymsum stórum umhvørvisverkætlanum (t.d. at telja og eyðmerkja plantur og dýr í nærumhvørvinum) | 0% | 5% | 19% | 6% | 8% |
| At stuðla samfeløgum, sum hava verið fyri náttúruvanlukkum (t.d. ódn, eldi ella turki) | 0% | 3% | 12% | 1% | 2% |
| At sýna fram umhvørvisavrik og umhvørvispolitikk í skúlabløðum, á internetsíðum og í skúlasýningum | 6% | 15% | 10% | 1% | 5% |
| At arbeiða saman við einum lokalum umhvørvisfelagsskapi | 0% | 4% | 11% | 3% | 5% |

*Talva 5.9: Spurningar til skúlaleiðarar um, hvussu ofta teirra skúli gevur næmingum høvi at taka lut í hesum virksemi. Fýra svarmøguleikar vóru: Ongantíð, Onkuntíð, Ofta og Sera ofta. Prosentini í talvuni niðanfyri vísa samanløgdu tølini fyri svarini „ofta“ og „sera ofta“. Sum heild svaraðu skúlastjórarnir í størri mun „ofta“.*

## Samanumtøka

Úrslitini úr PISA 2025 vísa, at næmingar, sum uppliva fleiri møguleikar fyri at arbeiða við umhvørvisspurningum í undirvísingini, hava gjøgnumgangandi ein jaligari hugburð til umhvørvið. Teir hava størri umhvørvismedvit, eru sannførdari um egnan og felags førleika at ávirka umhvørvið og vísa størri vilja at taka lut í umhvørvisverjandi tiltøkum, bæði við stuttum og longum sikti. Hesi sambond eru framvegis sjónlig, eisini tá hædd verður tikin fyri sosialum og búskaparligum bakgrundarviðurskiftum hjá næmingum og skúlum.

Hinvegin er sambandið millum umhvørvislæring í undirvísingini og fakligu úrslitini í umhvørvisvísindum ikki so einvíst. Í summum londum sæst eitt jaligt samband, í øðrum eitt neiligt, og í mongum londum er einki hagfrøðiliga signifikant samband. Hetta bendir á, at tað í sjálvum sær ikki er nóg mikið at geva næmingum fleiri møguleikar at arbeiða við umhvørvisevnum. Dygdin á undirvísingini, undirvísingarhátturin og hvussu nógv tíð verður nýtt til evnið eru eisini avgerandi.

Samanumtikið benda úrslitini á, at umhvørvislæring í undirvísingini kann styrkja hugburð, ábyrgdarkenslu og virknan leiklut hjá næmingum í umhvørvismálum. Skal hon samstundis bøta um teirra fakligu førleikar í umhvørvisvísindum, krevst tó, at hon verður knýtt at góðari og væl skipaðari undirvísing. Hetta er ein fortreyt fyri at menna allar tríggjar tættirnar í tí, sum PISA kallar *environmental agency*, og sum vit kunnu kalla umhvørvisligan virkisførleika.

# Kapittul 6: Skúlarnir og svarini frá skúlaleiðarum

Skúlaleiðarar á 18 av teimum 20 skúlunum, sum hava næmingar í framhaldsdeild, hava svarað serstøkum spurnablaði, sum lýsir bakstøði hjá skúlunum, herundir starvsfólkahópin, hvørjar royndir og eftirmetingar verða gjørdar, og hvussu tær verða gagnnýttar. Eisini verður spurt um skúlaumhvørvi, skúlabygningar, útgerð og KT.

Allir skúlarnir eru almennir skúlar við allari fígging (ella meginpartinum) fíggjaðari av antin landi ella kommunu. Onkur skúli hevur næmingagjald, og onkur skúli hevur fingið ágóðan av peningainnsavningum.

Ellivu av teimum 18 skúlunum, har skúlaleiðararnir hava svarað, liggja í einum øki við færri enn 3.000 íbúgvum. Hetta er munandi meira enn í hinum Norðurlondunum, har vit síggja, at í miðal eru 20% av skúlunum innan hendan bólkin, meðan Føroyar liggja uppi á 65% (talva 6.1).

*Talva 6.1: Hvør av niðanfyristandandi allýsingum lýsir best økið, har tykkara skúli liggur?*

| | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark | Norðurlond |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bygd ella landbúnaðarøki (færri enn 3.000 íbúgvar) | 65% | 41% | 13% | 17% | 9% | 25% | 20% |
| Lítil býur (3.000 til 15.000 íbúgvar) | 12% | 12% | 22% | 29% | 23% | 23% | 23% |
| Býur við 15.000 til 100.000 íbúgvum | 24% | 27% | 38% | 33% | 32% | 33% | 33% |
| Stórbýur (100.000 til 1 millón íbúgvar) | 0% | 20% | 28% | 20% | 37% | 14% | 23% |
| Stórur stórbýur (1 millión til 10 milliónir íbúgvum) ella metropolur (við fleiri enn 10 milliónum íbúgvum) | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 6% | 1% |

Teir 18 skúlarnir, har skúlaleiðararnir hava svarað, hava tilsamans 5.570 næmingar á sínum skúlum. Tá hugt verður at økisbýtinum í mun til næmingatal, heldur enn tali av skúlum, sæst sama mynstur. Vit síggja, at í Føroyum eru næstan 40% av næmingunum í skúlaøkjum við færri enn 3.000 íbúgvum. Hetta er nógv meira enn í nøkrum øðrum Norðurlandi (talva 6.2).

*Talva 6.2: Næmingatal umroknað til prosenttøl í mun til sama spurning sum í talvu 6.1: Hvør av niðanfyristandandi allýsingum lýsir best økið, har tykkara skúli liggur?*

| | Føroyar | Ísland | Finnland | Svøríki | Danmark | Øll |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bygd | 39% | 15% | 4% | 5% | 13% | 9% |
| Lítil býur | 22% | 16% | 17% | 18% | 26% | 20% |
| Býur | 39% | 41% | 43% | 32% | 39% | 39% |
| Stórbýur | 0% | 28% | 35% | 45% | 17% | 32% |
| Stórur stórbýur ella metropolur | 0% | 0% | 0% | 0% | 6% | 1% |

Ein av spurningunum, sum skúlastjórarnir svaraðu, var um at fáa skikkað starvsfólk. Tað vísir seg, at tað serliga eru skúlarnir, sum eru staðsettir í økjum við undir 3.000 íbúgvum, ið hava trupult við at fáa undirvísingarstarvsfólk, har vit í talvu 6.3 síggja, at meira enn helvtin av smáu skúlunum sigur, at tað darvar undirvísingini í skúlanum, at tey ikki fáa undirvísingarstarvsfólk, meðan hetta ikki er støðan í størru økjunum. Í Føroyum eru tað so at siga einans tey smærru økini, sum eru darvað av troti á undirvísingarstarvsfólki, men vit síggja í hinum Norðurlondunum, at tað eisini har sum heild er ein størri avbjóðing enn í teimum størru økjunum. Serliga Ísland, Noreg og lutvíst eisini Svøríki hava avbjóðingar hesum viðvíkjandi.

*Talva 6.3: Darvar nakað av hesum møguleikan at undirvísa í tykkara skúla?*

| | Talva 6: Trot á undirvísingarstarvsfólkum | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bert Føroyar | Als ikki | Í sera lítlan mun | Í ávísan mun | Sera nógv |
| Bygd | 27% | 18% | 46% | 9% |
| Lítil býur | 0% | 100% | 0% | 0% |
| Býur | 50% | 50% | 0% | 0% |

Føroyskir skúlaleiðarar á smáum skúlum halda umleið helvt um helvt, at góðir lærarar í náttúruvísindum eru torførari at fáa fatur á enn lærarar í øðrum lærugreinum. Teir býta seg eitt sindur ymiskt í mun til íbúgvatalið í økinum, sum teirra skúli er í, har 56% í smáu økjunum við færri enn 3.000 íbúgvum halda tað er torførari, 11% í lítlum býum, og 33% av skúlaleiðarunum í býum halda tað verða torførari at fáa góðar lærarar í náttúruvísindum. Hetta bendir á, at skúlarnir staðsettir í bygdum hava ikki sama úrvalið av lærarakreftum. Miðaltølini fyri alt landið síggjast í talvu 6.5.

Hendan støðan við at trot á undirvísingarstarvsfólki kann darva undirvísingini, kann síggjast aftur í tí, at størsti munurin í PISA-stigum millum skúlar er millum skúlarnar í smæstu økjunum; harnæst koma skúlarnir í lítlum býum, og minstur er munurin ímillum skúlarnar í býunum. Gjørt skal vera vart við, at føroysku tølini eru so fá (bert 18 svar), og tí kann ikki nakað avgjørt sigast út frá hesum. Vit síggja tó sama mynstur í altjóða dátunum, og har er niðurstøðan, at munurin millum einstøku skúlarnar er minni enn munurin millum einstøku næmingarnar, og sum sæst í mynd 6.1, liggja Føroyar saman við hinum Norðurlondum langt niðri á listanum yvir mun millum skúlar.

Mynd 6.1 vísir, hvussu ymiskt úrslitini í náttúruvísindum hjá næmingunum eru býtt millum tveir tættir. Annar parturin vísir munir millum skúlar (grønir teigar), meðan hin parturin vísir munir millum næmingar í sama skúla (bláir teigar).

Um ein stórur partur av variatiónini er millum skúlar, merkir tað, at miðalúrslitini hjá skúlunum eru rættiliga ymisk. Um størsti parturin hinvegin er innan skúlar, merkir tað, at næmingarnir í hvørjum einstøkum skúla eru ymiskir í førleikum, meðan munurin millum skúlarnar er lítil.

Í Føroyum er, eins og í hinum Norðurlondunum, størsti parturin av variatiónini innan skúlarnar. Tað bendir á, at føroyskir skúlar, eins og norðurlendskir skúlar sum heild, líkjast hvørjum øðrum meira enn í londum, har ein størri partur av variatiónini er millum skúlar. Við øðrum orðum eru munirnir í Føroyum fyrst og fremst at finna millum einstøku næmingarnar heldur enn millum skúlarnar.

Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at myndin ikki sigur nakað um, hvussu góðir ella minni góðir skúlarnir eru. Hon vísir einans, hvussu stórur partur av samlaðu variatiónini í úrslitunum kann knýtast at munum millum skúlar, og hvussu stórur partur stavar frá ymiskleikanum millum næmingarnar í sama skúla.

## Variatiónir millum skúlar og innan skúlar

OECD metir, at tað er týdningarmikið at kanna variatiónina í úrslitunum í náttúruvísindum millum skúlar og innan skúlar, tí hetta vísir, hvørt munir í úrslitunum í høvuðsheitum standast av skúlaviðurskiftum, ella um hesir munir serliga eru at finna millum næmingar í sama skúla. Tá ein stórur partur av variatiónini í úrslitunum sæst millum skúlar, eru úrslitini hjá næmingunum í stóran mun ymisk alt eftir, hvørjum skúla tey ganga á. Tá mesta variatiónin liggur innan skúlar, vísa munir í úrtøkuni seg serliga hjá næmingum, sum ganga í sama skúla. Hesin munur kann brúkast til at eyðmerkja, hvørt átøk á útbúgvingarøkinum (útbúgvingarpolitisk átøk) fyrst og fremst eiga at verða sett í verk fyri at minka um munir millum skúlar, munir millum næmingar í sama skúla, ella í báðum pørtum (bæði skúlum og næmingum).

Í miðal var variatiónin hjá teimum luttakandi londunum í PISA 2025 soleiðis, at 31% av miðal-variatiónini í úrslitunum í náttúruvísindum vóru millum skúlar (sí mynd 6.1), meðan 69% vóru innan skúlar. Hetta merkir, at í miðal og í flestu londum ella búskapum hava skúlaviðurskifti minni týdning í frágreiðingini av muninum í úrslitunum hjá næmingunum enn viðurskifti á næminga- ella flokssstigi. Hesi viðurskifti kunnu snúgva seg um bakgrundina hjá næmingunum, hugburð, læringsatburð, eins og munir, sum hava samband við floksstig og hvussu næmingar verða býttir í ymiskar flokkar innan sama skúla.

Vert er at ansa eftir, at tað er stórur munur á variatiónini millum skúlar í úrslitunum í náttúruvísindum í ymsum londum og búskapum. Í Føroyum, Íslandi, Finnlandi og Noregi greiðir munurin millum skúlar frá minni enn 10% av tí samlaðu variatiónini í úrslitunum. Í hinum endanum finna vit 10 onnur lond – Sambia, Niðurlond, Kenja, Bulgaria, Turkaland, Ruanda, Ungarn, Slovakia, Týskland og Rumenia – har munurin millum skúlar greiðir frá í minsta lagi 50% av tí samlaða muninum í úrtøkuni hjá skúlaskipanini. Hetta bendir á, at útbúgvingarskipanirnar í tí seinna bólkinum eru meira akademiskt uppbýttar, har næmingar við góðum og vánaligum avrikum meira sannlíkt ganga í hvør sínum skúlum.




*Mynd 6.1: Variatión í úrslitum í náttúruvísindum millum skúlar og innan skúlar (í prosentum). Myndin umfatar bert skúlar við vanligasta ISCED-stiginum fyri 15-ára gamlar næmingar. Londini eru skipað í fallandi raðfylgju eftir, hvussu stórur partur av variatiónini í úrslitum í náttúruvísindum stavar frá munum millum skúlar. Myndin vísir, hvussu øll Norðurlond eru langt undir OECD-miðal, tá tað snýr seg um variatiónsmunir millum skúlar, har Føroyar hava minsta munin. Fleiri evropeisk lond eru millum teirra, sum hava stóran variatiónsmun millum skúlar.*

## Samansetingin av starvsfólkum skúlans

Tilsamans 594 lærarar undirvístu teimum 5.570 næmingunum, sum ganga í skúlunum, sum luttóku í PISA-kanningini á vári 2025. Afturat sær høvdu hesir lærararnir 209 starvsfólk, sum ikki undirvísa. Hetta svarar til eitt starvsfólk til stuðul og umsiting fyri hvørjar tríggjar lærarar.

Føroyska lutfallið av næmingum til hvønn lærara er 10; hetta er í lægra endanum av Norðurlondum, sum aftur liggja lægri enn onnur lond, sum vit samanbera við. Sí mynd 6.2.




*Mynd 6.2: Lutfallið millum næmingar og lærarar. Lágt lutfall merkir lutfalsliga nógvir lærarar.*

## Skúlastarvsfólk, sum ikki undirvísa

Hesin bólkurin telur stuðlar, trivnaðar-, fyrisitingar- og leiðslustarvsfólk. Skúlar í Norðurlondum hava sum heild eitt sindur øðrvísi býti av hesum starvsfólkabólkum í mun til bæði hini OECD-londini og til lond, sum ikki eru við í OECD.

Starvsfólk, sum ikki undirvísa, verða tikin við í PISA, tí OECD metir, at samlaði starvsfólkahópurin hevur týdning fyri læringsumhvørvið. Leiðsla, fyrisiting og ymisk stuðulsstarvsfólk kunnu leggja lunnar undir góða undirvísing við at stuðla lærarum, styrkja trivnaðin hjá næmingum og tryggja, at skúlin virkar væl sum skipan. Tað er tó ikki so, at PISA væntar, at eitt størri tal av hesum starvsfólkum í sjálvum sær førir til betri læringsúrslit; heldur verða upplýsingarnar brúktar til at lýsa, hvussu lond skipa síni skúlaverk, og til at kanna, um ymiskar skipanir hanga saman við læringsúrslitum og trivnaði.




*Mynd 6.3: Lutfallið av ymsu bólkunum av skúlastarvsfólkahópinum, sum ikki undirvísa. Prosenttølini eru einans partur av teimum, sum ikki undirvísa, og býtið vísir uppgávubýtir teirra millum.*

1. Námsfrøðiligir stuðlar eru roknaðir sum øll lærarahjálparfók og onnur fakfólk, sum ikki undirvísa, men sum vegleiða ella stuðla lærarunum í undirvísingini, umframt fakfólk innan undirvísing, undirvísingarætlanir og undirvísingarmiðlar. Norðurlond hava fleiri stuðulsstarvsfólk enn vanligt í øðrum londum. Serliga í Íslandi er lutfallið av stuðlum stórt í mun til restina av starvsfólkahópinum, sum ikki undirvísir.

2. Trivnaðarstarvsfólk eru lýst við, at tey í høvuðsheitum fáast við trivnaðin hjá næmingum. Í hesum bólki teljast sálarfrøðingar, heilsufrøðingar og ráðgevar. Føroyar og Ísland hava ikki so nógv í hesum bólkinum, meðan tey í Svøríki hava lutfalsliga nógv trivnaðarstarvsfólk.

3. Fyrisitingarstarvsfólk, sum m.a. telja móttøkufólk, skrivstovufólk og umsitingarstarvsfólk, eru lutfalsliga fá í Norðurlondum. Hetta skal síggjast í mun til, at stuðuls- og trivnaðarstarvsfólk eru raðfest.

4. Skúlaleiðslan verður lýst sum skúlastjórin (ella -stjórar), varastjórar og onnur, hvørs høvuðsuppgáva er fyrisiting.

## Lærarar – skúlastarvsfólk, sum undirvísa

Í miðal eru 65% av føroysku skúlastarvsfólkunum undirvísarar, og 72% av hesum hava eitt fult góðkent lærarapróg v. Hetta tal hevur OECD roknað seg fram til úr upplýsingunum frá skúlaleiðarunum, og er sostatt ikki eitt tal, sum skúlaleiðararnir hava upplýst sjálvir. Hinvegin, so eru somu útrokningar framdar fyri øll lond (mynd 3). Noreg hevur ikki svarað hesum spurningum um karmarnar á skúlunum, og Svøríki svaraði ikki upp á spurningin um langa framhaldsútbúgving hjá lærarum.

Føroyar og Ísland við 72%, saman við Danmark við 75%, liggja rættiliga lágt í mun til bæði hini Norðurlondini og OECD-londini, tá talan er um lutfallið av lærarum við fult góðkendum lærarapróg vi.

Hinvegin, tá tað snýr seg um lutfall av øllum lærarum við langari framhaldsútbúgving, sæst, at Ísland er meira á hædd við OECD, meðan Føroyar og Danmark eru heilt øðrvísi við sera fáum lærarum, sum hava langa framhaldsútbúgving á masterstigi. Sum kunnugt hevur lærararútbúgvingin í Finnlandi síðan 1979 verið á masterstigi, og í Íslandi kom hetta í lag í 2008.




*Mynd 6.4: Lærarar við fult góðkendum læraraprógvi og lærarar við langari framhaldsútbúgving á masterstigi.*

## Náttúruvísindalærarar

Føroysku skúlaleiðarasvarini benda á, at náttúruvísindalærarar verða fataðir ymiskt í Føroyum í mun til í øðrum londum. Vit síggja, at lutfallið næmingar:náttúruvísindalærarar er nógv minni í Føroyum enn í øðrum londum, samstundis sum vit eisini síggja, at vit hava lutfalsliga nógv fleiri náttúruvísindalærarar, og at hesir hava útbúgvingina til tess (eru góðkendir). At tað eru so nógv fleiri náttúruvísindalærarar í Føroyum í mun til bæði næmingar og aðrar lærarar kann merkja, at skúlaleiðarar í størri mun enn aðrastaðni lýsa ein náttúruvísindalærara sum ein, sum undirvísir í náttúruvísindaligum fakum, uttan mun til um viðkomandi hevur linjufak í lærugreinini. Er hetta so, bendir tað á, at føroyski fólkaskúlin verður rikin samsvarandi gomlu lýsingini av einum fólkaskúlalærara, sum segði, at „útbúgvingin er rættað móti fólkaskúlanum. Við útbúgvingarlok hevur tann lesandi ognað sær skjalprógvaðan førleika at undirvísa á øllum floksstigum og í øllum lærugreinum í fólkaskúlanum.“ Hetta stóð í útbúgvingarprofilinum fyri lærarautbúgvingina fram til 2015. Í nýggjasta útbúgvingarprofilinum, sum er galdandi frá august 2016, stendur at lærarautbúgvingin er „almenn útbúgving rættað móti fólkaskúlanum, ið gevur førleika at undirvísa og virka á øllum floksstigum í fólkaskúlanum.“




*Mynd 6.5: Hagtøl um náttúruvísindalærarar, teirra tal í mun til næmingar, í mun til allar lærarar á skúlanum, í mun til útbúgving og í mun til kyn. Tølini eru viðgjørd í tekstinum.*

Í Føroyum eru ikki ásett ítøkilig krøv til fakligan førleika hjá lærara í nakrari lærugrein fólkaskúlans. Til at undirvísa vaksnum fólkum í føroyskum sum annaðmál eru tó heilt ítøkilig krøv, m.a. 60 ECTS í annaðmálsundirvísing, umframt aðrar útbúgvingar, men hetta er ikki galdandi, tá talan er um at undirvísa børnum (Ltl. nr. 171 frá 12. november 2025).

Norðurlond hava ymsa tilgongd til at seta førleikakrøv til lærarar í mun til okkum í Føroyum, har tað í fólkaskúlalógini ongar ásetingar eru um annað enn læraraútbúgving úr Føroyum, Danmark ella eina læraraútbúgving á sama støði, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent. Eingi serstøk krøv eru til ávísar lærugreinar (talva 6.4).

*Talva 6.4: Almennu og serstøku krøvini sambært lógarfyriskipanum. Føroysku krøvini eru rættiliga lík teimum donsku. Í hinum Norðurlondunum eru í stóran mun krøv til útbúgving á masterstigi, tá undirvísast skal í hádeild.*

| **Land** | **Almenn krøv** | **Serstøk krøv til ávísar lærugreinar** |
|---|---|---|
| Føroyar[1)] | Læraraútbúgving, B.Ed. Einki verður sagt um linjugreinar. | Eingi |
| Ísland[2)] | Læraraútbúgving M.Ed. Til fólkaskúlalærarar verður væntað, at tey hava minst eitt fakøki við í minsta lagi 90 ECTS í einari skúlalærugrein. | Eingi |
| Finnland[3)] | Í 1-6. flokki verður kravd masterútbúgving við serøki innan undirvísing. | Í 7.-12. flokki verður kravt masterstig í lærugreinini + 60 ECTS í lærufrøði. |
| Noreg[4)] | Í 1.-7. flokki eru serkrøv í norskum, samiskum, enskum og støddfrøði. | Í 8.-10. flokki krevjast 60 ECTS fyri at sleppa at undirvísa í norskum, samiskum, enskum og støddfrøði, og 30 ECTS í øðrum undirvísingarfakum. |
| Svøríki[5)] | Ymisk krøv til ymsu skúladeildirnar, grunddeild, miðdeild og hádeild. Heilt frá grunddeild verður sagt, at ein góðkendur lærari kann einans undirvísa í tí ella teimum lærugreinum, sum hansara útbúgving fevnir um. | Í hádeild (7.-9. fl.) krevst faklæraraprógv, sum er rættað móti hádeild (alternativið er móti miðnámi) – so lærarar í hádeild og í miðnámi hava sama fakliga førleika. |
| Danmark[6)] | Bert krav um góðkenda læraraútbúgving. | Eingi |

1) https://www.logir.fo/Logtingslog/125-fra-20-06-1997-um-folkaskulan-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-34-fra-28
2) https://www.althingi.is/lagas/nuna/2019095.html
3) https://www.oph.fi/sv/tjanster/erkannande-av-examina/utbildningsstyrelsens-beslut-om-behorighet-undervisnings-och-utbildningsuppgifter
4) Utbildningsstyrelsens beslut om behörighet för undervisnings- och utbildningsuppgifter | Utbildningsstyrelsenhttps://www.udir.no/regelverk-og-tilsyn/skole-og-opplaring/krav-til-kompetanse-for-larere-ansettelse-og-undervisning/#a225053
5) Förordning (2011:326) om behörighet och legitimation för lärare och förskollärare | Sveriges riksdag
6) https://www.retsinformation.dk/eli/lta/2025/1100

Náttúruvísindaligu fakini krevja, umframt lærarar, ofta serstovur, serútgerð og tilfar. Tí eru skúlastjórar spurdir um hetta, og vit síggja í svarunum (talva 6.5), at svarini úr ymsu Norðurlondunum eru rættiliga ymisk, og at føroysku úrslitini í flestu førum falla innan fyri norðurlendsku úrslitini. Tó kann sigast, at føroysku og íslendsku skúlastjórarnir meta starvsstovuútgerðina vera í heldur lakari standi, og at starvsstovutilfarið kundi verið meira. Hetta kann tykjast eitt sindur í andsøgn við svarini til spurningin um, at skúlarnir brúka eyka pengar til at dagføra útgerð til undirvísing í náttúruvísindum, har skúlastjórarnir í størri mun enn í øðrum londum svara játtandi til hetta. Tað verður tó ikki spurt um í hvussu stóran mun, eyka pengarnir nøkta tørvin.

*Talva 6.5: Eru hesar útsagnir galdandi viðvíkjandi náttúruvísindum í tykkara skúla? (% av teimum, sum hava svarað játtandi).*

| | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark | Norðurlond | OECD – NL | Onnur lond |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Góðir lærarar í náttúruvísindum eru torførari at fáa fatur á enn lærarar í øðrum lærugreinum | 44% | 52% | 44% | 25% | | 35% | 35% | 51% | 52% |
| Starvsstovuútgerðin er í góðum standi | 67% | 33% | 92% | 78% | 96% | 74% | 85% | 62% | 51% |
| Vit hava nóg mikið av starvsstovutilfari, so at allir flokkar fáa brúkt tað regluliga | 61% | 20% | 92% | 68% | 85% | 84% | 81% | 48% | 34% |
| Vit hava eyka starvsstovustarvsfólk, sum hjálpa til í undirvísingini í náttúruvísindum | 12% | 9% | 1% | 5% | 11% | 16% | 9% | 21% | 21% |
| Okkara skúli brúkar eyka pengar til at dagføra útgerð til undirvísing í náttúruvísindum | 44% | 20% | 31% | 34% | 26% | 38% | 31% | 40% | 41% |

## Raðfestingar av undirvísingarendamálum

Í fleiri førum líkjast Føroyar frá hinum Norðurlondunum, tá hugt verður eftir svarunum um, hvussu ávís undirvísingarendamál verða raðfest. Í mynd 6.6 eru bert svarini fyri „høga raðfesting" víst – men mynstrið er nøkulunda tað sama, um hugt verður eftir miðaltølum. Tað sæst, at Finnland, Noreg og Svøríki eru ikki so fokuserað á fyribrigdið, at næmingarnir skulu styrkja sínar førleikar at læra sjálvir (1), sum vit eru í Føroyum, Íslandi og Danmark. Vit síggja eisini, at føroysku skúlastjórarnir ikki raðfesta líka nógv sum skúlastjórarnir í hinum londunum førleikarnar at gera ætlanir, at hava eftirlit við og at eftirmeta egna læring (2), og heldur ikki at læra næmingarnar at leita sær hjálp til skúlaarbeiðið (3) ella at brúka afturboðan (4).




*Mynd 6.6: Skúlastjórasvar uppá spurningar viðvíkjandi raðfesting av undirvísingarendamálum. Svarmøguleikarnir vóru „Onga raðfesting", „Lága raðfesting", „Miðal raðfesting" og „Høga raðfesting". Í myndini eru er bert svarini „Høga raðfesting" víst.*

## Eftirmeting av skúlanum

Skúlastjórarnir eru eisini spurdir um innanhýsis og uttanhýsis eftirmetingar, sum verða mettar sum partur av góðskutrygging og betringum av skúlans virksemi. Her sæst, at Føroyar eru sera nógv øðrvísi enn flest onnur lond, serliga tá tað snýr seg um at hyggja at fyriskipanum, sum hyggja at sjálvum skúlanum ella undirvísingini (talva 6.6, spurningarnir 1, 2, 3, (4) og 7). Í mun til hinar spurningarnar, sum í stóran mun snúgva seg um næmingarnar, liggja vit í sama spenni sum hini Norðurlondini.

*Talva 6.6.: Eru hesar fyriskipanir viðvíkjandi góðskutrygging og betringum settar í verk á skúlanum, og um ja, hvaðani koma tær?*

Ja, P = Ja, hetta er kravt, t.d. í politikkinum hjá kommununi ella stjórnini.

Ja, S = Ja, og byggir á, at skúlin tekur stig til tað.

Innanhýsis eftirmeting av skúlanum: Eftirmeting sum partur av tilgongd, stýrd av skúla, har skúlin avger, hvørji øki verða eftirmett. Eftirmetingin kann verða framd av fólki í skúlanum ella av fólki/stovnum biðin av skúlanum.

Uttanhýsis eftirmeting av skúlanum: Eftirmeting sum partur av tilgongd, sum verður stýrd og fyrisitin av uttanhýsis stovni. Skúlin avger ikki, hvørji øki verða eftirmett.

| | | Føroyar | Ísland | Finnland | Noreg | Svøríki | Danmark | Norðurlond | OECD – NL | Onnur lond |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Innanhýsis eftirmeting/ sjálveftirmeting | Ja, P | 11% | 88% | 54% | 57% | 69% | 69% | 64% | 47% | 40% |
| | Ja, S | 56% | 12% | 43% | 38% | 30% | 26% | 33% | 50% | 58% |
| | Nei | 33% | | 3% | 6% | 0.5% | 5% | 3% | 4% | 1% |
| 2. Uttanhýsis eftirmeting | Ja, P | 28% | 89% | 50% | 62% | 61% | 67% | 61% | 61% | 64% |
| | Ja, S | | 3% | 12% | 10% | 11% | 9% | 10% | 22% | 28% |
| | Nei | 72% | 7% | 39% | 28% | 29% | 25% | 29% | 17% | 8% |
| 3. Skrivlig nágreining av profilinum hjá skúlanum og útbúgvingarmálum | Ja, P | 17% | 57% | 59% | 57% | 66% | 60% | 62% | 52% | 56% |
| | Ja, S | 28% | 40% | 27% | 31% | 27% | 30% | 29% | 41% | 41% |
| | Nei | 56% | 3% | 14% | 12% | 7% | 10% | 10% | 6% | 2% |
| 5. Skipað innsavning av dátum, so sum lærara- ella næmingauppmøting og fakligari menning | Ja, P | 78% | 54% | 75% | 50% | 78% | 66% | 68% | 50% | 42% |
| | Ja, S | 22% | 45% | 17% | 42% | 22% | 31% | 28% | 48% | 56% |
| | Nei | | 1% | 9% | 9% | 1% | 3% | 4% | 3% | 2% |
| 6. Skipað innsavning av royndarúrslitunum hjá næmingunum og tali fyri, hvussu mangir næmingar standa útbúgvingina | Ja, P | 72% | 61% | 75% | 66% | 64% | 80% | 70% | 54% | 43% |
| | Ja, S | 17% | 38% | 20% | 32% | 34% | 20% | 28% | 44% | 54% |
| | Nei | 11% | 1% | 6% | 1% | 3% | | 2% | 2% | 3% |
| 4. Skrivlig tilskilan av metingarstøði hjá næmingum | Ja, P | 50% | 46% | 60% | 34% | 82% | 72% | 65% | 48% | 43% |
| | Ja, S | 22% | 45% | 14% | 54% | 18% | 22% | 26% | 43% | 53% |
| | Nei | 28% | 9% | 26% | 12% | 1% | 6% | 9% | 8% | 4% |
| 7. Skrivligar afturmeldingar frá næmingunum (t.d. viðvíkjandi undirvísingartímum, lærarum ella útgerð) | Ja, P | 6% | 12% | 11% | 26% | 24% | 23% | 21% | 17% | 18% |
| | Ja, S | 17% | 49% | 66% | 53% | 60% | 48% | 56% | 61% | 72% |
| | Nei | 78% | 39% | 23% | 22% | 16% | 29% | 22% | 22% | 10% |
| 8. Mentorvirksemi hjá lærarunum | Ja, P | 28% | 6% | 7% | 17% | 13% | 17% | 14% | 32% | 29% |
| | Ja, S | 28% | 48% | 78% | 76% | 76% | 72% | 75% | 55% | 65% |
| | Nei | 44% | 47% | 15% | 7% | 10% | 11% | 12% | 13% | 6% |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. Reglulig ráðgeving, ið er rættað móti betring av skúlanum við einum ella fleiri serfrøðingum í einum tíðarskeiði upp á í minsta lagi seks mánaðir | Ja, P | | 8% | 1% | 40% | 13% | 16% | 17% | 21% | 26% |
| | Ja, S | 44% | 55% | 20% | 44% | 27% | 35% | 32% | 46% | 58% |
| | Nei | 56% | 37% | 79% | 17% | 61% | 49% | 52% | 33% | 16% |
| 10. Verksetan av standardpolitikki fyri náttúruvísindaligar lærugreinar (t.e. skúlatímatalva við felags undirvísingartilfari saman við starvsfólkamenning og venjing). | Ja, P | 11% | 19% | 23% | 5% | 15% | 22% | 16% | 36% | 46% |
| | Ja, S | 22% | 40% | 40% | 20% | 37% | 39% | 35% | 37% | 39% |
| | Nei | 67% | 42% | 37% | 75% | 48% | 39% | 49% | 27% | 14% |

Skúlastjórarnir svaraðu eisini nøkrum spurningum um, hvussu teir fremja undirvísing innan umhvørvi. Hesi svar síggjast í kapitli 5 saman við næmingasvarunum.

# Kapittul 7: Mannagongdir, dátugóðska og góðsku-trygging í PISA Føroyum 2025

PISA er ein OECD-verkætlan (Organisation for Economic Cooperation and Development-verkætlan). 91 lond og búskapir eru við í PISA (Programme for International Student Assessment) í 2025.

Mentamálaráðið í Føroyum hevur eftir avtalu við danska Undervisningsministeriet havt samstarv um PISA við PISA-samtakið, ið ger donsku kanningina. Sáttmáli er gjørdur við Danmarks Statistik um at standa fyri samskifti við altjóða samtakið og OECD at standa fyri koting av svarum, umframt at tryggja, at dátur frá føroysku PISA-kanningini hava somu høgu góðsku, sum er kravd av dátum úr øðrum londum. Hendan uppgávan er løgd út til Próvstovuna at umsita, eins og Próvstovan stendur fyri umseting av royndartilfari og spurnabløðum til føroyskt og fyri at seta umsjónarfólk at standa fyri royndunum úti á skúlunum.

PISA 2025 er í høvuðsheitum skipað á sama hátt sum undanfarnu kanningarnar í 2000, 2003, 2006, 2009, 2012, 2015, 2022 og 2025. Tað er eitt avgerandi krav til kanningina, at dátur úr luttakandi londunum kunnu samanberast, herundir at somu mannagongdir verða fylgdar í øllum londunum, sum eru við í PISA. Eisini er týdningarmikið, at úrslitini kunnu samanberast yvir tíð. Tí verður sum minst broytt í mun til undanfarin umfør (OECD, 2025[1]). Fyri at styrkja samanberingargrundarlagið verða nakrar uppgávur endurnýttar frá einum umfari til næsta. Hesar uppgávur verða ikki almannakunngjørdar, so leingi tær eru í nýtslu.

## Royndaruppgávur og spurnabløð

Í PISA 2025 eru uppgávur í náttúruvísindum, lesing og støddfrøði. Síðani 2015 hava føroyskir næmingar svarað uppgávunum á teldu. Fyrstu árini vórðu uppgávur einans svaraðar á pappíri, men fyri hvørt umfar hevur størri partur verið á teldu, og frá 2015 hava allar uppgávurnar verið svaraðar á teldu í flestu londum. Í 2025 vóru bert seks lond, sum svaraðu á pappíri. Sambært altjóða PISA-samtakinum hevur skiftið frá pappíri til teldu ikki stórvegis ávirkan á úrslitið.

Umframt royndaruppgávurnar eru í dátutilfarinum fyri PISA 2025 eisini ein rúgva av bakgrundsupplýsingum um einstaka næmingin og um skúlarnar, sum eru við í PISA. Næmingar hava aftan á royndina fylt út eitt spurnablað um sínar familjur, áhugamál og annað, og so at siga allir skúlastjórarnir hava útfylt spurnablað um sínar skúlar.

## Dátuinnsavningin í verki

Toymir av umsjónarfólkum vitjaðu teir 20 skúlarnar í tíðarskeiðinum frá 10. mars til 4. apríl 2025. Hvørt toymi hevði í minsta lagi tveir persónar. Tað vóru 6 vanlig umsjónarfólk og 9 teknisk umsjónarfólk. Limirnir í toymunum vóru skiftandi, men áðrenn farið varð út á skúlarnar, bleiv avtalað, hvør hevði ábyrgdina. Umsjónarfólkini høvdu royndartilfarið við út á skúlarnar.

Tíðin á teststøðunum varð brúkt soleiðis:
15 min.: Kunning um PISA.
60 min.: Fyrra helvt av royndini.
5 min.: Steðgur
60 min.: Seinna helvt av royndini.
15 min.: Næmingarnir strekkja beinini. Næmingarnir kunnu reisa seg og røra seg, men ikki tosa við hvønn annan um royndina.
Uml. 35 min.: Næmingarnir svara spurnablaði, sum savnar upplýsingar um teir sjálvar, heimligu viðurskifti teirra, skúlagongdina og teirra royndir við læring.
Liðugt.

Tað mest avgerandi er, at næmingarnir brúka júst tvær ferðir 60 minuttir til royndina. Tíðin til roynd á teldu varð hildin, tí royndarforritið steðgaði royndini, tá tíðin var farin.

Til spurnablaðið kundu næmingarnir fáa hjálp frá umsjónarfólkunum, tí endamálið var at fáa so góðar upplýsingar sum gjørligt; ikki at royna næmingarnir.

## Málbólkur

Málbólkurin í altjóða-PISA eru næmingar, sum eru millum 15 ár og 2 mánaðir og 16 ár og 4 mánaðir. Málbólkurin verður allýstur at vera øll, sum eru fødd í einum 12-mánaða samanhangandi tíðarskeiði, og sum eru í skúla ella undir útbúgving. Er royndin t.d. í mars-apríl 2025, er málbólkurin tey, sum vórðu fødd millum 1. januar og 31. desember 2009.

Í PISA Føroyum 2006 varð hendan mannagongd fylgd, og málbólkurin var tey, sum vórðu fødd í álmanakkaárinum 1990. Tað hevði við sær, at næmingar úr 7.-10. flokki í fólkaskúlanum og næmingar í miðnámsskúlum vóru við.

Eftir tilmæli frá SFI Survey, ið tá hevði ábyrgdina av dátuinnsavnan o.ø., avgjørdi Mentamálaráðið at broyta mannagongd til PISA 2009, soleiðis at

1 PISA 2025, Technical Report. OECD 2025.

málbólkurin er næmingar í 9. flokki. Hetta hevur tann praktiska fyrimun, at tað órógvar skúlarnar og undirvísingina minni, av tí at heilir flokkar eru við í PISA í staðin fyri partar av fleiri flokkum. Harumframt fáast dátur, sum lýsa ein skúlaárgang, og hetta gevur sostatt eina meira viðkomandi mynd í mun til at lýsa føroyska fólkaskúlan yvir tíð. Vansin við at broyta mannagongd er, at vit skulu vera varin at samanbera við kanningina í 2006. Samanbering við hini londini skal eisini gerast við neyðugum fyrivarni. Men, sum ávíst í sambandi við PISA 2009, hevði broytingin av málbólki næstan onga ávirkan á samlaða úrslitið. Broytingin órógvar sostatt heldur ikki eina samanbering av føroysku PISA-úrslitunum við tey hjá grannalondunum.

Málbólkurin í 2025 var 9.-floksnæmingar, eins og tað hevur verið síðani 2009.

## Royndartíðarskeið og luttøka

Allar royndirnar fóru fram í tíðarskeiðnum 10. mars til 4. apríl 2025.

20 skúlar vóru við í PISA Føroyum við tilsamans 702 næmingum í 9. flokki. Skúlarnir høvdu frá 10 til 96 næmingar í 9. flokki. 569 næmingar luttóku í kanningini. Hetta gevur eina svarluttøku upp á 81%.

PISA hevur ein møguleika fyri næmingar við serligum tørvi lutvíst at luttaka í kanningini. Hesi svara eina kanning, ið tekur ein tíma, og verður tí nevnd UH (fr. „une heure", ein tími). Í 2022 var fyrsta ferðin, at føroyskir næmingar við serligum tørvi fingu møguleika at luttaka. Hesir næmingar fáa sum nevnt eina styttri útgávu av kanningini (ein tíma). Bakgrundsspurningarnir líkjast. Tað eru skúlastjórarnir, sum meta um, hvørt teirra næmingar við serligum tørvi megna at fara til hesa avmarkaðu kanningina. 61 næmingar vóru tilmeldaðir til UH-kanningina, og av teimum luttóku 53. Hetta svarar til 87%.

Av teimum, sum luttóku í UH-kanningini, gjørdu 2% hetta vegna virkisbrek, 36% vegna kognitivt, atferðarligt ella kensluligt brek, 6% vegna avmarkaðan førleika í føroyskum, og 56% av øðrum ávum.

Tey, sum luttaka í UH-kanningini, eru ikki frítikin frá PISA-kanningini.

OECD hevur gjørt neyvar tekniskar standardir, sum lýsa, hvussu næmingar og skúlar skulu veljast út, um ikki øll verða vald at luttaka, soleiðis sum vit gera í Føroyum og Íslandi. Skúlarnir fáa neyvar vegleiðingar.

Mannagongdirnar í PISA áseta, at næmingar kunnu frítakast frá royndini, um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og/ella um teir hava serligan tørv (*Special Education Needs*). Hesi serligu viðurskifti eru lýst í Technical Standards[2]:

1. Virkisbrek – næmingurin hevur eitt avmarkað ella eitt sera trupult likamligt brek
2. Kognitivt, atburðarligt ella kensluligt brek – við støði í meting, framdari av serkønum fólki, hevur næmingurin eitt kognitivt, atburðarligt ella kensluligt brek
3. Næmingur við avmarkaðum førleika í føroyskum – næmingurin hevur ikki føroyskt sum móðurmál og hevur avmarkaðan førleika í føroyskum
4. Orð- ella talblind/ur – við støði í meting framdari av serkønum fólki
5. Er einki at viðmerkja, verður einki skrivað

PISA setir sum krav, at í mesta lagi fimm prosent av næmingunum verða frítiknir av omanfyrinevndu ella øðrum orsøkum. Nøkur lond hava ikki megnað at halda hetta krav, og tá ger altjóðasamtakið eina serliga greining, har londini verða kravd eftir fleiri upplýsingum, so kannast kann, um úrslitini framvegis eru sambærilig, áðrenn dátu verða tikin við í altjóðafrágreiðingina og dátugrunnin.

Sum nevnt: Í Føroyum vóru av teimum 702 næmingunum 42 næmingar, ella 6%, frítiknir, og sostatt varð farið upp um markið vegna serlig viðurskifti. Í 2022 var talið 10%, men tá varð gjørt vart við, at nógvir av hesum næmingum av órøttum vóru skrásettir at skula luttaka í PISA-kanningini.

PISA setir sum krav, at í minsta lagi 80% av næmingunum eru við í royndini, og hetta kravið luku Føroyar aftur hesa ferð við einari svarluttøku uppá 81%. Staðfestast kann, at luttøkuprosentið er rættiliga ymist frá skúla til skúla, har onkur rættiliga stórur skúli hevur rættiliga lágt luttøkuprosent. Sjey skúlar hava luttøkuprosent lægri enn 80%, seks skúlar hava luttøkuprosent millum 80 og 85%, tveir skúlar millum 85 og 90%, og fimm skúlar meira enn 90%-luttøku. Tólv av 20 skúlum hava brúkt møguleikan at frítaka nakrar næmingar, meðan 8 skúlar ikki hava frítikið nakrar.

## Vekting

Í PISA verða dátur vektaðar eftir føstum mannagongdum. Fyrsta stig er vekting at útjavna ójøvn úrvalssannlíkindi. Vanliga verður gjørt eitt úrval av skúlum og síðani úrval av næmingum á hesum skúlum, og í báðum førum kunnu vera ójøvn úrvalssannlíkindi. Í altjóða-PISA verður einans eitt úrval av næmingum tikið við á hvørjum skúla. Er talan um ein stóran

2 https://one.oecd.org/document/EDU/PISA/GB(2022)24/REV1/FINAL/en/pdf

skúla, kunnu vera heilt fáir næmingar úr hvørjum flokki, og næmingar eru oftast frá fleiri floksstigum. Í Føroyum eru allir skúlar og allir næmingar úttiknir, og tískil er ikki neyðugt við úrvalsvekting. Næsta stig í vektingini er at útjavna fráveru, sum kann vera ymisk í ymsum bólkum. Her verða næmingar í PISA bólkaðir á skúlar og eftir kyni, t.d. gentur og dreingir verða vektað fyri seg á hvørjum skúla. Tað merkir, at frávera av dreingjum ávirkar einans vektingina av øðrum dreingjum á sama skúla og tilsvarandi við gentum.

Vanliga er tað serliga fyrra stig í hesi vektingini, sum kann hava eina ávísa ávirkan á úrslitini, meðan seinna stig sjáldan broytir úrslitini nógv. Í PISA Føroyum eru allir skúlarnir og allir næmingarnir við í úrvalinum, og tí verður fyrra stig lopið um, og einans seinna stig í vektingini er við.

Í sambandi við vektingina bólka vit næmingarnar í skúla og kyn. Síðani 2015 hevur, orsakað av vantandi skráseting, ikki verið gjørligt at bólka í mun til flokk sum í 2009 og 2012, ið hevði verið rættari. Vektingin hevur tó, sum væntað, lítla ávirkan á úrslitið (talva 7.1).

*Talva 7.1: Landsmiðal í lærugreinuum, PISA 2022*

| | Óvektað | Vektað |
|---|---|---|
| Náttúruvísindi | 450 | 451 |
| Lesing | 426 | 428 |
| Støddfrøði | 452 | 452 |

Minsta vektin er 1,03; medianvektin er 1,23; og største vektin er 1,72.

Føroysku úrslitini eru, sum vanligt hevur verið øll árini, serliga samanborin við grannalondini (Norðurlond, Bretland og Írland) umframt við OECD-miðal. Størstur dentur er lagdur á samanberingar við Norðurlond, og tá slíkar samanberingar verða gjørdar, verða vektað úrslit brúkt; hetta tí flestu onnur lond hava eitt úrval av skúlum og næmingum.

Greiningarnar eru gjørdar í SPSS og IEA-IDB Analyser.

## Koting av næmingasvarum

PISA-kanningin inniheldur ymisk sløg av uppgávum. Ein partur av uppgávunum eru opnar, t.e. at næmingarnir skulu við egnum orðum lýsa eina loysn. Føroysk lesandi tóku sær av at kota hesi svar á teldu. Frammanundan vóru hesi lesandi til upplæring saman við donsku PISA-kotarunum, sum fólk frá danska PISA-samtakinum stóðu fyri.

## Dátugóðska

Í øllum pørtum av kanningini eru neyvar mannagongdir fastlagdar, sum skulu tryggja nøktandi dátugóðsku.

Eru krøvini fylgd, verða dátu góðkend uttan nærri greining, men eru brot á mannagongdir, ella eru krøv, sum ikki eru rokkin, eitt nú svarprosent, ger altjóðasamtakið nærri greiningar, har londini skulu svara spurningum og útvega upplýsingar og prógv, fyri at samtakið kann góðkenna dátu. Ein bólkur av serfrøðingum hevur her síðsta orðið. Tað er fleiri ferðir hent, at dátur ella partar av dátum frá summum londum ikki eru vorðin góðkend.

Føroyar koma ikki undir somu krøv beinleiðis frá OECD, men eftir avtalu við Mentamálaráðið skuldi Danmarks Statistik tryggja, at somu mannagongdir vórðu fylgdar í føroysku PISA-kanningini sum í altjóða PISA-kanningini.

Samanumtikið kunnu vit siga, at Føroyar uppfyltu øll formlig krøv undantikið kravið um frítøku undir 5%.

## Tilvísingar

Teksturin í hesi frágreiðing er í stóran mun grundaður á altjóða tilfarið frá OECD, sum er skrivað við støði í PISA kanningini 2025 (OECD 2026a, OECD 2026b, OECD 2025).

### Tilvísingarlistin


Brandt, G. M. R. (2024). *Kom og les raðið: les neyvt, væl og skjótt.* Nám.

Cain, K. & Oakhill, J. (2004). Reading Comprehension Difficulties. Í: T. Nunes & P. Bryant (ritstj.) *Handbook of Children's Literacy*, s. 313-338. Springer, Dordrecht, http://dx.doi.org/10.1007/978-94-017-1731-1_18.

Clinton-Lisell, V. & Litzinger, C. (2026). Decoding digital reading: a network meta-analysis of comprehension across devices. *Education and Information Technologies, 31*, 1611–1643. https://doi.org/10.1007/s10639-025-13843-8

Højsted, I. (2016). Støddfrøði. Í: Olsen, E.; Højsted, I. & Knudsen, J. *PISA-frágreiðing 2016 – úrslit og frágreiðing.* Mentamálaráðið. https://lms.cdn.fo/media/8769/pisa-2015-fr%C3%A1grei%C3%B0ing.pdf?s=uvHKSwBJk6yCTrwTX5a17iuls04.

Højsted, I. (2022). Støddfrøði. Í: Olsen, E.; Højsted, I.; Isholm, P.; Blaasvær, L. & Sandoy, T. M. *PISA-frágreiðing 2022.* Nám. https://provstovan.fo/fileadmin/07_provstovan/PDF-skjol/PISA/2022/Pisafragreiding_-_PISA_2022_.pdf

OECD (2023). PISA 2022. *Mathematics Framework*, PISA, OECD Publishing, Paris.

OECD (2025). *PISA 2025 Technical Standards*, OECD Publishing, Paris, https://www.oecd.org/content/dam/oecd/en/about/programmes/edu/pisa/publications/technical-standards/PISA_2025_Technical_Standards.pdf.

OECD (2026a). *PISA 2025 Results*. Vol 1. OECD Publishing, Paris, ávegis.

OECD (2026b). *PISA 2025 Assessment and Analytical Framework*, PISA, OECD Publishing, Paris, https://doi.org/10.1787/86c36975-en.

OECD (2026c). Annex A. Trends in reading scores over three PISA cycles (2018-2025). Í: OECD (2026) *PISA 2025 Results (Volume I),* ávegis.

Perfetti, C.; Marron, M. & Foltz, P. (1996). Sources of Comprehension Failure: Theoretical Perspectives and Case Studies. Í: Cornoldi, C & J. Oakhill (ritstj.) *Reading Comprehension Difficulties: Processes and Remediation*. Erlbaum.

Ólavsstovu, V. Í (2019). Í: Olsen, E.; Ólavsstovu, V. í; Hilduberg, R. & Bjarnason, G. (2019). *PISA-frágreiðing 2018. Úrslit og frágreiðing*. Tórshavn: Nám. Pisa 2018.indd

Isholm, P. (2023). Lesing. Í: Olsen, E.; Højsted, I.; Isholm, P.; Blaasvær, L. & Sandoy, T. M. (2023). *PISA-frágreiðing 2022. Úrslit og frágreiðing*. Tórshavn: Nám. Pisa frágreiðingin 2022.indd

Rasmussen, S. M.; Didriksen, L. & Kjølbro, T. (2025). Bara tey, sum elska-elska at lesa – gera tað: Lesing og lesivanar hjá føroyskum børnum. *Fróðskaparrit, 71,* 54-82. https://doi.org/10.18602/3dntpp58

Rasmussen, S. M.; Didriksen, L.; Kjølbro, T. & Ziskason, M. (2018). *Kanning av lesivanum hjá børnum 2017/18 – Frágreiðing.* Málmenning. https://www.malmenning.fo/kanning-av-lesivanum/

White, P. et al. (2003). „Agency in the Anthropocene: Supporting document to the PISA 2025 Science Framework“. *OECD Education Working Papers,* No. 297, OECD Publishing, Paris, http://doi.org/10.1787/8d3b6cfa-en.

HEITI: PISA-frágreiðing 2025 • Úrslit og frágreiðing • ÚTGEVARI: Nám
ÁBYRGD: Nám • HØVUNDAR: Erla Olsen, Ingi Højsted, Helena Kannuberg og Rakul Skaale Andreasen.
ÚTGIVIÐ: 8. september 2026
UMBRÓTING OG PRENT: Føroyaprent